IFAB®

THE INTERNATIONAL FOOTBALL ASSOCIATION BOARD

FIFA

Fótbólts-lógin 2026

Download
Laws of the Game App

Týtt: Fótbóltssamband Føroya

IFAB

Fótbólts-lógin 2026

The International Football Association Board
Münstergasse 9, 8001 Zurich, Switzerland
T: +41 (0)44 245 1886, F: +41 (0)44 245 1887
www.theifab.com

Týtt: Fótbóltssamband Føroya
Prent: Føroyaprent

Innihald

Fororð 6

Um lógina 8
Hugsanin og andin handan Fótbóltslógina 10
At handfara broytingar í Fótbóltslógini 14

Notur til Fótbóltslógina 16
Tillagingar til Fótbóltslógina 20
Vegleiðing 'Bert liðskiparin' 24
Vegleiðing til fyribils útvísingar 28
Vegleiðing til flúgvandi útskiftingar 32
Mannagongd, tá eyka útskifting verður loyvd orsakað av heilaskjálvta 34

Fótbóltslógin 2026 38
§01 Vøllurin 40
§02 Bólturin 50
§03 Leikararnir 54
§04 Útgerð leikaranna 62
§05 Dómarin 68
§06 Hinir dystarleiðararnir 78
§07 Leiktíðin 86
§08 Byrjan og uppafturtøka av leiki 90
§09 Bólturin í og úr leiki 94
§10 At finna úrslitið av einum dysti 96
§11 Rangstøða 102
§12 Fríspørk og ósømiligur atburður 108
§13 Fríspørk 124
§14 Brotssparkið 128
§15 Innkastið 134
§16 Málsparkið 138
§17 Hornasparkið 142

VAR handbók 146

FIFA Quality Programme 156

Lógarbroytingar 2025 160
Samanumtøka av lógarbroytingum 161
Nærlýsing av lógarbroytingum 164

Orðalisti 172
Fótbóltssamgongur 173
Fótbóltsmál 174
Dómaramál 184

Leiðreglur til dystarleiðarar 186
Inngangur 187
Støðusnildi, rørsla og samstarv 188
Kropsmál, samskifti og floyta 202
Onnur góð ráð 208

Forord

Fótbóltssamband Føroya gevur nú fyri 19. ferð út Fótbóltslógina á føroyskum. Fótbóltslógin er týdd úr Laws of the Game, sum FIFA útgevur. Petur Reinert hevur týtt, og síðani hevur hann saman við Lassin Isaksen gjøgnumgingið bókina. Bóklingurin inniheldur fótbóltslógirnar við teimum broytingum og tillagingum, sum eru gjørdar í tekstinum. Harafturat eru vegleiðingar til dómarar og hjálpardómarar tiknar við.

Fótbóltslógin, sum varð útgivin í 2017, varð í stóran mun umskrivað við týðandi broytingum í bygnaði og málburði. Síðani tá hava broytingar verið gjørdar á hvørjum ári, tó ikki eins víðfevndar. Arbeiðið, sum varð byrjað í 2017 við at gera stórar broytingar, er nú í høvuðsheitum komið á mál. Broytingarnar, sum nú verða gjørdar, hava fyrst og fremst til endamáls at halda Fótbóltslógina so tætt upp at upprunaætlanini frá 2017 sum tilber. The IFAB ger javnan royndir við ymiskum lógarbroytingum, sum viðhvørt verða broyttar aftur eftir einum ári ella fáum árum. Eitt dømi er, nær fríspark skal dømast fyri at spæla bóltin við hondini.

Hesa ferð eru ikki gjørdar ógvusligar broytingar, hóast okkurt nýtt kemur at síggjast aftur. IFAB hevur serliga sett sjóneykuna á drál og onnur viðurskifti, sum stytta ta tíð, bólturin er í leiki. Í hesum sambandi er nú broyting gjørd í grein 12, sum hevur til endamáls at forða málmanninum í at halda bóltinum ov leingi, tá hann hevur tamarhald á honum. Hetta merkir, at 6-sekundsreglan fer úr gildi. Sum áður verður miðað eftir at skriva Fótbóltslógina á ein hátt, sum er lættur at lesa. Hetta kann tó vera avbjóðandi, tí lógartekstur gerst mangan stirvin.

Yvirskipaða málið er at gera lógartekstin greiðari og týðiligari, so tulkingar av støðum verða so eins og tilber, hóast altíð er talan um eina meting hjá dómaranum.

Dómarar eru menniskju og fara at gera feilir, men vit eiga altíð at royna at geva teimum so neyvar forteytir sum gjørligt. Skuldi dómarin komið í eina støðu, sum ikki beinleiðis er lýst í lógini, verður mælt til, at hann tekur avgerð út frá andanum í lógini og spælinum. Dómarin kann millum annað spyrja seg sjálvan: Hvat væntar fótbólturin í hesi støðu?

Hóast VAR (Video Hjálpardómari) verður nýttur í Føroyum, tá A-landsliðið hjá monnum spælir undankappingardystir, er skipanin ikki tikin í nýtslu í føroysku kappingini enn. Arbeitt hevur verið við at fáa VAR inn í føroyskan fótbólt seinastu árini, og nú er hetta komið eitt fet nærri. Í hesari útgávuni verður hugtakið VAR Light nevnt fyri fyrstu ferð. Krøvini til VAR-skipanina eru linkað soleiðis, at smærri fótbóltstjóðir sum Føroyar eisini hava møguleika at innføra eina minni krevjandi útgávu.

Royndir hava verið gjørdar í ungdómsfótbólti, og nakrir av føroysku úrmælingadómarunum hava verið á skeið í Danmark fyri at fáa kunnleika til at døma við VAR. Arbeiðið er nú komið so mikið langt, at ætlanin er at nýta VAR í nøkrum dystum í bestu mansdeildini í 2026.

Broytingar í Fótbóltslógini eru galdandi fyri allar deildir, har annað ikki er tilskilað, og koma í gildi 1. januar 2026. Ikki er loyvt at endurprenta bókina ella brot úr henni uttan skrivligt loyvi frá FSF.

Tórshavn, á Kyndilsmessu 2026

Dómaranevndin

FÓTBÓLTSSAMBAND FØROYA

IFAB

Um lógina

Hugsanin og andin handan Fótbóltslógina

Fótbóltur er størsta ítróttin í heiminum. Fótbóltur verður spældur í øllum londum og á nógvum ymiskum stigum. Fótbóltslógin er galdandi fyri allan fótbólt í heiminum; heilt frá HM finaluni til ein dyst millum børn í einari lítlari bygd.

Tað, at sama lóg er galdandi í øllum dystum í øllum sersambondum, londum, býum og bygdum í øllum heiminum, er sera styrkjandi, og eigur hetta at varðveitast. Hetta er eisini ein møguleiki, ið eigur at gagnnýtast – fótbóltinum at frama allastaðni.

Fótbóltur má hava reglur, sum tryggja, at spælið er „rættvíst“, tí at eitt avgerandi grundarlag í „tí vakra spælinum“ er rættvísi – hetta hevur alstóran týdning fyri „andan“ í spælinum. Teir bestu dystirnir eru teir, har tað sjáldan er tørvur á dómaranum, tí leikararnir spæla við virðing fyri hvørjum øðrum, dystarleiðarunum og Fótbóltslógini.

Reglurnar í fótbólti eru lutfalsliga einfaldar samanborið við aðrar liðítróttir. Tó eru nógvar støður sum eru tengdar at uppfatanini hjá einstaklingum, og havandi í huga at dómarar eru menniskju (tað hevur so við sær, at teir gera feilir), umgongst ikki, at summar avgerðir fara at elva til kjak og orðadrátt.

Fyri summi er hetta kjak ein partur av njótilsinum í fótbólti, men minnast skal til, at „andin“ í lógini krevur, at avgerðir dómarans altíð verða virdar. Øll, sum hava myndugleika í spælinum, serliga venjarar og liðskiparar, hava eina greiða ábyrgd yvir fyri spælinum at virða dystarleiðarar og avgerðir teirra.

Fótbóltslógin kann ikki taka atlit til allar hugsandi og óhugsandi støður, og har sum ongin áseting er í Fótbóltslógini, væntar IFAB at dómarin tekur eina avgerð samsvarandi „andanum“ í Fótbóltslógini. Hetta verður ofta gjørt við at spyrja:

„Hvat væntar/vil fótbólturin?“

Rangur atburður frá luttakandi er orsøk til alsamt meira høvuðbrýggj, og tað er av alstórum týdningi, at øll, sum eru íblandað, verða viðfarin virðiliga, soleiðis at fótbóltur gerst stuttligur og rættvísur.

'Bert liðskiparan' mannagongdin er innført í fleiri londum, og hetta hevur hepnast sera væl. Av hesi orsøk verður mannagongdin nú viðmæld í Fótbóltslógini. Orsøkin til viðmælið er, at breið semja er um, at tá bert liðskiparin kann nærkast dómaranum, tá hesin hevur tikið ein týdningarmikla avgerð, gerst samspælið millum dómaran og leikararnar betri. Eisini huglagið á vøllinum batnar. Hetta er sera týdningarmikið fyri framtíð spælsins – eisini tá tað ræður um tilgongd og varðveiðslu av dómarum.

Í 2024/25 vórðu royndir gjørdar fyri at gera nakað munagott við málmenn, sum hildu bóltinum ov leingi. Úrslitið er, at grein 12 er broytt soleiðis, at málmenn verða sektaðir við hornasparki til mótstøðuliðið, um teir halda bóltinum longri enn 8 sekund.

Áður nevndu royndir vístu greitt, at eitt hornaspark er ein munagóð fyribyrging, sum er lættari at fáast við enn eitt óbeinleiðis fríspark í brotssparksteiginum. Tey 8 sekundini verða strangliga handhevjað av dómaranum, sum sjónliga telur tey seinastu 5 sekundini niður við at nýta fingrarnar á aðrari hondini, sum verður hildin uppi.

Úrslitið av eini aðrari væleydnaðari roynd er, at nú er møguligt at lata dómaran kunngerða og greiða frá endaligu avgerðini eftir eina VAR endurskoðan ella eina longri VAR kanning.

Fótbóltslógin skal eisini verða viðvirkandi til trygd og vælferð leikaranna, og IFAB hevur skyldu at virka skjótt og hóskandi til tess at stuðla teinmum íðkandi gjøgnum sjálva Fótbólltslógini, tá tørvur er á hesum.

Fyri at røkka hesum, er nú møguleika at loyva 'heilaskjálvta-útskiftingum'. Hetta loyvir liðum at raðfesta vælferðina hjá einum leikara, sum hevur fingið ein heilaskjálvta, ella har illgruni er um, at ein leikari hevur fingið heilsakjálvta, uttan at liðið skal spæla restina av dystinum undirmannað.

Hóast óhapp koma fyri, eigur Fótbóltslógin at tryggja, at spælið er so trygt sum gjørligt. Tað krevst, at leikarar virða mótleikarar, og at dómarar skapa eitt trygt umhvørvi við at sláa hart niður á tey, sum spæla á ein ov ógvisligan og ov vandamiklan hátt. Í Fótbóltslógini stendur greitt, at leikháttur, sum ikki er tryggur, verður ikki góðtikin; hetta stendur undir agarevsingum undir orðingum so sum

„hasarderað takkling" (ávaring = gult kort/GK),

„at seta trygdina hjá mótleikara í vanda" ella „at nýta ógvisliga megi"

(útvísing = reytt kort/RK).

Í eini roynd at fáa fleiri fólk at skilja fótbóltslógina, hevur IFAB skrivað bóklingin

'Fótbóltsreglur'. Ætlanin er at gera fótbóltslógina lættari at skilja. Hesin bóklingur er skrivaður á einum einklari máli, og hugsanin er, at reglurnar gerast lættari at skilja fyri ung fólk, møguligar ella nýggjar dómarar, vaksin, sum døma viðhvørt, leikarar, venjarar (eisini teir, sum taka útbúgvingina), áskoðarar og fjølmiðlar.

Fótbóltssamband Føroya hevur eisini týtt henda bókling til føroyskt.

At handfara broytingar í Fótbóltslógini

Fótbóltur skal vera dragandi og stuttligur fyri leikarar, dómarar, venjarar og áskoðarar, fjepparar, umsiting o.s.fr. Fótbóltslógin skal hjálpa at gera fótbóltin dragandi og stuttligan, soleiðis at fólk vilja luttaka og njóta sín leiklut í fótbólti – uttan mun til aldur, ættarslag, átrúnað, mentan, tjóðarbólk, kyn, kynsligan hug, avlamni o.s.fr.

Til tess at fremja lógarbroytingar má IFAB vera av teirri fatan, at hetta fer at gera spælið betri. Hetta merkir viðhvørt, at uppskotið má roynast, áðrenn tað verður viðtikið.

Fyri øll broytingaruppskot verður høvuðsdenturin lagdur á rættvísi, virðing, trygd, reinlyndi og njótilsi hjá teimum luttakandi og áskoðarum. Har tað er hóskandi, verður tøkni nýtt fyri at gera spælið betri.

IFAB fer áhaldandi at samstarva við fótbóltsfamiljuna kring allan heimin, soleiðis at broytingar í Fótbóltslógini gagna fótbólti í øllum hornum í heiminum, og so at reinleikin í spælinum, Fótbóltslógin og dómararnir verða vird, høgt mett og vard.

Notur til Fótbólts-lógina

Notur til Fótbóltslógina

Almenn mál
IFAB gevur út Fótbóltslógina á enskum, týskum, fronskum og sponskum. Er nakar ójavni í orðingini, er enski teksturin galdandi.

Onnur mál
Tjóðarfótbóltssambond, sum týða Fótbóltslógina, kunnu fáa uppsetingina til 2022/23-útgávuna frá The IFAB við at seta seg í samband við: **info@theifab.com**

Tjóðarfótbóltssambond, sum framleiða ein týdda útgávu av Fótbóltslógini, eru vælkomin at senda hana til IFAB (Tað skal týðiliga standa á permuni, hvat tjóðar fótbóltssamband hevur staðið á odda fyri týðingini), soleiðis at hon kann leggjast út á heimsíðu IFAB's til onnur at nýta.

Mát
Um nakað frávik er millum tey metrisku og tey ensku mátini, eru tey metrisku galdandi.

Nýtsla av Fótbóltslógini
Somu reglur eru galdandi í øllum dystum í øllum sersambondum, londum, býum og bygdum. Burtursæð frá teimum tillagingum, sum IFAB loyvir (sí tillagingar til Fótbóltslógina), **skal Fótbóltslógin ikki tillagast ella broytast, undan tikið við loyvi frá IFAB.**

Tey, sum útbúgva dómarar ella onnur luttakandi, skulu leggja dent á, at:

- dómarar skulu handfara Fótbóltslógina á ein hátt, sum tryggjar rættvísar og tryggar dystir og hava „andan" í lógunum við í metingini
- øll skulu virða dómararnar og avgerðir teirra, havandi í huga at dómarar eru menniskju og fara at gera mistøk

Leikararnir hava eina sera stóra ábyrgd, tá tað snýr seg um ta mynd, sum verður víst av fótbóltinum, og liðskiparin hevur ein týdningarmiklan leiklut, sum skal tryggja, at Fótbóltslógin og avgerðir dómarans verða vird.

Lykil

Høvuðslógarbroytingarnar eru undirstrikaðar og eru við gulum í úti í breddanum.

GK= gult kort (ávaring); RK= reytt kort (útvísing).

Tillagingar til Fótbóltslógina

Útbreiðslan av Fótbóltslógini ger, at spælið er at kalla eins allastaðni í heiminum og á øllum stigum. Eisini skal Fótbóltslógin skapa eitt rættvíst og trygt umhvørvi at spæla fótbólt í, samstundis sum hon skal eggja til luttøku og njótilsi.

Søguliga sæð hevur IFAB loyvt tjóðarfótbóltssambondunum eitt sindur av rásarúmi til at gera tillagingar til tær „umsitingarligu“ greinarnar í Fótbóltslógini. Tó er IFAB nú av teirri greiðu fatan, at tjóðarfótbóltssambondini eiga at fáa fleiri møguleikar at tillaga, hvussu fótbólturin skal skipast, um tað er fótbóltinum í teirra landi at frama.

Hátturin, fótbóltur verður spældur og dømdur uppá, eigur at vera tann sami á øllum fótbóltsvøllum í øllum heiminum, líka frá HM-finaluni til ta minstu bygdina. Tó eigur tørvurin í einum landi at gera av, hvussu leingi ein dystur varir, hvussu nógv fólk kunnu luttaka, og hvussu ávísur rangur atburður eigur at sektast.

Øll tjóðarsambond (og Sersambond og FIFA) hava møguleika at tillaga øll ella nøkur av fylgjandi økjum í Fótbóltslógini, soleiðis at hetta tænir fótbóltinum, sum tey hava ábyrgd av.

Galdandi fyri allan fótbólt

- Hvørt lið hevur loyvi at fremja í mesta lagi fimm* útskiftingar. Í ungdómsfótbólti verður talið ásett av fótbóltssambandinum, sersambandinum ella FIFA.
- Nýtsla av eini eyka útskifting orsakað av heilaskjálvta
- ‘heilsaskjálvta-útskifting’ (sambært mannagongd IFAB’s)
- ‘Bert liðskiparin’-mannagongdin verður innført

** Sí eisini § 3 fyri at síggja, hvørjar treytir eru galdandi fyri dystir, har eyka tíð verður spæld og fyri at síggja, hvørjar avmarkingar eru galdandi fyri útskiftingar.*

Til ungdóm, veteranar, rørslutarnað og barnafótbólt:

- støddin á vøllinum
- stødd, vekt og tilfar, sum bólturin er framleiddur úr
- vídd millum málstengurnar og hæddin frá yvirliggjaranum niður á vøllin
- longdin á teimum (líka longu) hálvleikunum í dystinum (og teimum líka longu hálvleikunum í longdari leiktíð)
- Talið av leikarum
- nýtsla av flúgvandi útskiftingum
- nýtsla av fyribils útvísingum fyri onkrar/allar ávaringar (GK)
- Serlig krøv til armband liðskiparans
- Fyri at geva tjóðarsambondunum meira rásarúm og betri møguleika at menna fót bólt í egnum landi, eru fylgjandi broytingar eisini loyvdar (Hesar snúgva seg um aldursflokkingar):
- Tjóðarsambond, sersambond og FIFA hava smidleika til at seta aldursmark í ungdóms- og veteranfótbólti.
- Hvørt tjóðarsamband ger av, hvørjar kappingar á lægstu stigum verða flokkaðar sum „barnafótbóltur“.

Royndir,IFAB's

Stundum má eitt broytingaruppskot roynast í verki fyri at vita, hvørja ávirkan tað kemur at hava á spælið. Sersambond, tjóðarsambond og kappingarfyriskiparar mugu hava loyvi frá IFAB fyri at luttaka í slíkum royndum.

Í 2025/26 fer IFAB framhaldandi at gera royndir á lægri støði fyri at kanna møguleikan at hava eitt tíðarbil at sissa leikarar í eftir klandursstøður.

Meira fæst at vita um hesar royndir við at fara inn á **theifab.com**
(Far inn á ‘Trials’)

Tey, sum hava hug at søkja um at vera við í onkrari roynd, kunnu seta seg í samband við The IFAB við at skriva til: **trials@ifab.com**

Loyvi til aðrar tillagingar

Tjóðarfótbóltssambondini hava møguleika at loyva ymiskum tillagingum í ymsu deildunum – tað er onki krav um at nýta allar ella at nýta tær allastaðni. **Tó eru aðrar tillagingar ikki loyvdar undantikið við loyvi frá IFAB.**

Tjóðarfótbóltssambond verða biðin um at siga IFAB frá, hvørjar tillagingar tey nýta, og á hvørjum stigi hesar tillagingar verða nýttar. Hendan kunning og serliga orsøkirnar til tillagingarnar kunnu vísa á øki at menna, sum IFAB kann deila, fyri at menna fótbólt í øðrum tjóðarfótbóltssambondum.

IFAB er eisini sera áhugað í at frætta um aðrar møguliga tillagingar til Fótbóltslógina, sum kunnu økja um luttøku og gera fótbólt meira dragandi og elva til menning um allan heimin.

Vegleiðingar ‘Bert liðskiparin’

Innleiðsla

Virðing og rættvísi eru kjarnuvirðir í fótbólti, men dómarar og aðrir dystarleiðarar verða javnan útsettir fyri munnligari og/ella fysiskari ónøgd, tá hesir taka avgerðir. Í ógvusligum førum kemur fyri, at leikarar renna eftir dómaranum og umringa hann. Hetta sýnir vantandi virðing fyri dómaranum, skaðir ímyndina av spælinum og kann vera ræðandi.

Sterkari samstarv millum dómaran og liðskiparan kann hjálpa við at gróðurseta rættvísi og eina felags virðing. Í hesum føri soleiðis, at tá dómarin kann greiða frá lyklaavgerðum, er bert loyvt liðskiparanum at nærkast dómaranum, treytað av, at hetta verður gjørt á ein virðiligan hátt, og at liðskiparin ber seg virðiliga at.

Samstundis hevur liðskiparin ábyrgd av at tryggja, at viðleikara hansara halda fjarstøðu frá dómaranun og ikki leggja upp í samskiftið millum dómaran og liðskiiparan.

Fylgjandi einklu vegleiðingar áttu at hjálpt kappingarfyriskiparum, sum ynskja at innføra ‘Bert liðskiparin’ meginregluna.

Vegleiðingar

- Vanligt samskifti millum leikarar og dómaran er loyvt, og er hetta framvegis týdningarmikið (fyri at skapa gjøgnumskygni og umganga frustratiónir og klandur)
- Allir leikarar (íroknað liðskiparin), sum vísa misnøgd við orðum ella handling, verða ávaraðir (gult kort)
- Har tað er hóskandi, fer dómarin at greiða liðskiparanum og/ella leikarunum, sum eru íblandaðir støðuni, frá síni avgerð
- Fyri at forða fyri, at leikarar sláa ring um dómaran í týdningarmiklum støðum og eftir lyklaavgerðum:
  - Kann bert ein leikari -vanliga liðskiparin- nærkast dómaranum, og skal hann samskifta á ein virðiliga hátt
  - Dómarin kann geva leikarunum boð (munnliga ella kropsliga) um ikki at nærkast honum
  - Liðskiparin hevur skyldu at hjálpa við at fáa sínar liðfelagar burtur frá dómaranum
  - Leikarar, sum nærkast ella sláa ring um dómaran uttan loyvi, kunnu ávarast (gult kort)
  - Dómarin kann, har tað er hóskandi, seinka uppafturtøku av leiki fyri at lata liðskiparan greiða sínum liðfeløgum frá eini avgerð ella fyri at fáa teir at sýna høviskan atburð.
- Meting dómarans ger av, um nakar annar leikari enn liðskiparin kann nærkast ella samskifta við dómaran – t.d. um ein leikari hevur framt eitt brot, eitt brot er framt móti honum, ella ein leikari er skaddur.

Tá málmaðurin er liðskipari

- Um málmaðurin er liðksipari, skal dómarin hava at vita, hvør leikari verður útnevndur at kunna nærkast dómaranum/samskifta við dómaran í seinasta lagi, tá lutakast er fyri dystarbyrjan
- Bert málmaðurin ella útnevndi leikarin kunnu nærkast dómaranum – ikki báðir í senn
- Um útnevndi leikarin verður útskiftur ella útvístur, skal annar leikari útnevnast

Møguleiki í fótbólt hjá ungdómi, veteranum, teimum, ið bera brek og børnum
Niðanfyri standandi vegleiðingar eru bert galdandi fyri fótbólt hjá ungdómi, veteranum, teimum, ið bera brek og børnum.

- Dómarin kann taka stig til 'Bert liðskiparin' mannagongdina við at bríksla og vísa fylgjandi tekin:
    - Lyfta báðar armarnar yvir høvd og krossa skøvningarnar
    - Gevast við at krossa armarnar og flyta teir framma fyri kroppin við opnum lógvum við eini rørslu, sum trýstir út eftir fyri at vísa, at leikarar ikki kunnu nærkast dómaranum



- Eitt øki á 4 metrar frá dómaranum er tá bert til liðskiparan
- Um neyðugt, kann dómarin flyta seg burtur frá leikarunum fyri at skapa økið til liðskiparan
- Ongin leikari uttan liðskipararnir hava loyvi at koma inn í økið til liðskipararnar
- Liðskiparin hevur skyldu til at eggja sínum liðfeløgum ikki at koma inn í økið til liðskiparan og at vera í minsta lagi 4 metrar frá dómaranum
- Um ein leikari, sum ikki er liðskipari, kemur inn í økið til liðskiparan, skal hesin ávarast fyri at sýna ónøgd við handling
- Um fleiri leikarar frá sama liði koma inn í økið til liðskiparan, skal í minsta lagi ein leikari ávarast. Hetta er vanliga leikarin, sum fyrst kom inn ella sum kom inn á mest ágangandi hátt
- Allar hendingar, har fleiri leikarar, sum ikki hava loyvi til tess, kom inn í økið til liðskiparan, skulu fráboðast til viðkomandi myndugleika*

**It is strongly recommended that competition organisers have sanctions in place to deal with situations where more than one player from a team enters the captain-only zone.*

Vegleiðing til fyribils útvísingar

Innleiðsla

IFAB góðtekur nýtslu av fyribils útvísingum fyri allar ella onkrar ávaringar/gul kort (GK) í kappingum hjá ungdómi, veteranum, rørslutarnaðum og hjá børnum, treytað av at hetta verður góðkent av tjóðarfótbóltssambandinum, sersambandinum ella FIFA138. árligi aðalfundurin hjá IFAB góðkendi eina endurskoðaða útgávu av fyribils útvísingum, sum koma í gildi 1. Januar 2025. Broytingar í innihaldinum av leiðreglunum eru undirstrikaðar; ritstjórnarligar broytingar/(broytingar í tekstinum) eru ikki merktar.

Tilvísing til fyribils útvísing er at finna í:

§ 5 – Dómarin (ábyrgd og skyldur):
Agarevsing

Dómarin hevur heimild at nýta agarevsing, og har kappingarreglurnar loyva tí, nýta fyribils útvísing, frá tí hann fer á vøllin fyri at kanna hann fyri dystar byrjan, og inntil hann fer av vølli eftir dystarlok (íroknað brotssparkskapping).

Ein fyribils útvísing er, tá ein leikari fremur eitt brot, sum skal sektast við ávaring (GK), og hann verður sektaður við útvísing, sum er galdandi ein part av dystinum. Hugsanin er, at ein revsing, sum verður framd í verki beinanvegin, kann hava eina jaliga ávirkan á leikaran, sum fremur brotið og møguliga eisini á lið hansara.

Tjóðarfótbóltssambandið, sersambandið ella FIFA eiga at góðkenna (og seta í kappingarreglurnar) fyribils útvísing eftir fylgjandi vegleiðing:

Bert leikarar

- Fyribils útvísing er galdandi fyri allar leikarar (íroknað málmenn), men ikki fyri eykaleikarar og útskiftar leikarar, sum fremja brot, ið skulu sektast við ávaring (GK)

Dómarans tekn

- Dómarin vísir eina fyribils útvísing við at vísa eitt gult kort (GK) og síðani týðiliga við báðum hondum at peika til økið, har fyribils útvísingin skal sitast (oftast er hetta tekniska økið hjá leikaranum)

Longdin á fyribils útvísingini

- Longdin á fyribils útvísingini er tann sama fyri øll brot
- Longdin á fyribils útvísingini eigur at vera umleið 10–15% av samlaðu leiktíðini (t.d. 10 minuttir í dystum, sum eru 90 minuttir; 8 minuttir í dystum, sum eru 80 minuttir)
- Tíðin á fyribils útvísingini byrjar, tá ið leikur verður tikin uppaftur, eftir at leikarin er farin av vølli
- Við í fyribils útvísingina eigur dómarin at taka tíð, sum verður „mist“ orsakað av steðgum, sum hava við sær yvirtíð í endanum á hvørjum hálvleiki (t.d. útskifting, skaði, at frøast um eitt mál o.s.fr.)
- Kappingarreglurnar mugu gera av, hvør skal hjálpa dómaranum við at halda skil á tíðini, tá ið ein fyribils útvísing verður framd. Tað kann gerast av einum umboðsmanni, einum fjórða dómara ella einum hjálpardómara. Eisini kann hetta gerast av einum hjálparfólki.
- Tá ið fyribils útvísingin er liðug, kann leikarin koma inn á vøllin aftur frá síðulinjuni við loyvi dómarans, meðan steðgur er í leiki næstu ferð
- Dómarin eigur endaligu avgerðina, nær ein leikari kann koma inn aftur
- Ein fyribils útvístur leikari kann ikki skiftast út, fyrr enn fyribils útskiftingin er liðug (tó ikki um lið hansara hevur framt allar loyvdar útskiftingar ella brúkt allar sínar útskiftingarmøguleikar)
- Um ein fyribils útvísing ikki er liðug, tá ið fyrri hálvleikur endar (ella tá ið seinni hálvleikur endar, um longd leiktíð verður spæld), skal leikarin sita restina av tíðini frá byrjan í seinna hálvleiki (byrjan á longdari leiktíð)

- Um ein fyribils útvísing ikki er liðugt sitin, tá annar hálvleikur endar, og longd leiktíð skal spælast, skal hon sitast liðug, tá longda leiktíðin byrjar
- Ein leikari, sum ikki er liðugur við eina fyribils útvísing við dystarlok, hevur loyvi at taka lut í brotssparkskapping

Øki til fyribils útvísing

- Ein fyribils útvístur leikari eigur at vera í tekniska økinum (har eitt slíkt finst) ella hjá venjaranum/hjálparfólkunum, um hann ikki hitar upp (undir somu treytum sum ein eykaleikari)

Brot, sum verða framd fyri/undir/eftir eina fyribils útvísing

- Ein fyribils útvístur leikari, sum fremur eitt brot, sum skal sektast við ávaring (GK) ella útvísing (RK), luttekur ikki víðari í dystinum, og hann kann ikki skiftast út fyri annan leikara

Víðari agarevsing

- Kappingarreglurnar/tjóðarfótbóltssambondini gera av, um frágreiðing skal latast viðkomandi myndugleika, tá ið talan er um fyribils útvísing. Til dømis kann talan vera um, at leikbann kann fáast við at fáa fleiri fyribils útvísingar (GK)

Skipanir til fyribils útvísingar

Ein kapping kann nýta eina av fylgjandi skipanum, tá ið talan er um fyribils útvísingar:

- Skipan A – Fyri allar ávaringar (GK)
- Skipan B – Fyri onkrar, men ikki allar ávaringar (GK)

Skipan A – fyribils útvísing fyri allar ávaringar (GK)

- Allar ávaringar (GK) verða sektaðar við fyribils útvísing
- Ein leikari, sum fær sína aðru ávaring í sama dysti:
  - fær á øðrum sinni eina fyribils útvísing og kann ikki luttaka víðari í dystinum
  - kann skiftast út við ein eykaleikara, tá ið hann hevur sitið sína aðru fyribils útvísing, um lið hansara ikki hevur nýtt allar loyvdu útskiftingar og/ella útskiftingsmøguleikarnar. (Hetta kemst av, at lið hansara longu er „revsað“ við at skulu spæla 2 ferðir longdina á fyribils útvísingini uttan leikaran)

Skipan B – Fyribils útvísing fyri onkrar, men ikki allar ávaringar (GK)*

- Ein listi við brotum, sum skulu sektast við ávaring (GK), skal gera av, hvørji brot skulu sektast við fyribils útvísing. Listin skal gerast fyri kappingarbyrjan
- Øll onnur brot, sum skulu sektast við ávaring, verða sektað við ávaring (GK)
- Ein leikari, sum fær tvær ávaringar í sama dysti, skal útvísast, hóast onnur ella báðar ávaringarnar eru givnar fyri brot, sum verða sektað við fyribils útvísing.

** Í summum kappingum kann tað vera gagnligt bert at nýta fyribils ávaringar, sum verða givnar fyri rangan atburð, t.d.:*

- *film*
- *tilvitað seinka mótstøðuliðinum í at taka leik uppaftur*
- *kjaftaslit, munnligar viðmerkingar ella tekn*
- *at steðga einum lovandi álopi við at halda, fíra ella spæla bóltin við hondini*
- *um sparkarin fintar á ein hátt, sum ikki er loyvdur, tá ið brotsspark verður tikið*

Vegleiðing til flúgvandi útskiftingar

Eftir góðkenning frá 131. aðafundi IFAB"s, sum var hildin í London 3. mars 2017, loyvir Fótbóltslógin nú flúgvandi útskiftingum í fótbólti hjá ungdómi, veteranum, rørslutarnaðum og børnum. Hetta er treytað av góðkenning frá tjóðarfótbóltssambandinum, sersambandinum ella FIFA.

Tilvísing til flúgvandi útskiftingar er at finna undir:

§ 3 – Leikararnir (Tal av útskiftingum):
Flúgvandi útskiftingar

Nýtslan av flúgvandi útskiftingum er bert loyvd í fótbólti hjá ungdómi, veteranum, rørslutarnaðum og børnum, og er hetta treytað av semju við tjóðarfótbóltssambandið, sersambandið ella FIFA.

Ein „flúgvandi útskifting" er framd, tá ið ein leikari, sum longu hevur spælt í dystinum og er vorðin útskiftur, verður skiftur inn aftur fyri annan leikara fyri at spæla víðari í dystinum.

Burtursæð frá eykaloyvinum, sum loyvir útskiftum leikara at koma inn aftur í dystin, eru allar aðrar ásetingar í § 3 og í Fótbóltslógini galdandi, tá ið talan er um flúgvandi útskiftingar. Serliga skal mannagongdin viðv. útskifting, sum er nevnd í § 3, fylgjast.

Mannagongd, tá eyka útskifting verður loyvd orsakað av heilaskjálvta

Galdandi frá 1. januar 2025

Innleiðsla

138. árligi aðalfundur IFAB's, sum varð hildin í Skotlandi 2. mars 2024 broytti Fótbóltslógina soleiðis, at kappingar nú kunnu loyva eyka útskiftingum, um illgruni er um heilaskjálvta.

Ein eyka útskifting verður loyvd, tá ein leikari hevur fingið heilaskjálvta, ella um illgruni er um, at hann hevur fingið heilaskjálvta, og hann ikki luttekur víðari í dystinum. Hendan útskiftingin telur ikki við í teimum 'vanligu' loyvdu útskiftingunum (heldur ikki í teimum 'vanligu' loyvdu útskiftingarmøguleikunum).

Tilvísing til eyka útskiftingar orsakað av heilsaskjálvta er at finna í:

Grein 3 - Leikararnir
3.2 Tal av útskiftingum – eyka útskiftingar orsakað av heilaskjálvta

'Heilaskjálvta útskiftingar' kunnu nýtast í kappingum, treytað av at samsvar er við mannagongdina, sum er lýst undir 'Tillagingar til Fótbóltslógina'.

GG: Hóast fleiri mannagongdir vórðu nýttar undir royndunum, varð bert ein mannagongd góðkend av aðalfundi IFAB's, og skal hendan nýtast í heilum líki.

Meginreglur

- Eitt lið kann í mesta lagi nýta eina 'heilaskjálvta útskifting' í einum dysti
- Ein 'heilaskjálvta útskifting' kann fremjast óansæð, hvussu nógvar útskiftingar eru framdar frammanundan
- Í kappingum har talið av nevndum eykaleikarum er tað sama sum talið av loyvdum 'vanligum útskiftingum', kann 'heilaskjálvta útskiftingin' fremjast við einum leikara, sum áður er vorðin útskiftur, og hon kann nýtast nær sum helst, óansæð, hvussu nógvir eykaleikarar eru nýttir frammanundan
- Tá ein 'heilaskjálvta útskifting ' verður framd, kann mótstøðuliðið eisini fremja eina eyka útskifting av einhvørjari orsøk.

Mannagongd

- Mannagongdin, tá útskifting verður framd, samsvarar við grein 3 – Leikararnir (undantikið sum greitt verður frá niðanfyri)
- Ein 'heilaskjálvta útskifting kann fremjast:
  - Beinanvegin, tá ein leikari hevur fingið heilaskjálvta, ella tá illgruni er um, at ein leikari hevur fingið heilaskjálvta
  - Eftir ein meting er gjørd á ella uttan fyri vøllin
  - Nær sum helst, tá ein leikari hevur fingið ein heilaskjálvta, ella illgruni er um, at ein leikari hevur fingið heilaskjálvta – eisini tá mett hevur verið um leikarin áður, og hann er komin inn aftur á vøllin
- Um eitt lið fremur ein 'heilaskjálvta útskifting', skal dómarin ella 4. dómarin fáa boð um hetta – helst við einum útskiftingarlepa, sum hevur annan lit enn teir vanligu
- Leikarin, sum hevur heilaskjálvta, kann ikki longur luttaka í dystinum, íroknað brotssparkskapping, og skal hann, har tað er gjørligt, fylgjast inn í umklæðingarrúmið ella á sjúkrahús
- Mótstøðuliðið fær boð frá dómaranum ella 4. dómaranum um, at tað kann gera eina eyka útskifting og, at tað hevur ein eyka útskiftingarmøguleika. Hendan útskiftingin kann gerast samstundis, sum hitt liðið fremur teirra
- 'heilaskjálvta útskifting' ella nær sum helst seinni í dystinum (undantikið sum greitt verður frá í Fótbóltslógini)

Útskiftingarmøguleikar

- At fremja eina ‘heilaskjálvta útskifting’ er ikki tengt at mest loyvda talinum av útskiftingarmøguleikum
- Um eitt lið fremur eina ‘vanliga’ útskifting samstundis, sum tað fremur eina ‘heilaskjálvta útskifting’, telur hetta sum ein av ‘vanligu’ útskiftingarmøguleikunum
- Tá eitt lið hevur brúkt allar sínar ‘vanligu’ útskiftingarmøguleikar, kann tað ikki brúka eina ‘heilaskjálvta útskifting’ til at fremja eina ‘vanliga útskifting’
- Tá eitt lið fremur eina ‘heilaskjálvta útskifting, fær mótstøðuliðið eina ‘eyka útskifting’ og ein ‘eyka útskiftingarmøguleika’. Hesin ‘eyka útskiftingarmøguleikin’ kann bert brúkast til ‘eyka útskiftingina’ og ikki til eina ‘vanliga útskifting’

Dystarleiðarar

Dómarin og hinir dystarleiðararnir, serliga 4. dómarin:

- eru ikki við í avgerðini hjá liðunum um, hvørt ein leikari skal útskiftast ella ikki, ella um liðið skal brúka eina ‘vanliga útskifting’ ella eina ‘heilaskjálvta útskifting’
- skal ikki gera av, um ein skaði ella illgruni um ein skaða gevur rætt til at nýta eina ‘heilaskjálvta útskifting’
- skal veita hóskandi hjálp, um ein leikari er skaddur, ella um illgruni er um ein skaða íroknað við at tosa við liðskiparan, venjaran og/ella læknakøn, um hesi meta, at ein leikari skal hava viðgerð, ella metast skal um ein skaða
- skal stuðla eini avgerð hjá liðskiparanum, venjaranum og/ella læknakøn, um at ein leikari ikki er førur fyri at spæla víðari, sum kann viðføra, at dómarin má seinka uppafturtøku av leiki, inntil leikarin er farin av vøllinum, og
- skal senda frágreiðing til viðkomandi myndugleika, um illgruni er um, at ein ‘heilaskjálvta útskifting’ er framd av órøttum.

IFAB

Fótbólts-lógin

2026

§ 01

Vøllurin

1. Vallarundirlag

Vøllurin skal, allur sum hann er, vera av grasi ella, um kappingarreglurnar loyva tí, av graslíki. Um kappingarreglurnar loyva tí, kann ein blanding millum veru ligt gras og graslíki loyvast (hybrid-skipan).

Liturin á graslíki skal vera grønur.

Um graslíkisvøllir verða nýttir í kappingardystum millum lið, sum eru limir í sama fótbóltssambandi, ella í altjóða dystum millum feløg, skulu vøllirnir lúka treyt ir nar, sum FIFA hevur ásett í The FIFA Quality Programme For Football Turf, um IFAB ikki hevur givið serligt undantaksloyvi.

2. Vallarmerkingar

Vøllurin skal vera fýrkantaður og merktur við linjum, sum ikki eru

vanda miklar; sama evni, sum verður nýtt til graslíkisvøllir, kann nýtast til

linj ur nar á náttúrligum vallum, um hetta ikki er vandamikið. Hesar linjur hoyra til tey øki, sum tær merkja av.

Bert tær linjur, sum eru nevndar í § 1 skula merkjast á vøllin. Har graslíki verð ur nýtt, er loyvt at hava aðrar linjur á vøllinum, treytað av at hesar hava ann an lit, og at tað er greiður munur á teimum og linjunum, sum verða nýttar til fót bólt.

Tær báðar longru linjurnar verða nevndar síðulinjur. Tær báðar styttru

linjur nar verða nevndar mállinjur.

Vøllurin er býttur í tvær hálvur við eini miðlinju, sum kemur saman í miðjuni á síðu linjunum.



- Mátini eru frá uttaru síðuni á linjunum, tí at linjurnar hoyra við til økið, sum tær stika inni.
- Brotssparksbletturin verður máldur frá miðjuni á blettinum til uttaru síðuna á mállinjuni.

Miðbletturin er merktur mitt á miðlinjuni. Ein sirkul við einum radius, sum er 9,15 metrar, er merktur rundan um miðblettin.

Loyvt er at gera frámerki 9,15 metrar frá hornaboganum fyri at tryggja, at mótleikarar halda kravdu fjarstøðuna, tá ið hornaspark verður tikið.

Hesi frá merki skulu vera uttan fyri vøllin, og tey skulu vera vinkulrøtt við mál linjuna og/ella síðulinjuna.

Allar linjur skulu hava somu breidd, sum er í mesta lagi 12 cm.

Mállinjurnar skulu hava somu vídd sum málstengurnar og tvørstongin.

Um ein leikari merkir nakað á vøllin, ið ikki er loyvt, skal hann verða ávaraður fyri at sýna óhøviskan atburð. Um dómarin sær hetta verða gjørt, meðan leikur fer fram, skal hann ávara leikaran, ið fremur brotið, fyri óhøviskan atburð, næstu ferð steðgur er í leiki..

3. Mát

Síðulinjan skal vera longri enn mállinjan.

- Longd:
  í minsta lagi 90 metrar (100 yards)
  í mesta lagi 120 metrar (130 yards)
- Breidd:
  í minsta lagi 45 metrar (50 yards)
  í mesta lagi 90 metrar (100 yards)

Kappingarreglur kunnu avgera longd á mál- og síðulinju út frá omanfyri standandi mátum.

4. Altjóða mát

Longd:
í minsta lagi 100 metrar (110 yards)
í mesta lagi 110 metrar (120 yards)

Breidd:
í minsta lagi 64 metrar (70 yards)
í mesta lagi 75 metrar (80 yards)

Kappingarreglur kunnu avgera longd á mál- og síðulinju út frá omanfyri standandi mátum.

5. Málteigurin (5-meturin)

Tvær linjur verða merktar rættvinklaðar við mállinjuna, 5,5 metrar frá innaru síðu á hvørjari málstong. Hesar linjur ganga 5,5 metrar inn á vøllin, og tær verða bundnar saman við eini linju, ið er javnfjar við mállinjuna. Tað økið, sum hesar linjur merkja av, er málteigurin (5-meturin)

6. Brotssparksteigurin (16-meturin)

Tvær linjur verða merktar rættvinklaðar við mállinjuna, 16,5 metrar frá innaru síðu á hvørjari málstong. Hesar linjur ganga 16,5 metrar inn á vøllin, og tær verða bundnar saman við eini linju, ið er javnfjar við mállinjuna. Tað økið, sum hesar linjur merkja av, er brotssparksteigurin.

Inni í hvørjum brotssparksteigi verður ein brotssparksblettur merktur 11 metrar frá miðjuni millum málstengurnar.

Ein bogi, ið hevur ein radius, sum er 9,15 metrar frá hvørjum brotssparksbletti, verður merktur uttan fyri brotssparksteigin.

7. Hornaøkið

Hornaøkið verður merkt við einum kvartum sirkli, sum hevur ein radius á 1 metur frá hornaflagginum.



8. Flaggstengur

Ein stong, sum ikki má vera lægri enn 1,5 metrar, og sum ikki má hava spískan topp, skal verða sett í hvørt horn á vøllinum. Flagg skal vera á flaggstongini. Stengur kunnu eisini verða settar við miðlinjuna. Tær skulu vera í minsta lagi 1 metur uttan fyri síðulinjuna.

9. Tekniska økið

Tekniska økið verður nýtt í dystum, sum verða leiktir á vøllum, har eitt øki við setrum er til leiðarar, eykaleikarar og útskiftar leikarar. Viðmerkingarnar niðanfyri eru vegleiðandi:

- Tað tekniska økið røkkur ein metur út frá útskiftingarplássunum á báðum síðum, og tað røkkur fram móti síðulinjuni; tó ikki nærri enn ein metur
- Hetta økið eigur at verða uppmerkt
- Kappingarreglurnar áseta, hvussu nógvir persónar kunnu verða í tí tekniska økinum
- Tey, sum eru í tekniska økinum:
  - skulu verða frámerkt undan dystarbyrjan sambært kappingarreglunum
  - skulu sýna ábyrgdarfullan atburð
  - skulu vera inni í tekniska økinum uttan í serligum føri, t.d. tá ið ein vødda mýkjari og/ella lækni við loyvi dómarans fer inn á vøllin at meta um skaddan leikara
- Bert ein persónur í senn hevur loyvi at geva taktisk boð

10. Mál

Mál skulu vera mitt á báðum mállinjum.

Málini eru gjørd úr tveimum loddrøttum stongum, sum eru líka langt burtur frá hornafløggunum, og tær verða bundnar saman í erva við einari tvørstong, ið liggur vatnrætt. Málstengurnar og tvørstongin skulu vera framleidd úr góðkendum evni og skulu ikki vera vandamikil. Stengur og tvørstong skulu hava sama skap, og skal hetta vera fýrkantað, rætthyrnt, runt, elliptisk ella ein saman renning av teimum fýra formunum.

Viðmælt verður, at øll mál, sum verða nýtt í kappingum, sum verða spældar undir FIFA ella sersambondunum, lúka treytirnar í FIFA Quality Programme for Football Goals.

Fjarstøðan millum málstengurnar er 7,32 metrar, og fjarstøðan frá undirsíðuni á tvørtrænum niður á vøllin er 2,44 metrar.

Í mun til mállinjuna skulu stengurnar standa soleiðis, at tað samsvarar við myndina (sí s. 37 í ensku bókini).

Málstengurnar og tvørstong skulu vera hvít og skulu hava somu vídd og dýpd, sum ikki skal vera meira enn 12 cm.

Um tvørstongin fer úr stað ella brotnar, verður leikur steðgaður, til hon er gjørd aftur ella fingin í rætta støðu aftur. Leikur verður tikin uppaftur við uppkasti. Ber ikki til at gera tvørstongina aftur, skal dysturin slítast. Tað er ikki loyvt at nýta reip ella nakað annað vandamikið ístaðin fyri tvørstongina.

Net kunnu verða fest í málini og í undirlagið aftanfyri málini treytað av, at tey eru væl fest og ikki órógva málmannin.

Trygd

Mál (íroknað mál, sum kunnu flytast) skulu verða trygt fest í undirlagið..

11. Máltøkni (MT)

MT kann nýtast við tí endamáli at vátta, um eitt mál er skorað ella ikki fyri at stuðla avgerð dómarans.

Nýtsla av MT skal hava tilvísing í kappingarreglunum.



Meginreglur fyri MT

MT er bert galdandi fyri mállinjuna og verður einans nýtt til at gera av, um eitt mál er skorað.

Fráboðanin um, at eitt mál er skorað, skal koma beinanvegin og sjálvvirkandi, og tað skal verða váttað av MT-skipanini, áðrenn eitt sekund er farið.

Fráboðanin skal einans vera til dómaratoymið (umvegis ur dómarans, sum ristist ella gevur sjónligt tekn og/ella ígjøgnum samskiftistólið); hon kann eisini sendast til videorúmið (VR).

Krøv og nærlýsingar av MT

Um MT verður nýtt í kappingardystum, skulu kappingarfyriskiparanir tryggja, at skipanin (íroknað møguliga loyvdar tillagingar í málkarminum ella í tøknini í bóltinum) lýkur treytirnar í FIFA Quality Programme for GLT.

Har sum MT verður nýtt, skal dómarin royna skipanina undan dystarbyrjan fyri at tryggja, at hon riggar, sum hon skal. Víst verður til hetta í royndar hand-bókini. Riggar tøknin ikki, sum hon skal sambært royndarhandbókini, kann dóm ar in ikki nýta MT-skipanina, og skal hann boða viðkomandi myndugleika frá.

12. Vinnuligar lýsingar

Ikki er loyvt at hava vinnuligar lýsingar av nøkrum slag, veruligar ella tykisligar, á vøllinum, á tí øki, sum er umgyrt av mállinjuni og málnetinum, tí tekniska økinum og dómarans øki til endurskoðan. Hetta er eisini galdandi fyri alt økið, sum er ein metur ella nærri uttan fyri vøllin, frá tí at liðini koma inn á vøllin við dystarbyrjan, til tey fara av vøllinum til hálvleiks. Eisini er hetta galdandi, frá tí at liðini koma á vøllin til seinna hálvleik, og til tey fara av vøllinum aftur við dystarlok. Ikki er loyvt at hava lýsingar á málum, netum, flaggstongum ella fløggum. Heldur ikki er loyvt at festa óviðkomandi útgerð (myndatól, mikrofonir o.s.fr.) á hesar lutir.

Lýsingar, sum standa uppreistar, skulu í minsta lagi:

- vera 1 metur frá linjunum
- hava eina fjarstøðu frá mállinjuni, sum ikki er minni enn dýpdin á málnetinum.
- vera 1 metur frá linjunum

13. Búmerki og eyðkennismerki

Endurframleiðsla, verulig ella tykislig, av búmerkjum ella eyðkennismerkjum hjá FIFA, sersambondum, tjóðarsambondum, kappingum, feløgum ella øðrum er bannað á vøllinum, málnetunum og teimum økjum, tey girða inni; málunum, flaggstongum og fløggum teirra, meðan leikt verður. Búmerki og eyðkennismerki eru loyvd á fløggunum, sum eru á flaggstongunum.

14. Video-hjálpardómari (VAR)

Í dystum, har VAR verður nýtt, skal eitt videorúm (VR) vera og í minsta lagi eitt øki til dómaran at endurskoða(RRA).

Videorúm (VR)

VR er har, sum videohjálpardómarin (VAR), hjálpar-VAR (H-VAR) og leiðarin fyri endur spælingum (replay) (LFE) starvast. Hetta kann vera á leikvøllinum, nær við leikvøllin ella longur burturi. Bert persónar við røttum myndugleika hava loyvi at koma inn í VR ella at samskifta við VAR, H-VAR og LFE undir dyst inum.

Ein leikari, eykaleikari, útskiftur leikari ella eitt hjálparfólk, sum kemur inn í VR, verður útvístur; eitt hjálparfólk, sum kemur inn í VR, verður burturvíst frá tekniska økinum.

Øki til dómaran at endurskoða (RRA)

Í dystum, har VAR verður nýtt, skal í minsta lagi vera eitt RRA, har dómarin fremur „endurskoðan á vøllinum“ (EÁV). RRA skal vera:

- á einum sjónligum stað uttan fyri vøllin
- týðiliga merkt

Ein leikari, eykaleikari, útskiftur leikari ella eitt hjálparfólk, sum kemur inn í RRA, verður ávaraður.

§ 02

Bólturin

1. Eginleikar og mát

Allir bóltar skulu vera:

- Kúluskapaðir
- Gjørdir úr leðri ella øðrum hóskandi evni.
- Til ummáls ímillum 68 cm og 70 cm.
- Skulu viga ímillum 410 og 450 gramm við dystarbyrjan.
- Uppblástir soleiðis, at teir hava eitt trýst, ið svarar til 0,6–1,1 atmosferu (600–1100 g/cm^2) við havsins yvirflatu.

Allir bóltar, sum verða nýttir til dystir, leiktir í almennum kappingum og fyri skipaðar undir vernd av FIFA, skulu lúka treytirnar og hava eitt av merkjunum frá FIFA Quality Programme for Footballs.

Eitt tílíkt merki merkir, at bólturin er alment royndur, og at hann lýkur nakrar serligar tekniskar treytir, sum eru ymiskar fyri hvørt merki, men sum allar lúka minstu krøvini í § 2 og skal verða kendur av IFAB.

Limasambond kunnu krevja, at bóltar, sum verða nýttir í teirra kappingum, skulu hava eitt av hesum merkjum.

Í kappingardystum, sum FIFA hevur skipað fyri, og í øðrum dystum, sum samgongur og limasambond hava skipað fyri, er ikki loyvt at hava nakað slag av lýs ingum á bóltinum. Hetta er ikki galdandi fyri búmerkið hjá kappingini, búmerki fyriskiparans og búmerki bóltframleiðarans. Kappingarreglurnar kunnu seta mark fyri stødd, og hvussu nógv tílík merki kunnu vera.

2. At skifta út ónýtiligan bólt

Um ein bóltur gerst ónýtiligur:

- Skal dysturin steðgast.
- Dysturin verður tikin uppafturtikin við uppkasti

Um ein bóltur gerst ónýtiligur, meðan steðgur er í leiki orsakað av byrjanar - sparki, hornasparki, málsparki, frísparki, brotssparki ella innkasti, verður dysturin tikin uppaftur eftir galdandi reglum.

Um bólturin, meðan hann ferðast frameftir, brestur ella verður oyðilagdur, meðan eitt brotsspark skal takast, ella meðan brotssparkskapping verður hildin, og hetta áðrenn hann rakar ein leikara, tvørstongina ella málstengurnar, skal brotssparkið takast umaftur.

Bólturin kann ikki verða skiftur út undir dystinum uttan loyvi dómarans.

3. Eykabóltar

Eykabóltar kunnu verða lagdir rundan um vøllin, um teir lúka tær treytir, ið eru nevndar í § 2. Dómarin hevur tamarhald á, hvussu hesir bóltar verða nýttir.

§ 03

Leikararnir

1. Tal av leikarum

Ein dystur verður leiktur av tveimum liðum, sum hava í mesta lagi ellivu leikarar; ein teirra skal vera málmaður. Ein dystur kann ikki byrja ella halda áfram, um annað av liðunum hevur færri enn sjey leikarar.

Um eitt lið hevur færri enn sjey leikarar, tí at ein leikari ella fleiri tilvitandi eru farnir av vølli, er ikki neyðugt hjá dómaranum at steðga dystinum; hann kann nýta fyrimunarregluna. Í slíkum førum skal dómarin ikki lata dystin halda fram, eftir at bólturin er farin úr leiki, um eitt lið ikki hevur í minsta lagi sjey leikarar. Um kappingarreglurnar krevja, at allir leikarar og eykaleikarar skulu vera nevndir fyri dystarbyrjan, og eitt lið byrjar ein dyst við færri enn ellivu leikarum, kunnu bert teir leikarar, ið standa til at byrja inni, koma inn sum ískoyti.

2. Tal av útskiftingum

Almennar kappingar

Talið av eykaleikarum (upp til í mesta lagi fimm), sum kunnu nýtast í einum dysti, verður ásett av FIFA, sersambandinum ella av tjóðar fótbólts sam band-inum. Í kappingum hjá monnum og kvinnum, har besta lið hjá einum felagi lut tekur í bestu deildini og í A- landsdystum, har kappingarreglurnar loyva í mesta lagi fimm útskiftingum, kann hvørt liðið:

- Nýta tríggjar útskiftingarmøguleikar
- Hálvleikssteðgurin telur ikki sum ein útskiftingarmøguleiki

Eyka tíð

- Um eitt lið ikki hevur nýtt allar sínar útskiftingar og/ella útskiftingar møgu-leikar, kunnu ónýttar útskiftingar og útskiftingarmøguleikar nýtast í longdu leiktíðini
- Tá kappingarreglurnar loyva eini eyka útskifting í longdu leiktíðini, fáa liðini eisini ein eyka útskiftingarmøguleika
- Útskiftingar kunnu eisini fremjast í tíðarbilinum millum vanliga leiktíð og eyka tíð og í hálvleiksstøðginum í eyka tíðini – hesar útskiftingar eru ikki at meta sum nýttir útskiftingarmøguleikar

Kappingarreglurnar skulu gera greitt:

- hvussu nógvar eykaleikarar eitt lið kann hava á leikaralistanum. Frá trimum og til í mesta lagi fimtan.
- um tað er loyvt ella ikki at nýta eina eyka útskifting, tá ið ein dystur verður avgjørdur við hjálp av longdari leiktíð (Um hetta altíð er loyvt, ella bert tá ið liðið hevur nýtt allar sínar útskiftingar).

Aðrir dystir

Í Altjóða „A-liðs“ dystum hjá vaksnum kunnu í mesta lagi fimtan eykaleikarar standa á dómaraseðlinum, og av teimum, kunnu í mesta lagi seks verða innskiftir.

Í øllum øðrum dystum kunnu fleiri eykaleikarar verða nýttir, treytað av:

- at liðini kunnu semjast um eitt hámark.
- at dómarin fær boð um tað, áðrenn dystur byrjar.

Um dómarin ikki hevur fingið boð, ella um eingin semja er partanna millum, kunnu í mesta lagi seks eykaleikarar verða nýttir.

Flúgvandi útskiftingar

Flúgvandi útskiftingar eru bert loyvdar í fótbólti hjá ungdómi, veteranum, rørslutarnaðum og børnum, og bert um semja er fingin við tjóðarfótbólts-sambandið, sersambandið ella FIFA

Eyka útskiftingar, tá illgruni er um heilaskjálvta

'Heilaskjálvta útskiftingar' kunnu nýtast í kappingum, treytað av at samsvar er við mannagongdina, sum er lýst undir 'Tillagingar til Fótbóltslógina'.

3. Mannagongd, tá ið skift verður út

Fyri allar dystir er galdandi, at dómarin skal vita nøvnini á øllum eykaleikarum undan dystarbyrjan. Eykaleikarar, sum dómarin ikki hevur fingið upplýst navnið á, kunnu ikki luttaka í dystinum.

Fyri at skifta út við eykaleikara, skulu hesar treytir verða loknar:

- dómarin skal hava boð, áðrenn skift verður út
- leikarin, sum verður útskiftur:
    - fær loyvi frá dómaranum at fara av vølli, um hann ikki longu er farin av vøllinum, og hann skal fara av vøllinum við ta linju, sum er nærmast, har hann er staddur, um dómarin ikki gevur honum onnur boð, t.d. at fara út við miðlinjuna ella aðrastaðni (m.a. orsakað av trygdarávum ella skaða)
    - Skal beinanvegin fara í tekniska økið ella umklæðingarrúmið, og hann luttekur ikki longur í dystinum, um ikki flúgvandi útskiftingar verða nýttar
- um ein leikari, sum skal skiftast út, sýtir fyri at fara av vølli, heldur leikur fram

Eykaleikarin hevur bert loyvi at koma inn:

- meðan steðgur er í spæli
- við miðlinjuna
- tá ið útskifti leikarin er farin av vølli
- tá ið hann hevur fingið loyvi frá dómaranum

Ein útskifting er framd, tá ið ein eykaleikari trínur inn á vøllin. Frá teirri løtu er leikarin vorðin ein útskiftur leikari, og eykaleikarin er vorðin ein leikari, og kann hesin taka leik uppaftur.

Allir eykaleikarar og útskiftir leikarar eru undir myndugleika dómarans; sama um teir spæla ella ikki.

4. Skifta málmann

Ein og hvør av hinum leikarunum kann skifta um pláss við málmannin, treytað av:

- at dómarin fær boð um tað, áðrenn skift verður.
- at skiftið verður framt, meðan steðgur er í leiki.

5. Brot/Revsingar

Um ein eykaleikari, sum stendur á dómaraseðlinum, byrjar inni fyri ein, sum upprunaliga stóð til at byrja inni, og hetta hendir, uttan at dómarin hevur fingið nakra fráboðan:

- letur dómarin eykaleikaran halda áfram at spæla
- skal eykaleikarin onga agarevsing hava
- leikarin, sum stóð á dómaraseðlinum, kann gerast eykaleikari
- liðið, ið fremur brotið, hevur somu nøgd av útskiftingum tøkar
- dómarin sendir frágreiðing um tilburðin til viðkomandi myndugleika

Um ein útskifting er framd í hálvleikinum ella áðrenn eykatíð, skal manna-gongdin verða gjøgnumførd, áðrenn dysturin verður tikin uppaftur. Um dóm arin ikki fær boð um útskiftingina, kann innskifti leikarin halda áfram at spæla, ongin agarevsing skal gevast, og frágreiðing um hendingina skal sendast við kom andi myndugleikum.

Um ein leikari skiftir um pláss við málmannin uttan at hava fingið loyvi dómarans, áðrenn skift varð:

- skal leikur halda fram.
- skulu teir leikarar, sum eru uppií, verða ávaraðir næstu ferð, bólturin fer úr leiki. Tó skal ongin ávaring gevast, um teir skiftu um pláss í hálvleiks-steðginum (íroknað hálvleiksteðgin í longdari leiktíð) ella í steðginum, sum er millum dystarlok og byrjanina av longdari leiktíð og/ella brotssparks kapping.

Fyri øll onnur brot á hesa grein:

- skulu teir leikarar, sum eru blandaðir uppí, verða ávaraðir.
- skal leikur verða tikin uppaftur við einum óbeinleiðis frísparki, ið skal verða tikið av einum leikara frá mótstøðuliðnum, har sum bólturin var, tá ið leikur varð steðgaður

6. Útvístir leikarar og eykaleikarar

Ein leikari, ið er útvístur:

- áðrenn dómaraseðilin er latin inn, kann á ongan hátt verða nevndur á dómaraseðlinum
- eftir at dómaraseðilin er latin inn, men áðrenn dysturin er byrjaður, kann skiftast út við ein av nevndu eykaleikarunum. Annar leikari kann ikki koma ístaðin fyri eykaleikaran, og talið av útskiftingum, sum liðið kann fremja, verður ikki lækkað
- eftir dystarbyrjan, kann ikki loysast av
- Ein eykaleikari, sum er nevndur á dómaraseðlinum, og sum verður útvístur fyri ella eftir dystarbyrjan, kann ikki loysast av.

7. Eyka persónar á vøllinum

Venjarin og aðrir leiðarar, sum eru nevndir á dómaraseðlinum (undantikið leikarar og eykaleikarar) eru hjálparfólk. Øll, sum ikki eru nevnd á dómaraseðlinum sum leikarar, eykaleikarar ella hjálparfólk, eru at meta sum óviðkomandi.

Um eitt hjálparfólk, eykaleikari, útskiftur/útvístur leikari ella onkur óviðkomandi kemur inn á vøllin, skal dómarin:

- bert steðga leiki, um hetta órógvar leik
- fáa persónin burtur, tá ið steðgur er í leiki
- velja hóskandi agarevsing

Um leikur verður steðgaður, og órógvið stóðst av:

- einum hjálparfólki, eykaleikara, útskiftum/útvístum leikara, skal leikur takast uppaftur við einum beinleiðis frísparki ella brotssparki
- einum óviðkomandi persóni, skal leikur takast uppaftur við uppkasti

Um ein bóltur er á veg í málið, og órógvið ikki forðar einum verjandi leikara í at spæla bóltin, skal málið góðkennast, um bólturin fer í málið (sjálvt um nortið varð við bóltin). Hetta er ikki galdandi, um áleypandi liðið órógvaði.

8. Leikari uttan fyri vøllin

Um ein leikari, sum skal hava loyvi dómarans fyri at koma inn á vøllin aftur, kemur inn á vøllin aftur uttan loyvi dómarans, skal dómarin:

- steðga leiki (tó nýtist hann ikki at gera hetta beinanvegin, um tann leikarin ikki órógvar leik ella ein dystarleiðara, ella um fyrimunarreglan kann nýtast).
- ávara leikaran fyri at koma inn á vøllin uttan loyvi dómarans.

Um dómarin steðgar leiki, skal hann verða tikin uppaftur:

- við einum beinleiðis frísparki til mótstøðuliðið, har sum bólturin var, tá ið leikur varð steðgaður
- við einum óbeinleiðis frísparki, har sum bólturin var, tá ið brotið varð framt, um leikarin ikki órógvaði leik ella ein dystarleiðara.

Ein leikari, sum natúrliga fer út um eina vallarlinju í dystinum, brýtur ikki Fótbóltslógina.

9. Mál skorað, meðan eyka persónur er á vøllinum

Um dómarin leggur til merkis, eftir eitt mál er skorað, men áðrenn leikur er tikin uppaftur, at ein eyka persónur var á vøllinum, tá ið málið varð skorað, og hesin persónurin legði upp í leik:

- skal dómarin kolldøma málið, um eyka persónurin var:
  - ein leikari, eykaleikari, útskiftur leikari ella hjálparfólk við tilknýti til liðið, sum skoraði málið. Leikur verður tikin uppaftur við beinleiðis frísparki, har sum eyka persónurin var staddur
  - ein óviðkomandi, sum leggur upp í leik, um mál ikki stendst av hesum, sum nevnt omanfyri í „Eyka persónar á vøllinum.“ Leikur verður tikin uppaftur við uppkasti

- Dómarin skal góðkenna málið, um eyka persónurin var:
  - ein leikari, eykaleikari, útskiftur/útvístur leikari ella hjálparfólk hjá tí liði, sum málið varð skorað ímóti
  - ein óviðkomandi, sum ikki legði upp í leik

Í øllum førum skal dómarin syrgja fyri, at eyka persónurin verður fluttur av vøll inum.

Um – eftir at mál er skorað, og leikur er tikin uppaftur – dómarin leggur til merkis, at ein eyka persónur var á vøllinum, tá ið málið varð skorað, kann málið ikki kolldømast. Um eyka persónurin framvegis er á vøllinum, skal dómarin:

- steðga leiki
- fáa eyka persónin fluttan
- taka leik uppaftur við uppkasti ella hóskandi frísparki

Dómarin skal lata frágreiðing inn til viðkomandi myndugleikar.

10. Liðskiparin

Øll lið skulu hava ein liðskipara á vøllinum, sum skal bera eitt armband, sum vísir, at hann er liðskipari. Liðskiparin hevur ongar sersømdir, men hann hevur eina ávísa ábyrgd av atburðinum hjá liði sínum.

Mannagongdir viðvíkjandi “Bert liðskiparin”, sum eru at finna undir ‘Tillagingar til Fótbóltslógina’, kunnu innførast í kappingarnar.

§ 04

Útgerð leikaranna

1. Trygd

Ein leikari kann ikki nýta útgerð ella bera nakað, sum er vandamikið.

Allir prýðislutir (hálsketur, armbond, ringar, oyrnaringar, leðurbond, gummibond o.s.fr.) eru strangliga bannaðir og skulu beinast burtur. At nýta klistur at fjala prýðislutir við verður ikki góðtikið.

Leikararnir skulu kannast fyri dystarbyrjan, og eykaleikararnir skulu kannast, áðrenn teir koma inn á vøllin. Um ein leikari ber ella nýtir útgerð, sum ikki er loyvd ella er vandamikil ella prýðislutir, skal dómarin geva leikaranum boð um at:

- beina lutin burtur
- fara av vøllinum næstur ferð steðgur er í leiki, um leikarin ikki kann ella vil gera eftir boðum

Ein leikari, sum sýtir fyri at gera eftir boðum, ella nýtir somu útgerð aftur, skal ávarast.

2. Kravd útgerð

Kravda útgerðin hjá einum leikara er sett saman av fylgjandi lutum:

- eini blusu við ermum
- stuttbuksum
- hosur – klistur ella annað evni, sum er uttaná skal hava sama lit sum tann parturin av hosuni, sum tað er klistrað á ella fjalir
- skinnabeinsverju – hesar skulu vera framleiddar úr hóskandi tilfari og hava hóskandi stødd fyri at geva nøktandi verju, og tær skulu vera fjaldar av hosunum. Leikararnir hava ábyrgdina av, at skinnararnir hava hóskandi stødd og førleikar
- skógvar

Liðskiparin skal bera armbandið, sum er fingið til vega ella góðkent av kappingarfyriskiparanum, ella kann hann bera eitt armband, sum er einlitt og hevur orðið 'captain', bókstavin 'C' ella eina týðing av hesum. Hetta skal eisini vera einlitt (sí eisini 'tillagingar til Fótbóltslógina').

Ein leikari, sum missir ein skógv ella skinnara orsakað av einum óhappi, skal fáa hetta í rætt lag skjótast gjørligt og í seinasta lagi næstu ferð steðgur er í leiki. Um leikarin spælir bóltin og/ella skorar eitt mál, áðrenn hetta er fingið í rætt lag, skal mál dømast.

3. Litir

- Bæði liðini skulu bera litir, sum týðiliga skilja tey hvørt frá øðrum, dómaranum og hinum dystarleiðarunum.
- Báðir málverjarnir skulu bera litir, sum týðiliga skilja teir frá øðrum leikarum, dómaranum og hinum dystarleiðarunum.
- Um blusurnar hjá málmonnunum er eins littar, og eingin teirra hevur aðra blusu at fara í, skal dómarin loyva dystinum at spælast.

Undirtroyggjur skulu:

- vera einlittar og hava sama høvuðslit sum ermarnar á leikarablusuni.
- ella
- hava mynstur/litir, sum eru akkurát líka sum erman á blusuni.

Undirbuksur/súkklubuksur skulu hava sama høvuðslit sum stuttbuksurnar ella sama lit sum niðasti partur av stuttbuksunum – leikarar á sama liði skulu bera sama lit.

4. Onnur útgerð

Verjandi útgerð, sum ikki er vandamikil, so sum handskar, høvurútgerð, andlitsmaskur, knæ- og armverjur, ið eru framleidd úr bleytum, løttum evni, er loyvd. Keppar hjá málmonnum og ítróttarbrillur eru eisini loyvd.
Málmonnum er loyvt at vera í joggingbuksum.

Verja til høvdið

Tá ið verja til høvdið (undantikið keppar hjá málmonnum) verður nýtt, skal hon:

- vera svørt ella hava sama høvuðslit sum blusan (Treytað av at leikarar á sama liði bera sama lit)
- Skal samsvara við professionellu útsjóndina á útgerðini, sum leikarin nýtir
- ikki vera fest í blusuna
- ikki vera til vanda fyri leikaran, ið nýtir hana, ella nakran annan
- ikki hava nakað, sum stingur út úr henni (Framstandandi lutir)

Elektroniskt samskifti

Leikarar (íroknað eykaleikarar/útskiftar leikarar og útvístir leikarar) hava ikki loyvi at bera ella nýta nakað slag av elektroniskari útgerð ella samskiftisútgerð (undantikið EPTS, tá ið tað er loyvt). Hjálparfólk hava loyvi at nýta elektroniskt samskifti, treytað av at tað beinleiðis hevur við trygd leikaranna at gera ella annað, sum hevur við taktikk ella venjing at gera. Hetta er bert galdandi fyri smá, flytfør tól, sum kunnu havast í hondini (t.d. mikrofon, smátalara, oyrna-snigil, fartelefon/snildfon, snild-ur, teldil, farteldu). Eitt hjálparfólk, sum nýtir útgerð, sum ikki er loyvd, ella sum sýnir rangan atburð orsakað av nýtslu av elektroniskari ella samskiftisútgerð, verður útvíst.

Elektroniskar skipanir fyri at fylgja við menning

Tá ið elektroniskar skipanir, fyri at fylgja við menning, verða nýttar í dystum, leiktir í almennum kappingum, sum eru fyriskipaðar av FIFA, sersambondunum ella av tjóðarfótbóltssambondunum, skal fyriskiparin av kappingini tryggja, at øll tøkni, sum er fest í útgerð leikaranna, ikki er vandamikil og livir upp til treytirnar fyri EPTS, sum eru í FIFA Quality Programme for EPTS.

Tá ið fyriskiparin av dystinum ella kappingini, veitir elektroniskar skipanir fyri at fylgja við menning, skal fyriskiparin av dystinum ella kappingini, tryggja, at upplýsingar og vitan, sum koma frá EPTS til tekniska økið undir dystinum, eru álítandi og neyv.

The FIFA Quality Programme for EPTS stuðlar kappingarfyriskiparum at góðkenna EPTS-skipanir við álítandi og neyvum mannagongdum.

5. Slagorð, yvirlýsingar, myndir og lýsingar

Útgerð skal ikki hava politisk, átrúnaðarlig ella persónlig herróp, boð ella myndir. Leikarar skulu ikki vísa undirklæði, sum vísa politisk, átrúnaðarlig ella persónlig herróp, boð ella myndir ella aðrar lýsingar enn merkið hjá framleiðaranum. Eitt lið ella ein leikari, sum vísir undirklæði, sum vísa politisk, átrúnaðarlig ella persónlig herróp, boð ella myndir ella aðrar lýsingar enn merkið hjá framleiðaranum verður sektað/ur av kappingarfyriskiparunum ella av FIFA.

Meginreglur

- Grein 4 er galdandi fyri alla útgerð (íroknað klæði), sum verður nýtt av leikarum, eykaleikarum og útskiftum leikarum; meginreglurnar í grein 4 eru eisini galdandi fyri øll hjálparfólk í tekniska økinum.
- Fylgjandi eru (vanliga) loyvd:
  - leikarans navn, nummar, búmerkið hjá liðnum, framtakandi slagorð/merki, sum varpa ljós á fótbóltsspælið, virðing og reinleika. Aftur at hesum eru lýsingar loyvdar, treytað av at hesar halda reglurnar í kappingini og hjá tjóðarfótbóltssambandinum, sersambandinun ella FIFA
  - fakta um dystin: lið, dagfesting, kapping/høvi, stað
- Loyvd slagorð, boð ella myndir eiga at vera framman á blusuni og/ella á armbandi
- Í summum førum kann slagorðið, boðini ella myndin bert vera á armbandi liðskaparans

At tulka greinina

Tá ið støða skal takast til, um eitt slagorð, eini boð ella ein mynd skulu loyvast, eigur grein 12 (Fríspørk og ósømiligur atburður) havast í huga; í grein 12 stendur, at dómarin skal sekta ein leikara, sum er sekur í:

- at nýta niðurgerandi ella háðandi málburð ella gerðir
- ber seg at á ein hátt, sum kann vera ágangandi, láturligur ella øsandi

Slagorð, boð og myndir, sum koma undir hesa bólking eru ikki loyvd.
Meðan tað er rættiliga lætt at allýsa „átrúnaðarlig“ og „persónlig“, er tað kanska ikki eins lætt at allýsa „politisk“, men slagorð, boð og myndir, sum vísa til fylgjandi, eru ikki loyvd:

- nakran livandi ella deyðan persón (uttan so at tað er partur av kappingarnavninum)
- nakran lokalan, økisflokk, økisbólk, økisfelagsskap ella altjóða politiskan flokk/bólk/felagsskap o.s.fr.
- nakra lokala, økisstjórn, tjóðarstjórn ella nakrar av hennara deildum, embætum ella ráðum
- nakran bólk, sum ger mismun
- nakran felagsskap, har ætlan ella gerðir teirra kunnu stoyta eina merkisverda mongd av fólki
- nakra serstaka politiska gerð/hending

Tá ið ein týdningarmikil altjóða hending ella tjóðarhending skal minnast/hátíðarhaldast, skal kenslusemið hjá mótstøðuliðnum (íroknað teirra fjepparum) og hjá almenninginum havast í huga.

Kappingarreglur kunnu avmarka/skerja stødd, tal og støðu hjá loyvdum slagorðum, boðum og myndum. Viðmælt verður, at ósemjur, sum standast av slagorðum, boðum og myndum, verða loystar undan kappingar- ella dystarbyrjan.

6. Brot og revsingar

Fyri øll brot á hesa grein nýtist ikki at steðga leiki, og leikarin:

- fær boð frá dómaranum um at fara av vøllinum og fáa útgerðina í rætt lag
- fer av vølli, tá ið steðgur er í leiki, um útgerðin ikki er fingin í rætt lag áðrenn

Ein leikari, sum fer av vølli fyri at rætta ella skifta útgerð skal:

- fáa útgerðina kannaða av einum dystarleiðara, áðrenn hann fær loyvi at koma inn aftur
- bert koma inn aftur við loyvi dómarans (sum kann gevast, meðan leikur fer fram)

Ein leikari, sum kemur inn aftur uttan loyvi dómarans, skal ávarast. Um leikur verður steðgaður fyri at ávara leikaran, skal eitt óbeinleiðis fríspark dømast á tí stað, sum bólturin var, tá ið leikur varð steðgaður. Um leikarin leggur upp í leik, skal beinleiðis fríspark (ella brotsspark) dømast har, sum leikarin legði upp í leik.

§ 05

Dómarin

1. Myndugleiki dómarans

Ein og hvør dystur verður leiktur undir leiðslu av einum dómara, sum hevur fullan myndugleika at síggja til, at Fótbóltslógin verður hildin í tí dysti, hann er settur til at døma.

2. Avgerðir dómarans

Dómarin tekur avgerðir eftir besta førimuni sambært Fótbóltslógini og „andanum í lógini“. Avgerðirnar byggja á meting dómarans, sum hevur heimild til at fremja hóskandi gerningar innan fyri karmarnar í Fótbóltslógini.

Avgerðir dómarans viðvíkjandi tí, sum er hent í dystinum, eru endaligar. Hetta er eisini galdandi, um eitt mál er skorað ella ikki, og tað sama er úrslitið av dystinum. Avgerðir dómarans, og hjá øllum hinum dystarleiðarunum, skulu altíð virðast.

Dómarin kann ikki broyta eina avgerð um uppafturtøku av leiki, um hann leggur til merkis, at hon er skeiv, ella um hann fær tað at vita frá einum av hinum dystarleiðarunum, um leikur er tikin uppaftur, ella um dómarin hevur bríkslað fyri endanum á fyrra ella øðrum hálvleiki (íroknað longda leiktíð) og er farin av vøllinum ella hevur slitið dystin. Dómarin kann broyta eina avgerð fyri eina hending, sum fór fram, áðrenn hálvleikurin var liðugur, um dómarin, tá hálvleikurin er liðugur, fer av vøllinum fyri at fara inn í økið til endurskoðan ella fyri at geva leikarunum boð um at koma út á vøllin aftur.

Undantikið tí, sum greitt verður frá í § 12.3 og VAR-mannagongdini, kann ein agarevsing bert gevast, eftir at leikur er tikin uppaftur, um ein annar dystarleiðari hevur eyðmerkt brotið og roynt at sagt dómaranum, at agarevsing skal gevast, áðrenn leikur varð tikin uppaftur. Hátturin at taka leik uppaftur, sum var galdandi fyri agarevsingina, er ikki galdandi.

Um dómarin gerst óvirkin, kann leikur halda áfram undir eftirliti av einum av hinum dystarleiðarunum, inntil steðgur er í leiki næstu ferð.

3. Ábyrgd og skyldur

Dómarin:

- sær til, at Fótbóltslógin verður hildin
- leiðir dystin í samstarvi við hinar dystarleiðararnar
- heldur skil á tíðini og støðuni og gevur viðkomandi myndugleika eina dystarfrágreiðing, íroknað vitan um agarevsingar og nakrar aðrar hendingar, sum eru hendar fyri, undir ella eftir dysturin er leiktur
- hevur umsjón við og/ella ger tekn um uppafturtøku av leiki

Fyrimunur

- Letur leik halda fram, tá ið tað liðið, sum eitt brot er framt ímóti, fær fyrimun av tí, og revsar brotið, um tann væntaði fyrimunurin ikki verður til veruleika beinanvegin ella innan fyri nøkur fá sekund.

Agarevsingar

- Revsar tað álvarsamara brotið, tá ið fleiri brot verða framd í senn. Her verður hugsað um revsing, uppafturtøku av leiki, fysiskt álvarsemi og taktiska ávirkan.
- Nýtir agarevsing ímóti leikarum, sum fremja brot, sum hava við sær ávaring ella útvísing
- Hevur heimild at nýta agarevsing, frá tí hann fer á vøllin fyri at kanna hann undan dystarbyrjan, og inntil hann fer av vølli eftir dystarlok (íroknað brotssparkskapping). Um ein leikari ger eitt brot, sum førir til útvísing, áðrenn dómarin er komin á vøllin við dystarbyrjan, kann dómarin sýta leikaranum at luttaka í dystinum (sí § 3.6). Dómarin letur inn frágreiðing um allan annan rangan atburð
- Hevur heimild at vísa gul og reyð (og fyribils vísa einum leikara út, um kappingarreglurnar loyva hesum) kort, frá tí hann fer á vøllin við dystarbyrjan, inntil dysturin er liðugur, íroknað hálvleiksstøðgin, longda leiktíð og brotssparkskapping
- Virkar ímóti hjálparfólki hjá liðum, sum ikki sýna ábyrgdarfullan atburð, og ávarar og vísir teimum eitt gult kort ella eitt reytt kort og vísir teimum burtur frá vøllinum og nærumhvørvinum, íroknað tekniska økið. Um tann, sum framdi brotið ikki kann eyðmerkjast, skal hægst virkandi venjari í tekniska økinum hava agarevsingina. Eitt hjálparfólk, sum er har av læknaligum ávum, og sum fremur eitt brot, sum skal sektast við burturvísing, kann vera verandi, um liðið ikki hevur annað fólk við læknaligum førleikum. Hesin persónurin kann hjálpa, um ein leikari tørvar læknaliga hjálp.
- Skal rætta seg eftir ráðum frá øðrum dystarleiðarum viðvíkjandi støðum, hann ikki sjálvur hevur sæð

Skaðar

- Leikur heldur fram, inntil bólturin fer úr leiki, um ein leikari eftir meting dómarans bert er smáskaddur
- Steðgar leiki, um ein leikari gerst illa skaddur, og tryggjar, at leikarin verður fluttur av vøllinum. Ein skaddur leikari kann ikki fáa viðgerð á vøllinum og kann bert koma inn á vøllin aftur, eftir at leikur er tikin uppaftur. Tá ið bólturin er í leiki, kann ein skaddur leikari bert koma inn á vøllin frá síðulinjuni. Tá ið bólturin ikki er í leiki, kann ein skaddur leikari koma inn á vøllin bæði frá síðulinjuni og mállinjuni. Undantøk verða einans gjørd á hesa reglu tá:
    - ein málmaður er skaddur.
    - ein málmaður og ein útileikari hava runnið saman og hava tørv á bráðfeingis viðgerð
    - leikarar frá sama liði hava stoytt saman og hava tørv á bráfeingishjálp
    - ein sera álvarsligur skaði er komin fyri
    - ein leikari gerst skaddur orsakað av einum fysiskum broti, sum hevði við sær, at mótleikarin varð ávaraður ella útvístur (t.d. Hasarderað takkling ella leikur, sum í álvarsligan mun ikki er loyvdur), um metingin av skaðanum/viðgerðini verður gjøgnumførd skjótt
    - eitt brotsspark er dømt, og tann skaddi leikarin skal skjóta brotssparkið
- Tryggjar, at ein leikari, sum bløðir, fer av vøllinum. Leikarin kann bert koma inn aftur á vøllin eftir at hava fingið tekn frá dómaranum; dómarin skal vera nøgdur við, at bløðingin er steðgað, og at onki blóð er á útgerðini
- Um dómarin hevur givið læknunum og/ella teimum, sum bera børuna loyvi at koma inn á vøllin, skal leikarin fara av vøllinum á børuni ella til gongu. Ein leikari, sum ikki ger eftir boðum, skal ávarast fyri at sýna óhøviskan atburð

- Um dómarin hevur gjørt av at ávara ella vísa einum skøddum leikara út, sum skal av vøllinum fyri at fáa viðgerð, skal kortið vísast, áðrenn leikarin fer av vøllinum
- Um leikur ikki er steðgaður av aðrari orsøk, ella um ein gerst skaddur av onkrum, sum ikki er brot á Fótbóltslógina, verður leikur tikin uppaftur við uppkasti

Órógv uttaníframá

- Steðgar, brýtur dystin av ella slítur dystin fyri øll brot á Fótbóltslógina ella orsakað av órógvi uttaníframá sum t.d.:
  - at ljósini eru ov vánalig
  - um ein lutur, sum verður tveittur av einum áskoðara, rakar ein dystarleiðara, ein leikara ella eitt hjálparfólk, kann dómarin steðga, bróta dystin av ella slíta dystin, alt eftir hvussu álvarslig hendingin er
  - ein áskoðari bríkslar við eini floytu, sum órógvar leikin – leikur verður steðgaður og tikin uppaftur við uppkasti
  - um ein eyka bóltur, annar lutur ella djór kemur inn á vøllin, skal dómarin:
    - bert steðga leiki (og byrja aftur við uppkasti), um hetta órógvar leik.
    - Um ein bóltur er á veg í málið, og órógvið ikki forðar einum verjandi leikara í at spæla bóltin, skal málið góðkennast, um bólturin fer í málið (sjálvt um nortið varð við bóltin). Hetta er ikki galdandi, um áleypandi liðið órógvaði.
    - lata leik halda áfram, um órógvið ikki leggur upp í leik og fáa tað flutt av vøllinum skjótast til ber.
- Loyvir ongum óviðkomandi persónum inn á vøllin

4. Video hjálpardómari (VAR)

Nýtsla av videohjálpardómarum (VAR) er bert loyvt, har kappingarfyriskiparin lýkur treytirnar, sum standa í Implementation Assistance and Approval Programme (IAAP) og hevur fingið skrivligt loyvi frá IFAB og FIFA.

Dómarin kann fáa hjálp frá einum videohjálpardómara (VAR), men bert tá ið talan er um „týðiligan og eyðsýndan feil“ ella eina „álvarsama mista støðu“, tá ið tað snýr seg um:

- mál/ikki mál
- brotsspark/ikki brotsspark
- beinleiðis reytt kort (ikki seinna ávaringin)
- skeivan samleika, tá ið dómarin ávarar ella vísir skeivum leikara frá liðnum út, sum framdi brotið

Hjálpin frá videohjálpardómaranum (VAR) fæst við at síggja støðuna umaftur. Dómarin tekur endaligu avgerðina, og kann avgerðin einans takast frá teirri upplýsing, dómarin fær frá VAR, og/ella kann dómarin endurskoða støðuna beinleiðis („Endurskoðan á vøllinum“).

Undantikið eina „álvarsama mista støðu“ skal dómarin (og aðrir dómarar á vøllinum) altíð taka eina avgerð (íroknað eina avgerð um ikki at sekta eitt møguligt brot); hendan avgerðin verður ikki broytt, uttan so at talan er um ein „týðiligan og eyðsýndan feil“.

Endurskoðan eftir at leikur er tikin uppaftur

Um steðgur hevur verið í leiki, og leikur er tikin uppaftur, kann dómarin bert fremja eina „endurskoðan“, um talan er um agarevsing fyri skeivan samleika ella fyri eitt brot, sum skal sektast við útvísing orsakað av harðskapsatburði, at spýta, at bíta ella nýtslu av ómetaliga niðrandi og/ella háðandi gerðum.

5. Útgerð dómarans

Kravd útgerð

- Floyta/ur
- Ur
- Reyð og gul kort
- Notatpappír (ella aðra útgerð fyri at halda skil á dystinum)

Onnur útgerð

Dómarar kunnu fáa loyvi at nýta:

- útgerð til at samskifta við aðrar dystarleiðarar – BIP-fløgg, samskiftistól o.s.fr.
- EPTS ella aðra útgerð, sum heldur eyga við likamligari venjing
- Ikki er loyvt dómarum og øðrum dystarleiðarum á vøllinum at bera prýðislutir ella aðra elektroniska útgerð – íroknað myndatól.

6. Dómaratekn

Sjá tekningar fyri at síggja góðkend dómaratekn.

Brotsspark

Fyrimunur (1)



Fyrimunur (2)

Óbeinleiðis fríspark

Beinleiðis fríspark

Hornaspark

Málspark

Reytt og **gult** kort



Endurskoðan: fingur upp til oyra, hin hondin/armurin strekt/ur



Sjónvarpstekin

Niðurteljing: Seinastu 5 sekundini av 8 sekunds avmarkingini, har málmaðurin kann hava tamarhald á bóltinum við hond/armi

7. Skuldbinding av dystarleiðarum

Ein dómari ella annar dystarleiðari kann ikki skuldarbindast orsakað av:

- nøkrum slag av skaða, sum ein leikari, hjálparfólk ella áskoðari fær.
- nøkrum slag av skaða á ogn av nøkrum slag.
- nøkrum missi hjá einstøkum persónum, ítróttafeløgum, feløgum, sambondum ella nøkrum øðrum stovni, sum stendst av ella kann standast av avgerð, sum dómarin tekur undir treytunum í Fótbóltslógini ella í sambandi við vanliga mannagongd fyri at skipa fyri, leika og leiða ein dyst

Tað kann millum annað vera:

- um umstøðurnar á vøllinum, í nærumhvørvinum ella veðurumstøðurnar eru soleiðis háttaðar, at hann loyvir ella ikki loyvir dystinum at byrja.
- ein avgerð um at slíta dystin av einihvørji orsøk.
- ein avgerð um útgerðina, sum nýtt verður í einum dysti (málnet, málstengur, tvørstong, flaggstengur, fløgg ella bóltur).
- ein avgerð um at slíta ella ikki slíta dystin orsakað av uppíblanding frá áskoðarum ella trupulleika á áskoðaraplássunum.
- ein avgerð um at steðga ella ikki steðga leiki fyri at loyva einum skøddum leikara av vøllinum at fáa viðgerð.
- ein avgerð um at loyva ella ikki loyva einum leikara at bera ávís klæði ella ávísa útgerð.
- ein avgerð um at biðja um ella krevja, at ein skaddur leikari fer av vølli at fáa viðgerð
- ein avgerð (um tað er hansara ábyrgd) um at loyva ella ikki loyva nøkrum persónum (herundir hjálparfólk hjá liðunum ella leikvøllinum, trygdarfólki, myndafólki ella umboð fyri fjølmiðlarnar) at vera til staðar við nærumhvørvið við vøllin.
- onkur onnur avgerð, hann tekur í samsvari við Fótbóltslógina ella undir treytum hjá FIFA, samgongunum, limasambondunum, reglugerðini í deildini ella reglugerðini, sum dysturin verður leiktur eftir.

§ 06

Hinir dystarleiðararnir

Aðrir hjálpardómarar (tveir hjálpardómarar, ein fjórði dómari, tveir eyka hjálpardómarar og ein tiltaks hjálpardómari, ein video hjálpardómari (VAR) og í minsta lagi ein hjálpar VAR (H-VAR)) kunnu setast á dystir.

Teir skulu hjálpa dómaranum við at leiða dystin sambært Fótboltslógini, men endaliga avgerðin verður altíð tikin av dómaranum.

Dómarin, hjálpardómararnir, fjórði dómarin, eyka hjálpardómararnir og tiltaks hjálpardómarin eru dómararnir „á vøllinum“.

VAR og H-VAR eru „video“ dómararnir, og hjálpa hesir dómaranum sambært mannagongdunum viðvíkjandi VAR, sum eru settar av IFAB.

Dystarleiðararnir arbeiða undir leiðbeining frá dómaranum. Í fall av óhóvligari uppílegging ella óhøviskum atburði, skal dómarin loysa teimum frá teirra skyldum og senda frágreiðing til viðkomandi myndugleika.

Hinir dómararnir „á vøllinum“, skulu hjálpa dómaranum við brotum, tá teir síggja betri enn dómarin, hvat er hent. Teir skulu senda frágreiðing um einhvønn álvarsaman, rangan atburð, sum er farin fram uttan at dómarin ella hinir dystarleiðararnir hava sæð tað, til viðkomandi myndugleika. Teir skulu siga dómaranum og hinum dystarleiðarunum frá, um nøkur frágreiðing verður send.

Dystarleiðararnir „á vøllinum“ hjálpa dómaranum við at kanna vøllin, bóltarnar og útgerð leikaranna (íroknað um trupulleikar eru loystir) og við at halda skil á tíð, málum, rangum atburði o.s.fr.

Kappingarreglurnar skulu týðiliga tilskila, hvør loysir ein dystarleiðara av, sum ikki kann byrja ella halda áfram í einum dysti, sum hann er settur at døma.

Serliga skal tað vera tilskilað, um fjórði dómarin, tann royndari hjálpardómarin ella tann royndari eyka hjálpardómarin skal loysa dómaran av, um hesin ikki kann byrja ella halda áfram.

1. Hjálpardómararnir

Teir skulu vísa:

- nær allur bólturin er farin út av vøllinum, og hvat lið eigur hornaspark, málspark ella innkast
- nær leikari skal revsast fyri at vera rangstaddur
- nær ein útskifting er umbiðin
- í sambandi við brotsspark, um málmaðurin flytur seg av mállinjuni, áðrenn bólturin er skotin, og um bólturin er innan fyri mállinjuna. Um eyka hjálpardómarar eru settir á dystin, skal hjálpardómarin stilla seg á linju við brotssparksblettin

Hjálpardómarin skal eisini hjálpa við at hava eyguni við mannagongdini í samband við útskifting.

Hjálpardómarin kann koma inn á vøllin fyri at tryggja, at múrurin stendur 9,15 m vekk.

2. Fjórði dómari

Fjórði dómarin skal eisini hjálpa við:

- at hava eyguni við mannagongdini í samband við útskifting
- at kanna útgerðina hjá einum leikara/eykaleikara
- at hjálpa til, tá ein leikari kemur inn á vøllin aftur eftir at hava fingið tekin frá dómaranum
- at hava eftirlit við eyka bóltunum
- at vísa, hvussu nógva tíð, dómarin í minsta lagi hevur lagt aftrat hvørjum hálvleiki (íroknað longda leiktíð)
- at siga dómaranum frá um rangan atburð frá nøkrum, sum er í tekniska økinum

3. Eyka hjálpardómarar

Eyka hjálpardómararnir kunnu vísa:

- nær allur bólturin er farin um mállinjuna, íroknað, tá mál er skorað
- hvat lið eigur eitt horna- ella málspark
- Í sambandi við brotsspark, um málmaðurin flytur seg av mállinjuni, áðrenn bólturin er skotin, og um bólturin er innan fyri mállinjuna.

4. Tiltaks hjálpardómari

Ein tiltaks hjálpardómari kann loysa av fyri ein hjálpardómara, fjórða dómara ella ein eyka hjálpardómara, um onkur av hesum ikki fær hildið fram.

Tiltaks hjálpardómarin kann eisini hjálpa dómaranum á sama hátt, sum hinir 'dómararnir á vøllinum'.

5. Video dystarleiðarar

Ein video hjálpardómari (VAR) er ein dystarleiðari, sum kann hjálpa dómaranum at taka avgerð við at endurskoða støður á video. Hetta kann bert gerast, tá talan er um ein „týðiligan og eyðsýndan feil“ ella um eina „álvarsama mista støðu“ ísmb. við mál/ikki mál, brotsspark/ikki brotsspark, beinleiðis reytt kort (ikki seinnu ávaring) ella í støðum viðv. skeivum samleika, tá dómarin ávarar ella útvísir skeivan leikara frá liðnum, sum framdi brotið.

Ein hjálpar VAR (H-VAR) er ein dystarleiðari, sum hjálpir VAR fyrst og fremst við:

- at hyggja at sjónvarpsupptøkuni, meðan VAR er upptikin við at „kanna“ ella „endurskoða“
- at skriva niður støður, sum eru tengdar at VAR og allar trupulleikar viðv. samskifti ella tøkni
- at hjálpa VAR við at samskifta við dómaran, serliga at samskifta við dómaran, tá VAR „kannar“/endurskoðar“, t.d. at siga við dómaran, at hann skal steðga leiki ella seinka uppafturtøku av leiki
- at fylgja við, hvussu nógv tíð „fer til spillis“, tá uppafturtøka av leiki er seinkað vegna „kanning“ ella „endurskoðan“
- at kunna viðkomandi bólk um støður, ið hava við VAR at gera

6. Tekn hjá hjálpardómarum

Sjá tekningar fyri at síggja góðkend hjálpardómara tekn.

Útskifting



Innkast til **áleyparan**
í Føroyum ímillum
15–10 minuttir í



Innkast til **verjuleikaran**
í Føroyum ímillum
15–10 minuttir í

Brot framt av **verjuleikara**

Brot framt av **áleypara**



Hornaspark



Málspark

Rangstøða

Rangstøða
nær síðulinjuna



Rangstøða
miðskeiðis á vøllinum

Rangstøða
í mótsattu síðu

7. Tekin hjá eyka hjálpardómarum

Mál
(um bólturin ikki er farin
týðiliga yvir málstrikuna)

§ 07

Leiktíðin

1. **Hálvleikir**
   Ein dystur verður leiktur í tveimum líka longum hálvleikum á 45 minuttir. Hálvleikirnir kunnu bert styttast, um semja um hetta er fingin millum liðini og dómaran undan dystarbyrjan, og einans um kappingarreglurnar loyva hesum.

2. **Hálvleiksstøgur**
   Leikarar hava rætt til ein steðg í hálvleikinum. Hálvleiksstøgurin má ikki vera longri enn fimtan minuttir. Ein stuttur drekkisteðgur (sum ikki skal vara longri enn ein minutt) er loyvdur í hálvleikinum undir longdari leiktíð. Kappingarreglurnar skulu gera greitt, hvussu langur hálvleiksstøgurin er, og longdin á honum kann bert broytast við loyvi dómarans.

3. **Yvirtíð**
   Tíð verður løgd afturat í hvørjum hálvleiki sær fyri leiktíð, sum mist verður vegna:

   - útskifting(ar).
   - meting av skaðum á leikarum og/ella flyting av skøddum leikara av vøllinum.
   - drál
   - agarevsingum
   - medisinskum steðgum, sum kappingarreglurnar loyva, t.d. „drekkisteðgir“ (sum ikki skulu vara longri enn 1 minutt) og „kølisteðgir“ (90 sekund til 3 minuttir)
   - seinkingar, sum standast av, at VAR skal „kanna“ og „endurskoða“
   - at frøast um eitt mál
   - øðrum orsøkum, íroknað seinkaða uppafturtøku av leiki (t.d. orsakað av órógvi frá einum óviðkomandi)

Fjórði dómarin vísir ta tíð, sum dómarin í minsta lagi hevur lagt afturat, tá ið seinasti minutturin í hvørjum hálvleiki er um at vera farin. Yvirtíðin kann leingjast av dómaranum, men hon kann ikki styttast.

Dómarin skal ikki viga uppímóti fyri eitt mistak viðvíkjandi tíðini í fyrra hálvleiki við at leggja meira ella minni aftur at seinna hálvleiki.

4. Brotsspark

Um eitt brotsspark skal verða tikið ella skal takast umaftur, skal hálvleikurin verða longdur, til brotssparkið er tikið.

5. Slitin dystur

Ein slitin dystur verður leiktur umaftur, um kappingarreglurnar ella fyriskipararnir ikki tilskila annað.

§ 08

Byrjan og uppaftur-tøka av leiki

Mið verður lagt fyri at byrja báðar hálvleikirnar í dystinum, báðar hálvleikirnar í longdu leiktíðini og fyri at taka leik uppaftur, tá ið eitt mál er skorað. Fríspørk (beinleiðis og óbeinleiðis), brotsspørk, innkøst, málspørk og hornaspørk eru aðrir hættir at taka leik uppaftur (sí § 13–17).

Uppafturtøka av leiki verður gjørd við uppkasti, um dómarin hevur steðgað leiki, og um Fótbóltslógin ikki krevur ein av háttunum, sum eru nevndir omanfyri.

Um eitt brot verður framt, meðan bólturin ikki er í leiki, broytir hetta ikki, hvussu leikur skal takast uppaftur.

1. At leggja mið

Mannagongd:

- Dómarin kastar eina mynt, og liðið, sum vinnur lutakastið, ger av, hvat mál tað vil leypa á í fyrra hálvleiki, ella um tað vil leggja mið
- Um mótstøðuliðið leggur mið ella velur, hvat mál tað vil leypa á í fyrra hálvleiki, veldst um omanfyrinevnda
- Liðið, sum valdi, hvat mál tað vildi leypa á í fyrra hálvleiki, leggur mið fyri at byrja annan hálvleik (Gula strikan og merki skal burtur)
- Til seinna hálvleik skulu liðini skifta síðu og leypa á mótsett mál
- Aftaná eitt lið hevur skorað eitt mál, skal hitt liðið leggja mið

Tá ið mið verður lagt:

- skulu allir leikarar, uttan hann, sum sparkar bóltin, vera á egnari vallarhálvu
- skulu mótleikararnir hjá liðnum, sum leggur mið, vera í minsta lagi 9,15 m frá bóltinum, inntil hann er í spæli
- skal bólturin liggja stillur á miðblettinum

- skal dómarin geva tekin
- er bólturin í spæli, tá ið hann er sparkaður og týðiliga flytur seg
- er loyvt at skora mál beinleiðis móti mótleikarunum. Um bólturin fer beinleiðis í sparkarans mál, skal hornaspark dømast til mótstøðuliðið.

2. Uppkast

Mannagongd:

- Um, tá leikur varð steðgaður:
  - Bólturin var inni í brotssparksteiginum, skal dómarin sleppa bóltin til málmannin hjá tí verjandi liðnum í teirra brotssparksteigi
  - Bólturin var uttan fyri brotssparksteigin, skal dómarin sleppa bóltinum til ein leikara, sum hevur bóltin, ella sum hevði fingið fatur á bóltinum, um dómarin er førur fyri at meta um hetta. Annars skal dómarin sleppa bóltinum til ein leikara á tí liði, sum seinast nart hann. Uppkastið skal fremjast har, sum bólturin var, tá leikur varð steðgaður
- Í øllum øðrum førum skal dómarin sleppa bóltinum til ein leikara á tí liði, sum seinast nart bóltin á tí stað, har bólturin seinast varð nortin av einum leikara, einum óviðkomandi ella, sum víst verður til í § 9.1, ein dystarleiðara
- Allir aðrir leikarar (á báðum liðum) skulu vera í minsta lagi 4 m burtur frá bóltinum, inntil hann er í spæli
- Bólturin er í spæli, tá ið hann nertur vøllin.

Brot og revsingar

Uppkastið skal takast av nýggjum, um:

- bólturin nertur ein leikara, áðrenn hann nertur vøllin
- bólturin fer út um vallarlinjurnar uttan at hava nortið vøllin ella ein leikara

Um bólturin, eftir at uppkast er framt, fer í mál uttan at hava nortið í minsta lagi tveir leikarar, skal leikur takast uppaftur við:

- málsparki, um bólturin fór í mál mótleikaranna
- hornasparki, um bólturin fór í egið mál

§ 09

Bólturin í og úr leiki

1. Bóltur úr leiki

Bólturin er úr leiki, tá ið:

- hann eftir jørð ella í luftini er farin út um mállinjuna ella síðulinjuna, allur sum hann er
- leikur er steðgaður av dómaranum
- hann nertur ein dystarleiðara, verður verandi á vøllinum, og:
  - eitt lið byrjar eitt lovandi álop, ella
  - bólturin fer beinleiðis í málið, ella
  - tað liðið, sum ikki hevði bóltin, fær hann

Í øllum hesum førum verður leikur tikin uppaftur við einum uppkasti.

2. Bóltur í leiki

Alla aðra tíð, tá ið bólturin rakar ein dystarleiðara, er hann í leiki; eisini tá ið hann støkkur frá eini málstong, tvørstong ella hornaflaggi og verður verandi á vøllinum.

Um eitt hjálparfólk, eykaleikari, útskiftur/útvístur leikari ella ein leikari, sum fyribils er farin av vøllinum (skaði ella at rætta útgerð), nertir bóltin, meðan hann framvegis er í leiki, men týðiliga er á veg út av vøllinum, og ætlanin ikki er at leggja upp í leik á órættvísan hátt, skal viðkomandi sektast við einum óbeinleiðis frísparki – ongin agarevsing skal gevast.

§ 10

At finna úrslitið av einum dysti

1. **Mál skorað**
   Eitt mál er skorað, tá ið allur bólturin er farin yvir um mállinjuna undir tvørstongini og millum málstengurnar, treytað av at einki brot á Fótbólts lógina er framt av tí skorandi liðnum frammanundan.

   Um málmaðurin tveitir bóltin beinleiðis í mótleikaranna mál, skal málspark dømast.

   Um dómarin ger tekn um, at eitt mál er skorað, áðrenn bólturin er farin um mállinjuna, allur sum hann er, skal leikur takast uppaftur við uppkasti.

2. **Vinnandi liðið**
   Tað liðið, sum skorar flest mál í dystinum, er vinnarin. Um bæði liðini skora líka nógv mál, ella um einki mál verður skorað, endar dysturin við javnleiki.

   Tá ið kappingarreglurnar krevja, at ein vinnari skal verða funnin eftir ein dyst ella eftir eina heima-úti-uppgerð, kunnu bert fylgjandi mannagongdir nýtast:

   - Reglan um útivallarmál
   - Tveir líka langir hálvleikir í longdari leiktíð, sum ikki eru longri enn 15 min. hvør
   - Brotssparkskapping

   Ein samanrenning av mannagongdunum, sum eru nevndar omanfyri, kann nýtast.

3. **Brotssparkskapping**
   Skipað verður fyri brotssparkskapping, tá ið dysturin er liðugur, og um annað ikki er tilskilað, er viðkomandi partur av Fótbóltslógini galdandi. Ein leikari, sum er vorðin útvístur undir dystinum, kann ikki luttaka í brotssparks kappingini; munnligar ávaringar og ávaringar (GK), sum eru givnar leikarum og hjálparfólki undir dystinum, verða ikki tiknar við í brotssparkskappingina.



Mannagongd

Áðrenn brotssparkskappingin byrjar

- Um onnur viðurskifti ikki skulu havast í huga (standur á vølli, trygd o.s.fr.), skal dómaran skipa fyri lutakasti fyri at gera av, hvat av málunum skal nýtast til brotssparkskappingina. Avgerðin kann bert broytast av trygdarávum, ella um málið ella vallarundirlagið gerst ónýtiligt
- Dómarin skipar fyri lutakasti, og liðskiparin hjá tí liðnum, sum vinnur lutakastið, ger av, hvat lið skal sparka fyrst
- Fyriuttan ein eykaleikara fyri ein málmann, sum ikki kann halda fram, kunnu bert leikarar, sum eru á vøllinum, ella sum fyribils eru farnir av vøllinum (skaðar, rætta upp á útgerð o.s.fr.), tá ið dysturin endar, luttaka í brotssparkskappingini
- Hvørt lið hevur skyldu til at velja millum teir leikarar, sum eru tøkir, og gera av, í hvørjari raðfylgju skotið verður. Dómarin skal ikki hava boð um raðfylgjuna
- Um annað liðið hevur fleiri leikarar enn mótstøðuliðið á vøllinum við dystarlok, men áðrenn brotssparkappingin er byrjað, skal tað liðið minka um talið av leikarum soleiðis, at tað samsvarar við talið av leikarum á mótstøðuliðnum. Dómarin skal hava at vita navn og nummar á teimum leikarum, ið ikki longur luttaka. Leikarar, sum eru valdir frá, kunnu ikki luttaka í brotssparkskappingini (undantikið, sum víst verður til niðanfyri)
- Ein málmaður, sum ikki fær hildið fram fyri ella undir brotssparkskapping, kann skiftast út við ein eykaleikara ella ein leikara, sum er valdur frá fyri at fáa talið av leikarum at passa, treytað av at lið hansara ikki hevur nýtt allar sínar útskiftingar. Útskifti málmaðurin kann ikki luttaka víðari, og hann kann ikki taka eitt brotsspark
- Um málmaðurin longu hevur tikið eitt brotsspark, kann avloysarin ikki taka eitt brotsspark, fyrr enn annar umgangur av brotsspørkum byrjar

Meðan skipað verður fyri brotssparkskapping

- Einans tøkir leikarar og dystarleiðarar hava loyvi at vera á vøllinum
- Allir leikarar, uttan tann, ið sparkar, og teir báðir málmenninir, skulu vera inni í miðkringinum
- Tann málmaðurin, sum er í parti við tí, sum skal sparka, skal vera á vøllinum uttan fyri brotssparksteigin, har sum spørkini verða tikin, á mállinjuni, har hon møtir linjuni til brotssparksteigin

- Ein leikari, sum er tøkur, kann skifta um pláss við málmannin
- Brotssparkið er gjøgnumført, tá ið bólturin ikki flytur seg meira, fer úr leiki, ella tá ið dómarin steðgar leiki fyri eitt brot á Fótbóltslógina; skjúttin kann ikki spæla bóltin aftur
- Dómarin heldur skil á spørkunum
- Um málmaðurin fremur eitt brot, sum hevur við sær, at brotssparkið skal takast umaftur, skal málmaðurin ávarast munnliga fyri fyrsta brotið og ávarast (GK) fyri øll fylgjandi brot
- Um skjúttin verður sektaður fyri eitt brot, sum er framt, eftir at dómarin hevur givið tekn til, at brotssparkið skal takast, verður brotssparkið mett sum brent, og leikarin skal ávarast
- Um bæði málmaðurin og skjúttin fremja brot í senn – skal skjúttin ávarast, og brotssparkið verður mett sum brent

Treytað av tí, sum stendur niðanfyri, skulu bæði liðini taka fimm brotsspørk

- Liðini skiftast um at sparka
- Allir leikarar, ið kunnu luttaka, skulu taka eitt brotsspark í part, áðrenn ein leikari kann taka eitt brotsspark fyri aðru ferð
- Um annað liðið hevur skorað fleiri mál, enn hitt liðið hevur møguleika at skora, áðrenn liðini hava skotið fimm brotsspørk, skulu ikki fleiri brotsspørk takast
- Um bæði liðini hava skorað líka nógv mál, tá ið bæði liðini hava skotið fimm ferðir, halda tey fram við at skjóta í somu raðfylgju, inntil annað liðið hevur skorað fleiri mál enn hitt við líka nógvum tiknum brotsspørkum
- Mannagongdin omanfyri heldur fram so leingi, tað er neyðugt, men eitt lið kann broyta raðfylgjuna
- Brotsspørk kunnu ikki útsetast fyri ein leikara, sum er farin av vøllinum. Um leikarin ikki er komin aftur á vøllin í tíð til at taka sítt brotsspark, missir liðið hansara brotsspark, og tað verður mett sum tikið og ikki skorað (brent)

Útskiftingar og útvísingar, meðan skipað verður fyri brotssparkskapping

- Ein leikari, eykaleikari, útskiftur leikari ella eitt hjálparfólk kann ávarast ella útvísast
- Ein útvístur málmaður skal avloysast av einum tøkum leikara
- Ein leikari, sum ikki er málmaður, og sum ikki kann halda áfram, kann ikki loysast av
- Dómarin skal ikki slíta dystin, um annað liðið hevur færri enn sjey leikarar tøkar

§ 11

Rangstøða

1. Rangstøða

Tað er ikki í sjálvum sær eitt brot at vera rangstaddur. Ein leikari er rangstaddur, um:

- nakar partur av høvdinum, kroppinum ella beinunum er á mótleikaranna vallarhálvu (miðlinjan telur ikki við), og
- nakar partur av høvdinum, kroppinum ella beinunum er nærri mótleikaranna mállinju enn bæði bólturin og næstaftasti mótleikari

Hendurnar og armarnir á øllum leikarum, íroknað hjá málmonnum, skulu ikki teljast við í metingini. Tá um rangstøðu ræður, er ovara markið á arminum á linju við botnin á handarkulluni (armholuni).

Ein leikari er ikki rangstaddur, um hann er á linju við:

- næstaftasta mótleikara ella
- tveir teir næstaftastu verjuleikararnar

2. Rangstøðubrot

Ein leikari, sum er rangstaddur, skal bert revsast, um hann, tá ið bólturin verður nortin* ella spældur av einum liðfelaga, luttekur í leiki við at hann:

- leggur upp í leik við at spæla ella nerta ein bólt, sum er spældur ella nortin av einum viðleikara, ella
- órógvar ein mótleikara við at:
  - forða einum mótleikara í at spæla ella vera føran fyri at spæla bóltin við týðiliga at forða sýni mótleikarans ella
  - at stríðast við ein mótleikara um bóltin

** Her skal nýtast tann fyrsta nertingin ella tað fyrsta sambandið, sum er við bóltin. Tó skal seinasta nertingin nýtast, tá málmaðurin tveitur bóltin.*

- týðiliga roynir at spæla ein bólt, sum er nær honum, tá gerð hansara ávirkar ein mótleikara ella
- týðiliga ger okkurt, sum týðiliga ávirkar førleikan hjá einum mótleikara at spæla bóltin

ella

- vinnur fyrimun við at spæla bóltin ella órógva ein mótleikara, tá ið bólturin:
  - støkkur ella verður rættaður av út til spælara frá eini málstong, tvørtræi, einum dystarleiðara ella einum mótleikara
  - tilvitað er bjargaður av einum mótleikara

Ein rangstaddur leikari, sum fær bóltin frá einum mótleikara, sum tilvitað spælir bóltin (undantikið tilvitað bjarging), verður ikki mettur at hava vunnið sær ein fyrimun, íroknað tá ið mótleikarin tilvitað spælir* bóltin við hondini, uttan so at mótleikarin fremur eina tilvitaða bjarging.

*At spæla bóltin tilvitað (undantikið at spæla bóltin tilvitað við hondini) er, tá ein leikari hevur tamarhald á bóltinum og hevur møguleika at:

- spæla bóltin til ein liðfelaga,
- vinna bóltin ella
- fáa bóltin burtur (t.d. við at sparka ella skalla hann)

Um royndin at spæla, vinna ella fáa bóltin burtur miseydnast, tá leikarin hevði tamarhald á bóltinum, verður hildið fast í, at hann spældi bóltin tilvitað.

Fylgjandi skal havast í huga, tá metast skal um, hvørt ein leikari hevði tamarhald á bóltinum og harvið hevur spælt bóltin tilvitað:

- bólturin kom langvegis frá, og leikarin sá bóltin væl
- bólturin flutti seg ikki skjótt
- kósin hjá bóltinum var ikki óvæntað
- leikarin hevði stundir at samskipa rørslu sína, soleiðis at talan ikki er um at toyggja seg, loypa ella eina rørslu, sum viðførdi, at leikarin illa fekk samband við bóltin
- tað er lættari at spæla ein bólt, sum ferðast á vøllinum enn ein bólt, sum ferðast í luftini

„Ein bjarging“ er, tá ið ein leikari steðgar ella roynir at steðga einum bólti, sum er á veg í, ella sera nær við at fara í málið, við nøkrum parti av kroppinum, uttan hondunum (undantikið málmaðurin í egnum brotssparksteigi).

Í støðum har:

- ein leikari flytur seg úr rangstøðu ella er rangstaddur, kemur í vegin fyri ein mótleikara og órógvar rørslu mótleikarans ímóti bóltinum, er hetta at meta sum revsiverð rangstøða, um hetta ávirkar eginleikan hjá mótleikaranum at spæla ella at stríðast um bóltin. Um rangstaddi leikarin flytur seg fyri mótleikaran og forðar honum (t.d. stillar seg fyri) skal brotið sektast sambært § 12
- frískpark verður framt ímóti einum rangstaddum leikara, sum flytur seg ímóti bóltinum við tí fyri eyga at spæla hann (og brotið verður framt, áðrenn hann spælir ella roynir at spæla bóltin), skal frísparkið dømast, tí tað hendi, áðrenn rangstøðan gjørdist veruleiki
- eitt brot verður framt ímóti einum rangstaddum leikara, sum longu spælir ella roynir at spæla bóltin, ella sum stríðist við mótleikara um bóltin, skal rangstøðan dømast, tí hon tók seg upp, áðrenn frísparkið varð framt.

3. Onki brot

Tað er ikki revsivert, um ein leikari, sum er rangstaddur, fær bóltin beinleiðis frá:

- einum málsparki
- einum hornasparki
- einum innkasti

4. Brot og revsingar

Um eitt rangstøðubrot verður framt, skal dómarin døma óbeinleiðis frískpark, har sum brotið hendi – eisini um hetta er á leikarans egnu vallarhálvu.

Um ein leikari frá tí verjandi liðinum fer av vøllinum av einhvørjari orsøk uttan loyvi frá dómaranum, verður hesin at meta sum standandi á egnari mállinju ella síðulinju, hvat rangstøðu viðvíkur, inntil steðgur aftur er í leiki, ella inntil tað verjandi liðið hevur spælt bóltin ímóti miðlinjuni, og hann er farin út úr teirra brotssparksteigi. Um leikarin tilvitað fór av vøllinum, skal hann ávarast næstu ferð, steðgur er í leiki.

Ein áleypandi leikari kann fara av ella vera uttan fyri vøllin fyri ikki at luttaka í leiki. Um leikarin kemur inn aftur umvegis mállinjuna og luttekur í leiki, áðrenn steðgur er í leiki næstu ferð, ella um tað verjandi liðið hevur spælt bóltin ímóti miðlinjuni, og hann er uttan fyri teirra brotssparksteig, verður leikarin at meta sum standandi á mállinjuni, hvat rangstøðu viðvíkur. Ein leikari, sum tilvitað fer av vøllinum, og sum kemur inn aftur uttan loyvi dómarans, og sum ikki verður sektaður fyri rangstøðu, og vinnur ein fyrimun, skal ávarast.

Um ein áleypandi leikari stendur stillur millum málstengurnar inni í málinum, meðan mál verður skorað, skal mál dømast, um ikki leikarin fremur eitt

rang støðubrot ella eitt brot á § 12. Fremur hann annað av hesum brotum, skal leikur takast uppaftur við beinleiðis ella óbeinleiðis frísparki.

§ 12

Fríspørk og ósømiligur atburður

Beinleiðis og óbeinleiðis fríspørk og brotsspørk kunnu bert dømast fyri brot, sum verða framd, meðan bólturin er í leiki.

1. Beinleiðis fríspark

Eitt beinleiðis fríspark verður dømt til mótstøðuliðið, um ein leikari eftir meting dómarans fremur nakað av teimum fylgjandi brotunum ímóti einum mótleikara á ein hátt, ið er fyrilitsleysur, hasarderaður ella við ov nógvari megi:

- skumpar
- loypur á
- sparkar ella roynir at sparka
- fírir
- slær ella roynir at sláa (íroknað at skalla)
- takklar ella fremur eina avbjóðing
- leggur bein ella roynir at leggja bein

Um eitt brot verður framt við fysiskum sambandi, verður brotið sektað við beinleiðis frísparki ella brotssparki

- „Fyrilitsleyst“ merkir, at ein leikari hevur sýnt manglandi ans ella umhugsni, meðan hann roynir at fáa bóltin, ella at hann ikki hevur sýnt fyrivarni. Ikki er neyðugt við agarevsing
- Hasarderað merkir, at leikarin ikki hevur hugsað um tann vanda ella tær fylgjur, leikháttur hansara kann fáa fyri mótleikaran, og hann skal ávarast
- „At nýta ov ógvisliga megi“ merkir, at ein leikari nýtir meira megi, enn neyðugt er, og at hann kann skaða mótleikaran, og leikarin skal útvísast

Eitt beinleiðis fríspark verður dømt, um ein leikari ger seg sekan í onkrum av fylgjandi brotum:

- „Hondbóltsbrot“ (hetta er ikki galdandi fyri málmannin í egnum brotssparksteigi)

- Heldur einum mótleikara
- Fysiskt forðar einum mótleikara
- Bítur ella spýtir eftir nøkrum á dómaraseðlinum ella einum dystarleiðara
- Tveitir ein lut eftir bóltinum, mótleikara ella dystarleiðara ella fær samband við bóltin við einum luti, sum er hildin í hondini

Sí eisini brot í § 3.

At spæla bóltin við hondini

Tá ið metast skal um „hondbóltsbrot“, er ovara markið á arminum á linju við niðasta partin á handarkullini (armholuni). Tað er ikki eitt brot, hvørja ferð ein leikari nertur bóltin við hond ella armi.

Tað er eitt brot, um ein leikari:

- tilvitað nertur bóltin við hond ella armi, t.d. við at flyta hondina ella armin ímóti bóltinum
- nertur bóltin við hondini ella arminum, tá ið hondin ella armurin hevur gjørt kroppin ónatúrligt størri. Ein leikari verður mettur at hava gjørt kroppin ónatúrligt størri, tá ið støðan hjá hond/armi ikki er ein fylgja – ella kann rættvísgerast – av rørslu leikarans í mun til leik í viðkomandi støðuni. Við at hava hondina í slíkari støðu er leikarin í váða fyri, at bólturin rakar hond/arm og tískil er váði fyri at verða sektaður
- skorar í mótleikaranna mál:
    - beinleiðis við hond ella armi, hóast hetta ikki er tilvitað. Hetta er eisini galdandi fyri málmannin
    - beinanvegin eftir at bólturin hevur nortið hondina/armin, hóast hetta ikki er tilvitað

Málmaðurin hevur somu avmarkingar sum allir aðrir leikarar, tá ið talan er um at spæla bóltin við hondini uttan fyri brotssparksteigin. Um málmaðurin spælir bóltin við hondini í egnum brotssparksteigi, tá ið hann ikki hevur loyvi til hetta, skal óbeinleiðis fríspark dømast, og ongin agarevsing skal gevast. Um brotið er endur tøku spæl (við ella uttan hond) eftir uppafturtøku av leiki, skal málmaðurin hava eina agarevsing, um brotið steðgaði einum lovandi álopi ella tekur ein upplagdan málmøguleika ella eitt mál frá mótstøðuliðnum.





2. Óbeinleiðis fríspark

Óbeinleiðis fríspark verður dømt, um ein leikari:

- spælir á ein hátt, ið er vandamikil
- forðar einum mótleikara, uttan at kropsligt samband er
- vísir misnøgd við avgerðir dómarans, nýtir háðandi, niðrandi ella óhóskandi gerðir, ella um hann er sekur í øðrum munnligum brotum
- forðar málmanninum at sleppa bóltinum úr hondunum, sparkar ella roynir at sparka hann, meðan málmaðurin er í ferð við at sleppa honum
- tekur stig til tilvitað at nýta snildir at leggja bóltin aftur til málmannin (íroknað eftir fríspark og málspark) við høvdi, bringu, knæi o.s.fr. fyri at umgangast lógina. Tá er líkamikið, um málmaðurin nertur bóltin við hondini ella ikki. Málmaðurin skal sektast, um hann tekur stig til gerðina.
- ger seg sekan í onkrum øðrum broti, sum ikki áður er nevnt í Fótbóltslógini, og sum hevur við sær, at leikur verður steðgaður fyri at ávara ella útvísa ein leikara.

Óbeinleiðis fríspark verður dømt til mótstøðuliðið, um málmaðurin inni í egnum brotssparksteigi ger seg sekan í onkrum av teimum fylgjandi brotunum:

- Nertur bóltin aftur við hondunum/ørmunum eftir at hava hildið honum, og uttan hann hevur nortið nakran annan leikara.
- Nertur bóltin við hond/armi, um málmaðurin ikki týðiliga hevur sparkað ella roynt at sparkað bóltin fyri at fáa hann í spæl eftir at:
  - bólturin tilvitað er spældur til hansara av einum viðleikara við fótinum.
  - hava fingið bóltin frá einum innkasti, ið er tikið av einum viðleikara.

Vandamikil leikur

Ein og hvør gerð, sum (meðan roynt verður at spæla bóltin) skúgvar trygdina hjá nøkrum til viks (íroknað leikaranum sjálvum), og sum forðar einum mót leikara í at spæla bóltin av ótta fyri skaða, er at meta sum vandamikil leikur.

Saksaspark er loyvt, treytað av at tað ikki er vandamikið fyri mótleikaran.

At forða framgongdini hjá einum mótleikara

At forða framgongdini hjá einum mótleikara merkir at stilla seg fyri hann, soleiðis at tað hindrar honum, seinkar honum ella noyðir hann at skifta kós, tá ið hvørgin leikari hevur bóltin í leikfjarstøðu.

Allir leikarar hava rætt at vera á vøllinum; at standa fyri einum mótleikara er ikki tað sama sum at stilla seg fyri ein mótleikara.

At skerma fyri bóltinum er loyvt. Ein leikari, sum stillar seg millum bóltin og ein mótleikara, hevur ikki framt eitt brot, so leingi sum bólturin er í leikfjarstøðu, og leikarin ikki heldur mótleikaranum burtur við ørmum ella kroppi. Um bólturin er í leikfjarstøðu, kunnu mótleikarar skumpa leikaran.

3. Hornaspark

Eitt hornaspark skal dømast, um málmaðurin í egnum brotssparksteigi hevur tamarhald á bóltinum við hond/armi í meira enn átta sekund, áðrenn hann sleppur honum. Ein málmaður verður mettur at hava tamarhald á bóltinum við hond/armi, tá:

- Bólturin er millum hendurnar/armarnar ella millum hendurnar/armarnar og eina flatu (t.d. vøllin, egnan kropp)
- Hann heldur bóltinum við strektari hond
- Hann støkkur bóltin í vøllin ella kastar hann í luftina

Dómarin ger av, nær málmaðurin hevur fingið tamarhald á bóltinum, og nær tey átta sekundini byrja. Tey seinastu fimm sekundini telur dómarin sjónliga niður við lyftari hond.

Mótleikarum er ikki loyvt at stríðast við málmannin um bóltin, tá hann hevur tamarhald á bóltinum við hond/armi.

4. Agarevsing

Dómarin hevur myndugleika at nýta agarevsing, frá tí hann fer á vøllin fyri at kanna hann undan dystarbyrjan, og inntil hann fer av vølli eftir dystarlok (íroknað brotssparkskapping).

Um ein leikari ella eitt hjálparfólk ger eitt brot, sum førir til útvísing, áðrenn dómarin er komin á vøllin við dystarbyrjan, kann dómarin sýta leikaranum ella hjálparfólkinum at luttaka í dystinum (sí § 3.6). Dómarin letur inn frágreiðing um allan annan rangan atburð.

Ein leikari ella eitt hjálparfólk, sum fremur eitt brot, sum skal sektast við ávaring ella útvísing, skal sektast samsvarandi brotinum. Tað ger tað sama, um brotið verður framt inni á vøllinum ella uttanfyri.

Gula kortið merkir ávaring, og reyða kortið merkir útvísing.

Bert leikarar, eykaleikarar, útskiftir leikarar og hjálparfólk kunnu vísast gula ella reyða kortið.

Leikarar, eykaleikarar og útskiftir leikarar

At seinka uppafturtøku av leiki fyri at vísa kort

Um dómarin hevur gjørt av at ávara ella útvísa ein leikara, skal leikur ikki takast uppaftur, fyrr enn agarevsingin er gjøgnumførd, uttan so at liðið, sum brotið varð framt ímóti, tekur eitt skjótt frískpark, hevur ein stóran málmøguleika, og dómarin ikki er byrjaður upp á mannagongdina við at geva agarevsingina.

Agarevsingin skal gevast næstu ferð, steðgur er í leiki; um brotið var at taka ein upplagdan málmøguleika frá mótstøðuliðnum, skal leikarin ávarast. Um brotið var at steðga einum lovandi álopi, skal leikarin ikki ávarast.

Fyrimunur

Um dómarin velur at nýta fyrimunarregluna fyri eitt brot, sum hevði verið sektað við ávaring/útvísing, um leikur varð steðgaður, skal ávaringin/ út vís ingin verða framd næstu ferð, steðgur er í leiki. Tó skal leikarin ávarast fyri at sýna óhøviskan atburð, um talan er um frátøku av uppløgdum mál møgu leika. Er talan um at órógva ella steðga lovandi álopi, skal leikarin ikki ávarast.

Fyrimunarreglan eigur ikki at verða nýtt, tá ið talan er um leik, sum í álvarsligan mun ikki er loyvdur, harðskapatburð ella fyri eitt brot, ið verður sektað við seinna gula kortinum til sama leikara – uttan so at talan er um ein upp lagdan møguleika at skora mál. Dómarin skal útvísa leikaranum, næstu ferð steðgur er í leiki. Um leikarin spælir bóltin, stríðist um bóltin við mótleikara ella leggur upp í leik, skal dómarin steðga leiki, útvísa leikaranum og taka leik upp aftur við einum óbeinleiðis frísparki, um leikarin ikki hevur framt eitt álvar samari brot.

Um ein verjuleikari byrjar at halda einum mótleikara uttan fyri brotssparksteigin, og hann heldur áfram at halda honum inni í brotssparksteiginum, skal dómarin døma brotsspark.

Brot, ið verða sektað við ávaring

Ein leikari skal ávarast, um hann:

- seinkar uppafturtøku av leiki
- vísir misnøgd við avgerðir dómarans við orðum ella gerð
- kemur inn/inn aftur á vøllin ella tilvitað fer av vølli uttan loyvi dómarans
- ikki heldur kravdu fjarstøðuna, tá ið leikur skal takast uppaftur við uppkasti, hornasparki, frísparki ella innkasti
- áhaldandi fremur brot á Fótbóltslógina (onki ávíst tal ella mynstur av brotum verður mett sum „áhaldandi“)
- sýnir óhøviskan atburð
- kemur inn í øki dómarans til endurskoðan (RRA)
- ógvisliga vísir „endurskoðanartekn“ (Sjónvarpsskíggi)

Ein eykaleikari ella ein útskiftur leikari skal ávarast, um hann:

- seinkar uppafturtøku av leiki
- vísir misnøgd við orðum ella gerð
- kemur inn ella inn aftur á vøllin uttan loyvi dómarans
- sýnir óhøviskan atburð
- kemur inn í øki dómarans til endurskoðan (RRA)
- ógvisliga vísir „endurskoðanartekn“ (Sjónvarpsskíggi)

Tá ið tvey ymisk brot, sum skulu sektast við ávaring, verða framd (hóast tey eru í nánd av hvørjum øðrum), skal hetta hava tvær ávaringar við sær. T.d. um ein leikari kemur inn á vøllin uttan loyvi dómarans og fremur eina hasarderaða takkling ella steðgar einum lovandi álopi við einum frísparki/spæla bóltin við hondini o.s.fr.

Ávaringar fyri at sýna óhøviskan atburð

Tað eru ymiskar umstøður, sum føra við sær, at ein leikari skal ávarast fyri at sýna óhøviskan atburð, millum annað tá ið leikari:

- roynir at lumpa dómaran við at spæla skaddur ella við at spæla sjónleik (film)
- skiftir um pláss við málmannin, meðan leikur fer fram ella uttan at boða dómaranum frá. (Sí § 3)
- fremur eitt brot á ein hasarderaðan hátt, ið verður sektað við beinleiðis frísparki.

- ger eitt fríspark við at spæla bóltin við hondini fyri at steðga einum lovandi álopi. Undantikið, tá dómarin dømir brotsspark fyri eitt hondbóltsbrot, sum ikki er tilvitað
- frátekur mótstøðuliðnum eitt mál ella ein upplagdan málmøguleika, og dómarin dømir brotsspark fyri eitt hondbóltsbrot, sum ikki er tilvitað.
- fremur eitthvørt annað brot, sum steðgar einum lovandi álopi, um brotið ikki er eitt brotsspark, sum stendst av eini roynd at spæla ella stríðast um bóltin
- tekur ein upplagdan málmøguleika frá einum mótleikara við at gera eitt brotsspark í eini roynd at spæla ella stríðast um bóltin
- roynir at skora eitt mál við at spæla bóltin við hondini (sama um royndin eydnast ella ikki), ella um hann fremur eina miseydnaða roynd at forða einum máli við at spæla bóltin við hondini
- ger merki á vøllin, sum ikki eru loyvd
- spælir bóltin, meðan hann er á veg út av vøllinum eftir at hava fingið loyvi dómarans at fara av vøllinum
- sýnir vantandi virðing ímóti leikinum
- tilvitað nýtir snildir til at spæla bóltin aftur til egnan málmann (íroknað eftir fríspark og málspark) við høvdinum, bringuni, knænum o.s.fr., fyri at víkja uttan um andan í lógini – sama um málmaðurin nertur bóltin við hondini ella ikki. Málmaðurin skal sektast, um hann tekur stig til gerðina
- munnliga órógvar ein leikara undir leiki, ella meðan leikur verður tikin uppaftur

At frøast um eitt mál

Tað er loyvt leikarum at frøast um eitt mál, sum er skorað, men fagnaðurin má ikki vera ov ógvisligur. Fagnaður, ið fer fram við máta, er loyvdur, men fagnaður, ið er vandur, verður ikki viðmæltur, tá ið hann førir tíðarspillu við sær, og dómarar eiga at fyribyrgja hesum.

At fara av vøllinum fyri at frøast um eitt mál skal ikki verða sektað við ávaring, men leikararnir eiga at koma inn aftur á vøllin skjótast gjørligt.

Ein leikari skal ávarast, hóast málið verður kolldømt, um hann:

- klívur upp í eitt hegn og/ella nærkast áskoðarunum á ein hátt, ið kann seta trygdina í vanda fyri at frøast um eitt mál, ið er skorað
- sýnir atburð, sum er ágangandi, láturligur ella øsandi
- fjalir høvdið ella andlitið við einum skorti ella líknandi luti
- letur seg úr blusuni ella fjalir høvdið við blusuni

At seinka uppafturtøku av leiki

Dómarar skulu ávara leikarar, sum seinka uppafturtøku av leiki, t.d. við at:

- látast at taka eitt innkast, men knappliga lata ein av liðfeløgum sínum taka tað
- drála við at fara spakuliga av vøllinum í samband við útskifting
- seinka eini uppafturtøku av leiki ógvisliga
- sparka bóltin burtur, bera hann burtur við hondunum ella við at íbirta eina klandursstøðu við tilvitað at nerta bóltin, eftir at dómarin hevur steðgað leiki
- taka eitt fríspark á skeivum stað fyri at noyða dómaran biðja hann taka tað umaftur

Brot, ið verða sektað við útvísing

Ein leikari, eykaleikari ella útskiftur leikari skal verða vístur út, um hann ger seg sekan í onkrum av fylgjandi brotum:

- Tekur eitt mál ella ein upplagdan málmøguleika frá mótstøðuliðnum við tilvitað at fremja eitt „hondbóltsbrot“ (undantikið málmaðurin í egnum brotssparksteigi)
- Frátekur mótstøðuliðnum eitt mál ella ein upplagdan málmøguleika við at fremja eitt hondbóltsbrot, sum ikki er tilvitað, uttan fyri egnan brotssparksteig
- Tekur ein upplagdan málmøguleika frá einum mótleikara, hvørs rørsla ber brá av at vilja ímóti málinum hjá tí, sum fremur brotið, við at fremja eitt brot, sum skal verða sektað við frísparki ella brotssparki (um talan ikki er um tað, sum er nevnt niðanfyri)
- Er sekur í leiki, sum í álvarsligan mun ikki er loyvdur.
- Bítur ella spýtir eftir onkrum
- Er sekur í harðskapsatburði
- Nýtir niðrandi ella háðandi málburð og/ella gerðir
- Fær sína seinnu ávaring í sama dysti.
- Fer inn í videorúmið (VR)

Ein leikari, eykaleikari ella útskiftur leikari, sum er vorðin útvístur, skal fara burtur frá vallarumhvørvinum og tí tekniska økinum.

At forða einum máli ella uppløgdum málmøguleika

Um ein leikari fremur eitt brot ímóti einum mótleikara í egnum brotssparksteigi, og hann frátekur mótleikaranum ein upplagdan málmøguleika, og dómarin dømir brotsspark, skal leikarin ávarast, um brotið varð framt í eini roynd at spæla ella stríðast um bóltin. Í øllum øðrum førum (t.d. at halda, toga, fíra, uttan møguleika at spæla bóltin o.s.fr) skal leikarin vísast av vølli.

Um ein leikari frátekur mótstøðuliðnum eitt mál ella ein upplagdan

mál møgu leika við at fremja eitt tilvitað „hondbólts-brot“, skal hann útvísast – óansæð, hvar á vøllinum brotið varð framt. (Undantikið málmaðurin í egnum brots sparks teigi)

Um ein leikari frátekur mótstøðuliðnum eitt mál ella ein upplagdan málmøguleika við at fremja eitt hondbóltsbrot, sum ikki er tilvitað, og dómarin dømir brotsspark, skal leikarin, sum framdi brotið, ávarast.

Ein leikari, útvístur leikari, eykaleikari ella útskiftur leikari, sum kemur inn á vøllin uttan loyvir dómarans og leggur upp í leik ella órógvar ein mótleikara og á henda hátt tekur eitt mál ella ein upplagdan málmøguleika frá mót støðu lið num, er sekur í at hava framt eitt brot, sum skal sektast við útvísing.

Fylgjandi skal havast í huga:

- Fjarstøðan millum brotið og málið
- Hvønn veg leikur gekk
- Sannlíkindi fyri at varðveita ella fáa tamarhald á bóltinum
- Støðan hjá verjuleikarum og hvussu nógvir teir eru

Leikur, sum í álvarsligan mun ikki er loyvdur

Ein takkling ella ein avbjóðing, sum setur trygdina hjá einum mótleikara í vanda ella verður gjørd við nýtslu av ógvisligari megi ella brutaliteti skal sektast sum leikur, sum í álvarsligan mun ikki er loyvdur.

Ein og hvør leikari, sum tveitir seg eftir einum mótleikara við at nýta annað ella bæði beinini, meðan hann stríðist um bóltin, og ger hetta við ógvisligari megi ella setur trygd mótleikarans til viks, er sekur í leiki, sum í álvarsligan mun ikki er loyvdur. Tað ger tað sama, um hetta verður gjørt aftanífrá, frammanífrá ella frá síðuni.

Harðskapsatburður

Talan er um harðskapsatburð, tá ið ein leikari nýtir ella roynir at nýta ógvisliga megi ella brutalitet, ímóti einum mótleikara, viðleikara, dystarleiðara, áskoðara ella nøkrum øðrum persóni uttan at royna at spæla bóltin. Tað ger tað sama, um tað eydnaðist at skapa fysiskt samband ella ikki.

Aftur at hesum er ein leikari sekur í harðskapsatburði, um hann – uttan at royna at spæla bóltin – tilvitað slær ein mótleikara ella onkran annan persón í and litið ella høvdið við at nýta hond ella arm, um ikki megin, ið varð nýtt, er uttan týdning.

Hjálparfólk

Tá ið eitt brot verður framt av onkrum í tekniska økinum (eykaleikara, út skiftum leikara, útvístum leikara ella hjálparfólki), og tann, sum framdi brotið, ikki kann eyðmerkjast, skal venjarin við evstu ábyrgd í tekniska økinum hava aga revsingina.

Munnlig ávaring

Fylgjandi brot skulu vanliga sektast við eini munnligari ávaring; endurtakandi og ógvislig brot skulu sektast við eini ávaring ella eini útvísing:

- At koma inn á vøllin á ein virðiligan hátt, sum ikki er framfarandi/hóttandi
- Ikki at samstarva við ein dystarleiðara, t.d. ikki at fylgja boðum frá einum hjálpardómara ella 4. dómara
- Smærri ósemjur um eina avgerð (við orðum ella gerðum)
- Stundum fara úr tekniska økinum uttan at fremja onnur brot

Ávaring

Brot, ið skulu sektast við ávaring, eru m.a.:

- týðiliga/áhaldandi ikki at virða avmarkingina í tekniska økinum
- seinka uppafturtøku av leiki hjá sínum liði
- tilvitað at fara inn í tekniska økið hjá mótstøðuliðnum (á ein hátt, sum ikki er hóttandi)
- sýna ónøgd við orðum ella gerðum, íroknað:
- tveita/sparka drekkidunkar ella aðrar lutir
- gerðir, sum týðiliga vísa vantandi virðing fyri dystarleiðarum; t.d. at klappa háðandi
- at koma inn í øki dómarans til endurskoðan (RRA)
- ógvisliga/áhaldandi at gera handarbrá fyri at fáa dómaran at geva eitt gult ella reytt kort
- ógvisliga at gera „sjónvarpstekn“ fyri at fáa VAR at fremja eina endurskoðan
- gera handarbrá ella sýna atburð, sum er provokerandi ella øsandi
- áhaldandi at sýna atburð, sum ikki kann góðtakast (íroknað endurtakandi brot, sum føra munnliga ávaring við sær)
- sýnir vantandi virðing fyri spælinum

Útvísing

Brot, ið skulu sektast við útvísing, eru m.a.:

- seinka uppafturtøku av leiki hjá mótstøðuliðnum, t.d. við at halda bóltinum, sparka bóltin burtur, forða framgongdini hjá einum leikara
- tilvitað at fara úr tekniska økinum fyri at:
- sýna misnøgd við ella kjakast við ein dystarleiðara
- gera handarbrá ella sýna atburð, sum er provokerandi ella øsandi
- at fara inn í tekniska økið hjá mótstøðuliðnum á ein hátt, sum er framfarandi ella hóttandi
- tilvitað at kasta ella sparka ein lut inn á vøllin
- at fara inn á vøllin fyri at:
- kjakast við ein dystarleiðara (íroknað í hálvleikinum og við dystarlok)
- leggja upp í leik, órógva ein mótleikara ella ein dystarleiðara
- at koma inn í video-rúmið (VOR)
- fysiskur ella ágangandi atburður (íroknað at spýta og bíta) ímóti einum mótleikara, eykaleikara, hjálparfólki, dystarleiðara, áskoðara ella nøkrum. øðrum persóni (t.d. bóltdreingi/gentu ella kappingarumboðsfólk o.s.fr.)
- at fáa aðru ávaring í sama dysti
- at nýta niðrandi ella háðandi málburð og/ella gerðir
- at nýta elektroniska útgerð ella samskiftisútgerð, sum ikki er loyvd, ella at sýna rangan atburð orsakað av at hava nýtt elektroniska útgerð ella samskiftisútgerð
- harðskapsatburður

Brot, har ið ein lutur (ella bólturin) verður tveittur

Í øllum førum skal dómarin nýta hóskandi agarevsing:

- ávara leikaran fyri at sýna óhøviskan atburð, um brotið var hasarderað
- útvísa leikaranum fyri harðskapatburð, um brotið varð framt við nýtslu av ógvisligari megi

5. Uppafturtøka av leiki eftir fríspørk og ósømiligan atburð

Um bólturin ikki er í leiki, verður leikur tikin uppaftur sambært fyrru avgerðini. Um bólturin er í leiki, og ein leikari fremur eitt fysiskt brot inni á vøllinum ímóti:

- einum mótleikara – beinleiðis ella óbeinleiðis fríspark ella brotsspark
- einum viðleikara, eykaleikara, útskiftum ella útvístum leikara, dystarleiðara ella hjálparfólki – beinleiðis fríspark ella brotsspark

Øll munnlig brot skulu sektast við óbeinleiðis frísparki.

Um dómarin steðgar leiki fyri eitt brot, sum er framt av einum leikara uttan fyri vøllin ella á vøllinum ímóti einum óviðkomandi, skal leikur takast uppaftur við uppkasti, um óbeinleiðis fríspark ikki verður dømt fyri at fara av vøllinum uttan loyvi dómarans. Óbeinleiðis frísparkið skal takast á linjuni, har sum leikarin fór av vøllinum

Um bólturin er í spæli, og:

- ein leikari fremur eitt brot ímóti einum dystarleiðara ella mótleikara, eyka leikara, útskiftum ella útvístum leikara ella hjálparfólki uttan fyri vøllin, ella
- ein eykaleikari, útskiftur ella útvístur leikari ella eitt hjálparfólk fremur eitt brot ímóti ella órógvar ein mótleikara ella ein dystarleiðara uttan fyri vøllin

Skal leikur takast uppaftur við einum frísparki á linjuni, sum er nærmast har, sum brotið varð framt. Fyri brot, sum føra til beinleiðis fríspark, skal brotsspark dømast, um brotið varð framt inni í brotssparksteiginum hjá tí, sum framdi brotið.

Um eitt brot verður framt uttan fyri vøllin av einum leikara ímóti einum leikara, eyka leikara, útskiftum leikara ella hjálparfólki á egnum liði, verður leikur tikin upp aftur við óbeinleiðis frísparki á linjuni nærmast við har, sum brotið varð framt.

Um ein leikari fær samband við bóltin við einum luti (gaggu, skinnara o.s.fr.), sum er hildin í hondini, skal leikur takast uppaftur við beinleiðis frísparki (ella brots sparki).

Um ein leikari, sum er á vøllinum ella uttan fyri vøllin kastar ella sparkar ein lut (annað enn dystarbóltin) eftir einum mótleikara, ella hann kastar ella sparkar ein lut (íroknað dystarbóltin) eftir einum eykaleikara, útskiftum leikara, útvístum leikara ella hjálparfólki hjá mótstøðuliðnum, eftir einum dystarleiðara ella dystarbóltinum, skal leikur takast uppaftur við beinleiðis frísparki á tí stað, har luturin rakti ella hevði rakt persónin ella bóltin.

Um hetta stað er uttan fyri vøllin, skal frísparkið takast á vallarlinjuni, sum er nærmast har, sum brotið varð framt; eitt brotsspark skal dømast, um brotið varð framt inni í brotssparksteiginum hjá tí, sum framdi brotið.

Um ein eykaleikari, útskiftur ella útvístur leikari, ein leikari, sum fyribils er farin av vøllinum, ella eitt hjálparfólk kastar ella sparkar ein lut inn á vøllin, og hetta órógvar leik, ein mótleikara ella ein dystarleiðara, skal leikur takast upp aftur við beinleiðis frísparki (ella brotssparki) har, sum luturin órógvaði leik ella har, sum luturin rakti ella hevði rakt mótleikaran, dystarleiðaran ella bóltin.

§ 13

Frískørk

1. Sløg av frískørkum

Beinleiðis ella óbeinleiðis frískørk verða dømd til mótstøðuliðið hjá einum leikara, eykaleikara, útskiftum leikara, útvístum leikara ella hjálparfólki, sum brýtur Fótbóltslógina.

Tekn – óbeinleiðis frískørk

Dómarin vísir, at eitt frískørk er óbeinleiðis við at strekkja armin uppeftir. Henda støða skal haldast, inntil frísparki er tikið, og bólturin er nortin av einum øðrum leikara, ella hann er farin úr leiki; ella inntil tað er greitt, at tað ikki letur seg gera at skora eitt mál beinleiðis upp á frísparkið.

Óbeinleiðis frískørk skal takast umaftur, um dómarin ikki strekkir armin uppeftir, og bólturin verður sparkaður beinleiðis í málið.

Bóltur fer í málið

- um beinleiðis frískørk verður sparkað í mótleikaranna mál, skal mál dømast
- um óbeinleiðis frískørk verður sparkað í mótleikaranna mál, skal málspark dømast
- um beinleiðis ella óbeinleiðis frískørk verður sparkað í egið mál, skal hornaspark dømast.

2. Mannagongd

Øll frískørk skulu takast á tí stað, har brotið varð framt, uttan:

- óbeinleiðis frískørk til áleypandi liðið fyri eitt brot, sum varð framt inni í málteigi mótleikaranna; frísparkið skal takast frá linjuni á málteiginum, sum er javnfjar við mállinjuna, so nær við staðið, har brotið varð framt, sum gjørligt

- fríspørk til verjandi liðið í egnum málteigi; hesi kunnu takast allastaðni inni í málteiginum
- fríspørk fyri brot, sum snúgva seg um leikara, sum fer inn, inn aftur ella av vøllinum uttan loyvi; hesi fríspørk skulu takast har, sum bólturin var, tá ið leikur varð steðgaður. Tó skal fríspark dømast á linjuni, sum er nærmast har, sum brotið varð framt, um ein leikari fremur eitt brot uttan fyri vøllin. Um brotið skal sektast við beinleiðis frísparki, og tað verður framt inni í brotssparksteiginum hjá leikaranum, sum fremur brotið, skal brotsspark dømast.
- Fótbóltslógin krevur, at frísparkið skal takast á øðrum stað (Sí § 3, 11, 12)

Bólturin:

- skal liggja stillur, og tann, sum sparkar, hevur ikki loyvi at nerta bóltin aftur, fyrr enn hann er nortin av øðrum leikara
- er í leiki, tá ið hann er sparkaður, og týðiliga flytur seg.

Inntil bólturin er í spæli, skulu allir mótleikarar vera:

- í minsta lagi 9,15 m frá bóltinum, um teir ikki standa á egnari mállinju millum málstengurnar
- uttan fyri brotssparksteigin, tá ið verjandi liðið hevur fríspark í egnum brotssparksteigi

Um tríggir ella fleiri verjandi leikarar eru í „múrinum“, skulu allir áleypandi leikarar vera í minsta lagi 1 m frá „múrinum“, inntil bólturin er í leiki.

Eitt fríspark kann takast við at lyfta bóltin við einum ella báðum fótum í senn.

At finta fyri at ørkymla mótleikararnar er loyvt, og er ein partur av fótbólti.

Um ein leikari, sum tekur eitt fríspark á rættan hátt, tilvitað sparkar bóltin á ein mót leikara, og hetta ikki verður gjørt á ein hátt, sum er fyrilitsleysur, hasarderaður ella við ógvisligari megi, skal dómarin lata leik halda áfram.

3. Brot og revsingar

Um ein mótleikari er nærri bóltinum enn 9,15 m, tá ið eitt fríspark verður tikið, skal frísparkið takast umaftur, um fyrimunarreglan ikki kann nýtast; men um ein leikari tekur eitt fríspark skjótt, og ein mótleikari, sum er nærri bóltinum enn 9,15 m, fær fatur á bóltinum, skal dómarin lata leik halda áfram. Tó skal ein leikari ávarast fyri at seinka uppafturtøku av leiki, um hann tilvitað forðar einum frísparki í at verða tikið skjótt.

Um verjandi liðið hevur sett ein „múr“, sum hevur tríggir ella fleiri verjandi leikarar í, og ein áleypandi leikari er nærri „múrinum“ enn 1 m, tá ið frísparkið verður tikið, skal óbeinleiðis fríspark dømast.

Um tað verjandi liðið velur at taka eitt fríspark inni í brotssparksteiginum skjótt, og ein ella fleiri mótleikarar eru inni í brotssparksteiginum, tí teir ikki hava fingið tíð at fara úr brotssparksteiginum, skal dómarin lata leik halda fram. Um ein mótleikari, sum er staddur inni í brotssparksteiginum, tá ið

frí sparkið verður tikið, ella um hann kemur inn í brotssparksteigin, áðrenn bólt urin er í leiki, og hesin leikarin nertur ella stríðist um bóltin, áðrenn hann er í leiki, skal frísparkið takast umaftur.

Tá ið bólturin er í spæli, og tann, sum tók frísparkið, nertur bóltin aftur, áðrenn hann er nortin av øðrum leikara, skal óbeinleiðis fríspark dømast, men um tann, sum tók frísparkið, fremur eitt „hondbóltsbrot“:

- skal beinleiðis fríspark dømast
- skal brotsspark dømast, um brotið varð framt í egnum brotssparksteigi, um tann, sum tók frísparkið, ikki er málmaður. Um málmaðurin fremur brotið, skal óbeinleiðis fríspark dømast.

§ 14

Brotssparkið

Brotsspark skal dømast, um ein leikari ger seg sekan í einum broti, sum skal sektast við beinleiðis frísparki, og brotið varð framt í egnum brotssparksteigi ella uttan fyri vøllin, sum víst verður á í § 12 og § 13.

Tað er loyvt at skora beinleiðis upp á eitt brotsspark.

1. Mannagongd

Bólturin skal liggja stillur, og ein partur av honum skal nerta ella vera árakað miðjuni á brotssparksblettinum. Málstengurnar, tvørstongin og málnetið skulu ikki flyta seg.

Leikarin, sum skjýtur brotssparkið, skal týðiliga verða eyðmerktur.

Verjandi málmaðurin skal vera á mállinjuni, venda ímóti tí, sum sparkar, og standa ímillum stengurnar, inntil bólturin er sparkaður. Málmaðurin skal ikki órógva skjúttan á órættvísan hátt, t.d. við at seinka brotsparkinum í at verða tikið ella við at nerta stengur, yvirliggjara ella málnet.

Allir leikarar, uttan tann, sum skjýtur og málmaðurin, skulu:

- vera í minsta lagi 9,15 m frá brotssparksblettinum
- vera aftanfyri brotssparksblettin
- vera inni á vøllinum
- vera uttan fyri brotssparksteigin

Eftir at leikararnir hava tikið støðu sambært hesi grein, skal dómarin gera tekn um, at brotssparkið skal verða tikið.

Leikarin, sum tekur brotssparkið, skal sparka bóltin frameftir; tað er loyvt at nýta hælin, treytað av at bólturin flytur seg frameftir.

Tá ið bólturin verður sparkaður, skal málmaðurin hava í minsta lagi ein part av øðrum fótinum á mállinjuni, á linju við ella aftanfyri mállinjuna.

Bólturin er í leiki, tá ið hann er sparkaður og týðiliga flytur seg.

Tann, sum sparkar, hevur ikki loyvi at nerta bóltin aftur, fyrr enn bólturin hevur nortið ein annan leikara.

Brotssparkið er avgreitt, tá ið bólturin ikki flytur seg meira, fer úr leiki, ella tá ið dómarin steðgar leiki fyri okkurt brot á Fótbóltslógina.

Tíð verður løgd afturat báðum hálvleikum í dystinum og longdari leiktíð, soleiðis at eitt brotsspark kann avgreiðast. Tá ið tíð verður løgd afturat fyri at taka eitt brotsspark, er brotssparkið mett sum yvirstaðið, tá (eftir at sparkið er tikið) bólturin ikki flytur seg meira, fer úr leiki, verður spældur av nøkrum øðrum leikara enn verjandi málmanninum (íroknað sparkaran), ella tá ið dómarin steðgar leiki fyri eitt brot, sum er framt av sparkaranum ella hansara liði. Um ein leikari frá verjandi liðnum (íroknað málmannin) fremur eitt brot, og brotssparkið verður brent/bjargað, skal brotssparkið takast umaftur.

2. Brot og revsingar

Brotssparkið skal takast, tá ið dómarin gevur tekn um tað. Verður tað ikki tikið, kann dómarin geva eina agarevsing, áðrenn hann aftur gevur tekn um, at brotssparkið skal takast.

Um okkurt av fylgjandi hendir, áðrenn bólturin er í spæli:

- Ein liðfelagi hjá tí, sum tekur brotssparkið, skal bert sektast fyri at koma ov tíðliga inn í brotssparksteigin, um:
  - gerðin týðiliga ávirkaði málmannin, ella
  - leikarin, sum framdi brotið, spælir bóltin ella stríðist við ein mótleikara um bóltin og síðani skorar, roynir at skora ella skapar ein málmøguleika
- Ein liðfelagi hjá málmanninum skal bert sektast fyri at koma ov tíðliga inn í brotssparksteigin, um:
  - gerðin týðiliga ávirkaði skjúttan, ella
  - leikarin, sum framdi brotið, spælir bóltin ella stríðist við ein mótleikara um bóltin og hetta forðar mótleikaranum í at skora, royna at skora ella at skapa ein málmøguleika
- Leikarin, sum tekur brotssparkið ella ein liðfelagi hjá honum brýtur Fótbóltslógina:
  - um bólturin fer í mál, skal brotssparkið takast umaftur
  - um bólturin ikki fer í mál, skal dómarin steðga leiki og byrja aftur við óbeinleiðis frísparki

  Undantikið fylgjandi brot. Tá skal leikur takast uppaftur við óbeinleiðis frísparki – sama um eitt mál verður skorað ella ikki:
  - eitt brotsspark verður sparkað aftureftir
  - ein viðleikari hjá tí, sum skuldi sparka, sparkar; dómarin skal ávara hann, sum sparkaði
  - at látast at sparka bóltin (finta), tá ið hann hevur runnið til bóltin (at finta, meðan runnið verður til bóltin er loyvt); dómarin skal ávara tann, sum sparkaði
- Málmaðurin fremur eitt brot:
  - um bólturin fer í mál, skal mál dømast
  - um bólturin ikki rakar málið ella støkkur aftur frá eini málstong ella tvørstongini, skal brotssparkið bert takast umaftur, um brotið, sum málmaðurin framdi, týðiliga ávirkaði skjúttan
  - um bólturin ikki fer í málið orsakað av málmanninum, skal brotssparkið takast umaftur

  Um brotið, sum málmaðurin framdi, hevur við sær, at brotssparkið skal takast umaftur, skal málmaðurin hava eina munnliga ávaring fyri fyrsta brotið í dystinum, og hann skal ávarast (GK) fyri øll fylgjandi brot í dystinum.
- Ein liðfelagi hjá málmanninum brýtur Fótbóltslógina:
  - um bólturin fer í mál, verður mál dømt
  - um bólturin ikki fer í málið, skal brotssparkið takast umaftur

- Um ein leikari frá hvørjum liði fremur brot, skal brotssparkið takast umaftur, um annar leikari ikki fremur álvarsamari brot (t.d. finta, ið ikki er loyvd)
- Um bæði málmaðurin og skjúttin fremja brot samstundis, skal skjúttin ávarast, og leikur verður tikin uppaftur við óbeinleiðis frísparki til verjandi liðið

Um, eftir at brotssparkið er tikið:

- Tann, sum sparkaði, nertur bóltin aftur, áðrenn hann er nortin av øðrum leikara:
  - verður óbeinleiðis fríspark dømt (ella beinleiðis fríspark fyri eitt „hondbóltsbrot“)
- Bólturin verður nortin av onkrum óviðkomandi, meðan hann flytur seg frameftir:
  - skal brotssparkið takast umaftur, um bólturin ikki fer í málið, og órógvið ikki forðaði málmanninum ella einum verjandi leikara í at spæla bóltin. Tá skal mál dømast, um bólturin fer í málið (sjálvt um samband var við bóltin), tó ikki, um órógvið stóðst av áleypandi liðnum
- Bólturin støkkur inn á vøllin frá málmanninum, tvørstongini ella málstongunum og síðani verður nortin av onkrum óviðkomandi:
  - steðgar dómarin leiki
  - leikur verður tikin uppaftur við uppkasti, har sum bólturin varð nortin av tí óviðkomandi

3. Yvirlit

	Úrslit av brotssparkinum	
	MÁL	**IKKI** MÁL
Brot framt av áleypandi leikara	Ávirkan: brotssparkið skal takast umaftur. Onga ávirkan: mál	Ávirkan: óbenleiðis fríspark. Onga ávirkan: ikki umaftur
Brot framt av verjandi leikara	Ávirkan: mál Onga ávirkan: mál	Ávirkan: brotssparkið skal takast umaftur. Onga ávirkan: ikki umaftur
Brot framt av verjandi og áleypandi leikara	Ávirkan: brotssparkið skal takast umaftur. Onga ávirkan: mál	Ávirkan: brotssparkið skal takast umaftur. Onga ávirkan: ikki umaftur
Brot framt av málverjanum	Mál	Ikki bjargað: brotssparkið skal takast umaftur (uttan tá skjúttin týðiliga ávirkast) Bjargað: Brotssparkið skal takast umaftur, og málverjin skal hava munnliga ávaring – (GK) fyri fylgjandi brot
Málverjin og skjúttin fremja brot samstundis	Óbeinleiðis fríspark og skjúttin skal ávarast	Óbeinleiðis fríspark og skjúttin skal ávarast
Bólturin sparkaður aftureftir	Óbeinleiðis fríspark	Óbeinleiðis fríspark
Finta, ið ikki er loyvd	Óbeinleiðis fríspark og skjúttin skal ávarast	Óbeinleiðis fríspark og skjúttin skal ávarast
Skeivur leikari sparkar	Óbeinleiðis fríspark og skjúttin skal ávarast	Óbeinleiðis fríspark og skjúttin skal ávarast

§ 15

Innkastið

Innkast verður dømt til mótleikararnar hjá tí leikaranum, sum seinast nart bóltin, tá ið hann fór um síðulinjuna, allur sum hann er, antin í luftini ella eftir jørð.

Ikki er loyvt at skora mál beinleiðis upp á innkast:

- um bólturin fer í mótleikaranna mál – verður málspark dømt
- um bólturin fer í egið mál – verður hornaspark dømt

1. Mannagongd

Tá ið kastað verður, skal kastarin:

- standa og venda inn móti vøllinum
- hava ein part av hvørjum fóti annaðhvørt á síðulinjuni ella á undirlagnum uttan fyri síðulinjuna
- kasta bóltin við báðum hondum aftaníframá og upp um høvdið frá tí stað, hann fór av vøllinum

Allir mótleikarar skulu vera í minsta lagi 2 metrar frá staðnum á síðulinjuni, har innkastið skal takast.

Bólturin er í leiki, tá ið hann kemur inn á vøllin. Um bólturin nertur undirlagið, áðrenn hann kemur inn á vøllin, skal innkastið takast um aftur av sama liði á sama staði. Um innkastið ikki verður tikið á rættan hátt, skal tað takast um aftur av hinum liðnum.

Um ein leikari, sum tekur eitt innkast á rættan hátt, tilvitað kastar bóltin á ein mótleikara fyri at kunna spæla bóltin aftur, men ikki ger hetta á ein hátt, ið er fyrilitsleysur, hasarderaður ella við at nýta ógvisliga megi, skal dómarin loyva leiki at halda fram.

Kastarin hevur ikki loyvi at nerta bóltin aftur, fyrr enn hann er nortin av øðrum leikara.

2. Brot og revsingar

Tá ið bólturin er í spæli, og tann, sum tók innkastið, nertur bóltin aftur, áðrenn hann er nortin av øðrum leikara, skal óbeinleiðis fríspark dømast, men um tann, sum tók innkastið fremur eitt „hondbóltsbrot“:

- skal beinleiðis fríspark dømast
- skal brotsspark dømast, um brotið varð framt í egnum brotssparksteigi. Um tað er ein málmaður í egnum brotssparksteigi, skal óbeinleiðis fríspark dømast

Um ein mótleikari á óhøviskan hátt órógvar ella forðar kastaranum (íroknað at flyta seg nærri enn 2 metrar frá tí stað, innkastið verður tikið frá), skal hann ávarast fyri at sýna óhøviskan atburð, og óbeinleiðis fríspark skal dømast, um innkastið er tikið.

Fyri øll onnur brot á hesa grein, skal innkastið takast umaftur av einum mótleikara.

§ 16

Málsparkið

Málspark verður dømt, tá ið allur bólturin fer um mállinjuna eftir jørð ella í luftini, uttan at eitt mál er skorað sambært § 10, eftir at hann seinast er nortin av einum leikara úr tí áleypandi liðnum. (Sí eisini grein 8, 10, 13 og 15).

Tað er loyvt at skora mál beinleiðis upp á málspark, men bert ímóti mótstøðuliðnum; um bólturin fer beinleiðis í málið hjá tí, sum sparkar, skal hornaspark dømast.

1. **Mannagongd**
   - Bólturin skal liggja stillur í málteiginum og skal sparkast av einum leikara frá verjandi liðnum
   - Bólturin er í leiki, tá ið hann er sparkaður og týðiliga flytur seg
   - Mótleikararnir skulu vera uttan fyri brotssparksteigin, inntil bólturin er í leiki
2. **Brot og revsingar**
   Tá ið bólturin er í spæli, og tann, sum tók málsparkið, nertur bóltin aftur, áðrenn hann er nortin av øðrum leikara, skal óbeinleiðis fríspark dømast, men um tann, sum tók málsparkið, fremur eitt „hondbóltsbrot“:
   - skal beinleiðis fríspark dømast
   - skal brotsspark dømast, um brotið varð framt í egnum brotssparksteigi. Um tað er ein málmaður í egnum brotssparksteigi, skal óbeinleiðis fríspark dømast

   Um nakrir mótleikarar eru inni í brotssparksteiginum, tá ið málspark verður tikið, orsakað av at teir ikki hava fingið stundir at koma út, skal dómarin lata leik halda áfram.

Málsparkið skal takast av nýggjum, um ein mótleikari, sum er í brotssparks-teiginum, tá ið málspark verður tikið, ella kemur inn í brots sparks teigin, áðrenn bólturin er í leiki, nertur ella stríðist um bóltin, áðrenn hann er í leiki.

Um ein leikari fer inn í brotssparksteigin, áðrenn bólturin er í spæli, og brot verður framt av ella ímóti honum, skal málsparkið takast umaftur, og leikarin, sum framdi brotið, kann ávarast ella útvísast, alt eftir, hvussu grovt brotið var.

Fyri øll onnur brot á hesa grein, skal málsparkið takast umaftur.

§ 17

Hornasparkið

Hornaspark verður dømt, tá ið allur bólturin fer um mállinjuna eftir jørð ella í luftini, uttan at eitt mál er skorað, eftir at hann seinast er nortin av einum leikara úr tí verjandi liðnum.

Tað er loyvt at skora mál beinleiðis upp á hornaspark, men bert ímóti mótstøðuliðnum; um bólturin fer beinleiðis í málið hjá tí, sum sparkar, skal hornaspark dømast til mótstøðuliðið. (Sí eisini grein 8, 12, 13, 15 og 16).

1. Mannagongd

- Bólturin verður lagdur innan fyri hornaøkið við nærmasta hornaflagg har hann fór av vølinum, ella har málmaðurin framdi brot
- Bólturin skal liggja stillur og skal sparkast av einum leikara frá áleypandi liðnum
- Bólturin er í leiki, tá ið hann er sparkaður og týðiliga flytur seg; honum nýtist ikki at fara úr hornaøkinum
- Hornaflaggið má ikki flytast
- Mótleikararnir skulu vera í minsta lagi 9,15 metrar frá hornaboganum, inntil bólturin er í leiki

2. Brot og revsingar

Tá ið bólturin er í spæli, og tann, sum tók hornasparkið, nertur bóltin aftur, áðrenn hann er nortin av øðrum leikara, skal óbeinleiðis fríspark dømast, men um tann, sum tók hornasparkið, fremur eitt „hondbóltsbrot“:

- skal beinleiðis fríspark dømast
- skal brotsspark dømast, um brotið varð framt í egnum brotssparksteigi, um tað er ein málmaður í egnum brotssparksteigi, skal óbeinleiðis fríspark dømast

Um ein leikari, sum tekur eitt hornaspark á rættan hátt, tilvitað sparkar bóltin á ein mótleikara fyri at kunna spæla bóltin aftur, men ikki ger hetta á ein hátt, ið er fyrilitsleysur, hasarderaður ella við at nýta ógvisliga megi, skal dómarin loyva leiki at halda fram.

Fyri øll onnur brot á hesa grein skal hornasparkið takast umaftur.

VAR Handbók

Meginreglur, umstøður og mannagongdir

Mannagongdin viðvíkjandi VAR er í samsvari við meginreglurnar og hugsanina í Fótbóltslógini.

Nýtslan av videohjálpardómarum (VAR) er bert loyvd, har sum dystar-/kappingarfyriskiparin hevur lokið øll krøv viðvíkjandi VAR, sum eru lýst í Implementation Assistance and Approval Programme (IAAP), og hevur fingið skrivligt loyvi frá The IFAB og FIFA.

1. **Meginreglur**
   Nýtslan av VAR í fótbólti er knýtt at nøkrum meginreglum, har allar eru galdandi í øllum dystum, har sum VAR verður nýtt.

   1. Ein videohjálpardómari (VAR) er ein dystarleiðari, sum hevur óhefta atgongd til sjónvarpsupptøkur frá dystinum, sum kunnu hjálpa dómaranum, tá ið talan er um „týðiligt og eyðsýnt mistak“ ella „álvarsama mista støðu“ í samband við:

      a. **Mál/ikki mál**
      b. **Brotsspark/ikki brotsspark**
      c. **Beinleiðis reytt kort** (ikki seinnu ávaring)
      d. **Skeivan samleika** (Tá ið dómarin ávarar ella útvísir skeivum leikara frá liðnum, sum framdi brotið)

   2. Dómarin skal altíð taka eina avgerð, t.e. dómarin hevur ikki loyvi til „onki“ at døma og so nýta VAR til at taka eina avgerð. Ein avgerð um at lata leik halda fram eftir eitt møguligt brot kann endurskoðast.
   3. Upprunaliga avgerð dómarans verður ikki broytt, um upptøkurnar ikki týðiliga vísa, at talan er um eitt „týðiligt og eyðsýnt mistak.

4. Einans dómarin kann taka stig til eina „endurskoðan“. VAR (og hinir dystarleiðararnir) kunnu bert viðmæla dómaranum eina endurskoðan.
5. Endaliga avgerðin verður altíð tikin av dómaranum – antin grundað á upplýsingar frá VAR, ella eftir at dómarin hevur framt „endurskoðan á vøllinum“ (EÁV).
6. Onki tíðarmark er fyri endurskoðanarmannagongdina, tí neyvleiki hevur størri týdning enn at skunda sær
7. Leikarar og hjálparfólk skulu ikki umringa dómaran fyri at ávirka hann til at endurskoða og skulu heldur ikki ávirka hann undir endurskoðanini. Ikki er loyvt at ávirka dómaran, tá ið avgerð verður tikin
8. Dómarin skal vera sjónligur undir endurskoðanini fyri at tryggja gjøgnumskygni.
9. Um leikur heldur fram eftir eina støðu, sum seinni verður endurskoðað, verða ongar agarevsingar, sum verða givnar, eftir støðan fór fram, strikaðar – sjálvt um upprunaliga avgerðin verður broytt (undantikið ávaring/útvísing fyri SLÁ, at órógva í samband við lovandi álop ella FUM).
10. Um leikur er steðgaður og tikin uppaftur, kann dómarin ikki fremja eina endurskoðan, uttan so at talan er um støður, har talan er um skeivan samleika ella fyri eitt møguligt brot, sum skal sektast við útvísing fyri harðskapsatburð, spýta, bíta ella sera niðrandi, háðandi gerð(ir).
11. Tíðarbilið í spælinum fyri og eftir eina støðu, sum kann verða endurskoðað, verður avgjørt av Fótbóltslógini og VAR-mannagongdini
12. VAR „kannar“ allar støður/avgerðir, og tískil er ikki neyðugt hjá leikarum og venjarum at biðja um endurskoðan

2. Dystarbroytandi støður/avgerðir, sum kunnu endurskoðast

Tað eru fýra sløg av dystaravgerandi støðum/avgerðum, sum gera, at dómarin kann fáa hjálp frá VAR. Í øllum hesum støðum skal VAR bert nýtast, eftir at dómarin hevur tikið eina eina (fyrstu/uppruna) avgerð (íroknað at lata leik halda fram), ella um ein álvarsom støða verður „mist/ikki sædd“ av dystarleiðarunum.

Upprunaliga avgerð dómarans verður ikki broytt, um talan ikki er um eitt

„týðiligt og eyðsýnt mistak“ (íroknað avgerðir, sum dómarin tekur grundað á upplýsingar frá hinum dystarleiðarunum, t.d. rangstøða).

Støður/avgerðir, sum kunnu endurskoðast, um talan er um eitt „týðiligt og eyðsýnt mistak“ ella „eina álvarsama mista“ støðu, verða bólkaðar soleiðis:

a. Mál/ikki mál

- Brot framt av áleypandi liðnum í uppspælinum til, at mál verður skotið, ella tá ið málið verður skotið (spæla bóltin við hondini, fríspark, rangstøða o.s.fr.)
- Bóltur úr leiki, áðrenn málið varð skorað
- Avgerðir um mál/ikki mál
- Brot framd av málmanni og/ella sparkara, tá ið brotsspark verður tikið, ella um ein verjuleikari ella áleypari kemur ov tíðliga inn í brotssparksteigin og leggur upp í leik, tá ið bólturin støkkur aftur frá eini stong, tvørstongini ella málmanni

b. Brotsspark/ikki brotsspark

- Áleypandi liðið fremur eitt brot í uppspælinum til brotssparkið (t.d. „hondbóltsbrot“, fríspark, rangstøða o.s.fr.)
- Bóltur úr leiki, áðrenn støðan kom í
- Staðið, har brotið verður framt (innan fyri ella uttan fyri brotssparksteigin)
- Skeivt dømt brotsspark
- Brotssparksbrot, sum ikki verður dømt

c. Beinleiðis reyð kort (ikki seinna gula kortið/ávaring)

- FUM (Serliga staðið, har brotið verður framt og støðan hjá hinum leikarunum)
- Leikur, sum í álvarsligan mun ikki er loyvdur (ella hasarderað takkling)
- Harðskapsatburður, bíta ella spýta eftir einum øðrum persóni
- At nýta niðrandi ella háðandi gerð(ir)

d. Skeivur samleiki (reytt ella gult kort)

- Um dómarin sektar eitt brot og síðani gevur skeivum leikara frá liðnum, sum framdi brotið, gult ella reytt kort, kann samleiki leikarans endurskoðast; sjálvt brotið kann ikki endurskoðast, uttan so at tað førdi til eitt brotsspark, mál ella eitt beinleiðis reytt kort.

3. VAR í verki

Undir einum dysti verður VAR nýtt soleiðis:

- VAR hyggur at dystinum í videorúminum (VR) og verður hjálptur av einum ella fleiri hjálpar-VAR (H-VAR)
- Treytað av, hvussu nógv sjónarhorn sjónvarpsupptøkurnar vísa (og øðrum atlitum), kunnu vera fleiri H-VAR og ein ella fleiri endurspælitøkningar (ET)
- Bert persónar við heimild kunnu koma inn í VR ella samskifta við VAR/H- VAR/ET undir dystinum
- VAR hevur óhefta atgongd til sjónvarpsupptøkur og ger hann sjálvur av, nær ella um hann spælir støður umaftur
- VAR er bundin í samskiftisskipanina, sum dystarleiðararnir nýta, og hann hoyrir alt, sum teir siga; VAR kann bert tosa við dómaran við at trýsta á ein knøtt (fyri at umganga, at dómarin órógvast av samrøðum í VR)
- Um VAR er upptikin við at „kanna“ ella „endurskoða“, kann H-VAR tosa við dómaran – serliga um tað er týdningarmikið, at leikur verður steðgaður ella ikki verður tikin uppaftur
- Um dómarin ger av at endurskoða støðuna, velur VAR bestu sjónarhornini/ferðina á avspælingini; dómarin kann biðja um aðrar ella fleiri sjónarhorn/ferðir

4. Mannagongdir

Upprunalig avgerð

- Dómarin og hinir dystarleiðararnir skulu altíð taka eina avgerð (íroknað møguligar agarevsingar), sum var VAR ikki til staðar (undantikið fyri eina „mista“ støðu)
- Ikki er loyvt dómaranum og hinum dystarleiðarunum at „døma onki“, tí hetta førir til veika/lítið avgjørda døming, ov nógvar „endurskoðanir“ og týðandi trupulleikar, um tøknin ikki riggar, sum hon skal
- Bara dómarin kann taka endaligu avgerðina. VAR hevur sama myndugleika sum hinir dystarleiðararnir, og kann hann bert hjálpa dómaranum
- At seinka floytuni/flagginum er bert loyvt í sera týðiligum álopsstøðum, tá ið ein leikari er um at skora eitt mál ella hevur frítt at renna inn í brotssparksteigin ella ímóti brotssparksteiginum hjá mótstøðuliðnum

Um ein hjálpardómari seinkar flagginum fyri eitt brot, skal hann lyfta flaggið, um eitt mál/hornaspark/brotsspark, fríspark verður dømt til áleypandi liðið, ella eitt innkast spyrst burturúr. Sama er galdandi, um liðið varðveitir bóltin, tá ið upprunaliga álopið er liðugt. Í øllum øðrum støðum skal hjálpardómarin gera av, um flaggið skal upp ella ikki, út frá hvat er best fyri dystin.

Kanning

- VAR „kannar“ av sær sjálvum sjónvarpsupptøkurnar til øll mál ella møgulig mál, brotssparksavgerðir, avgerðir, sum føra útvísing við sær og møguligar støður viðvíkjandi skeivum samleika. Hetta verður gjørt við at nýta ymisk sjónarhorn í sjónvarpsupptøkunum og við at spæla støðuna umaftur við ymiskari ferð
- VAR kann „kanna“ upptøkurnar í vanligari ferð og/ella seinari ferð, men vanliga eigur seinari ferð bert at verða nýtt til at staðfesta, hvar eitt brot varð framt, hvar leikarin var staddur, hvar fysisktsamband kom fyri, um bólturin varð spældur við hondini, og um bólturin var úr leiki. Vanlig ferð eigur at verða nýtt til at staðfesta, hvussu „ógvisligt“ eitt brot var ella fyri at finna út av, um ein leikari hevur framt „hondbóltsbrot“
- Um „kanningin“ ikki vísir eitt „týðiligt og eyðsýnt mistak“ ella eina „álvarsama mista støðu“, nýtist VAR vanliga ikki at tosa við dómaran – Hetta er ein „still kanning“. Tó kann tað hjálpa dómaranum/hjálpardómaranum við at hava tamarhald á leikarunum/dystinum, um VAR sigur honum, at talan ikki er um eitt „týðiligt og eyðsýnt mistak“ ella eina „álvarsama mista støðu“
- Um neyðugt er at seinka uppafturtøku av leiki fyri at „kanna“, skal dómarin týðiliga peika á smátalaran/oyrnasnigilin og hava hin armin strektan út frá kroppinum, inntil „kanningin“ er avgreidd. Hetta tekn merkir, at dómarin fær upplýsingar (hesar kunnu koma frá VAR ella øðrum dystarleiðara)
- Um „kanningin“ vísir, at eitt „týðiligt og eyðsýnt mistak“ ella ein „álvarsom mist støða“ møguliga er farin fram, skal VAR fáa hesi boðini til dómaran, sum skal gera av, um neyðugt er við endurskoðan ella ikki

Endurskoðan

- Dómarin kann taka stig til eina „endurskoðan“ í støðum, har talan møguliga er um eitt „týðiligt og eyðsýnt mistak“ ella eina „álvarsama mista støðu“ tá:
    - VAR ella ein annar dystarleiðari viðmælir eina endurskoðan
    - Dómarin hevur illgruna um, at okkurt álvarsamt er farið framvið
- Um steðgur er í leiki, skal dómarin seinka uppafturtøku av leiki
- Um steðgur ikki er í leiki, skal dómarin steðga leiki, næstu ferð bólturin er á uttanveltaðum øki (vanliga, tá ið hvørki av liðunum er í álopi) og gera „sjónvarpstekn“
- VAR greiðir dómaranum frá, hvat sæst á skíggjanum undir endurspælingunum, og so skal dómarin:
    - Gera „sjónvarpstekn“ (um hetta ikki longu er gjørt), og fara á „øki dómarans til endurskoðan“ at hyggja eftir sjónvarpsupptøkum – endurskoðan á vøllinum (EÁV) – áðrenn endalig avgerð verður tikin. Aðrir dystar leiðarar hyggja ikki eftir upptøkunum, uttan í heilt serligum føri tá ið dómarin biður teir um tað

ella

- Taka eina endaliga avgerð, sum er grundað á dómarans egnu meting, av upplýsingunum frá VAR og, har tað er hóskandi, íkast frá øðrum dystar leiðarum – bert VAR-endurskoðan
- Í báðum førum skal dómarin gera „sjónvarpstekn“, tá ið endurskoðanin er avgreidd, og síðani taka endaliga avgerð
- Tá dómarin skal gera egnar metingar um – t.d., hvussu ógvisligt eitt fríspark er, ávirkan í rangstøðu, fyrilit í samband við at spæla bóltin við hondini (støða, tilvitað o.s.fr.) – er oftast hóskandi at fremja „endurskoðan á vøllinum“ (EÁV)
- Til avgerðir, sum snúgva seg um fakta/sanroyndir–t.d. støða, har brot verður framt ella støða hjá leikara (rangstøða), stað har samband var (hond bóltsbrot/fríspark), støða (innan fyri ella uttan fyri brotssparksteigin), bóltur úr leiki o.s.fr. er vanliga hóskandi, at bert VAR endurskoðar. Tó kunnu støður koma fyri, har tað er hóskandi, at dómarin fremur „endurskoðan á vøllinum“ (EÁV), um hetta er við til at stýra leikarunum/ dystinum ella fyri at „selja“ avgerðina (t.d. sera týdningarmikil, dystaravgerandi avgerð seint í dystinum)
- Dómarin kann biðja um ymisk sjónarhorn í sjónvarpsupptøkunum / avspælingarferðir, men vanliga eigur seinari ferð bert at verða nýtt til at staðfesta fakta/sanroynd, t.d., hvar eitt brot varð framt, hvar leikarin var staddur, hvar likamligt samband kom fyri, um bólturin varð spældur við hondini, og um bólturin var úr leiki (íroknað mál/ikki mál). Vanlig ferð eigur at verða nýtt til at staðfesta, hvussu „ógvisligt“ eitt brot var ella fyri at finna út av, um ein leikari hevur framt eitt „hondbóltsbrot“
- Til avgerðir, sum snúgva seg um mál, brotsspark/ikki brotsspark og reyð kort fyri at taka ein upplagdan málmøguleika (FUM) frá mótleikara, kann gerast neyðugt at endurskoða tíðarbilið undan álopinum, sum førdi til avgerðina/ støðuna. Íroknað hesum kann vera, hvussu áleypandi liðið vann bóltin í vanligum spæli
- Fótbóltslógin loyvir ikki avgerðum viðvíkjandi uppafturtøku av leiki (hornaspørk, innkøst o.s.fr) at verða broyttar, um leikur er tikin uppaftur, og kunnu hesar tískil ikki endurskoðast
- Um leikur er steðgaður og tikin uppaftur, kann dómarin bert fremja endurskoðan í støðum, sum snúgva seg um skeivan samleika ella møgulig brot, sum skulu sektast við útvísing, og nýta hóskandi agarevsing, um talan er um harðskapatburð, at spýta, at bíta ella niðrandi og/ella háðandi gerð(ir), sum eru farin um øll mørk)
- Mannagongdin viðvíkjandi endurskoðan skal avgreiðast so smidliga og væl sum gjørligt, men neyvleikin í endaligu avgerðini hevur størri týdning enn at skunda sær. Av hesi orsøk, og tí at summar støður eru fløkjaligar við fleiri avgerðum at endurskoða, er ongin tíðarfreist sett á endurskoðanina

Endalig avgerð

- Tá ið endurskoðanin er avgreidd, skal dómarin gera „sjónvarpstekn“ og boða frá endaligu avgerðini. Kappingarfyriskipararnir kunnu eisini innføra eina skipan, har dómarar alment greiða frá og kunngerða teirra avgerðir aftaná eina VAR endurskoðan ella eina longri VAR kanning, soleiðis sum víst verður á í vegleiðingunum frá FIFA og í VAR handbókini.
- Tá skal dómarin vísa/broyta/taka aftur einhvørja agarevsing (har tað er hóskandi) og taka leik uppaftur samsvarandi Fótbóltslógini

Leikarar, eykaleikarar og hjálparfólk

- VAR „kannar“ allar støður, og tí er ikki neyðugt hjá eykaleikarum og hjálparfólki at biðja um „kanning“ ella „endurskoðan“
- Leikarar, eykaleikarar og hjálparfólk skulu ikki royna at ávirka ella leggja uppí, meðan dómarin endurskoðar, íroknað, tá ið boðað verður frá endaligu avgerðini
- Ímeðan endurskoðanin fer fram, skulu leikarar vera á vøllinum, og eykaleikarar og hjálparfólk skulu vera uttan fyri vøllin
- Ein leikari/eykaleikari/útskiftur leikari/hjálparfólk, sum ógvisliga vísir „sjónvarpstekn“ ella fer inn í RRA, skal ávarast
- Ein leikari/eykaleikari/útskiftur leikari/hjálparfólk, sum fer inn í VR skal vísast út.

Gildi á dysti

Sum meginregla verður ein dystur ikki ógildaður orsakað av:

- at VAR-tøknin svíkur (sama er galdandi fyri máltøkni (MT))
- skeivar avgerðir, har VAR er blandaður uppí (tí VAR er ein dystarleiðari)
- avgerðir um ikki at endurskoða eina støðu
- endurskoðan av støðum/avgerðum, sum ikki eiga at endurskoðast

Óarbeiðsførur VAR, H-VAR ella endurspælingartøkningur

Í grein 6 – Hinir dystarleiðararnir stendur: Kappingarreglurnar skulu týðiliga tilskila, hvør loysir ein dystarleiðara av, sum ikki kann byrja ella halda áfram í einum dysti, sum hann er settur at døma. Í dystum, har VAR verður nýtt, er hetta eisini galdandi fyri endurspælingartøkningar

Havandi í huga, at tað krevur serliga venjing og skúling fyri at vera video dystar- leiðari (VDL)/endurspælingartøkningur, skulu fylgjandi reglur skoytast upp í kappingarreglurnar:

- Ein VAR, H-VAR ella endurspælingartøkningur, sum ikki kann halda fram, kann bert avloysast av einum, sum hevur førleikarnar at taka leiklutin á seg
- Um ongin avloysari við neyðugu førleikunum er til taks fyri VAR ella endurspælingartøkningin, má dysturin spælast/halda fram uttan VAR
- Um ongin avloysari við neyðugu førleikunum er til taks fyri H-VAR*, má dysturin spælast/halda fram uttan VAR, uttan í heilt serligum førum tá ið bæði liðini skrivliga semjast um, at dysturin kann spælast við bert einum VAR og einum endurspælingartøkningi

* Hetta er ikki galdandi, tá ið tað er meira enn ein H-VAR/endurspælingar tøkningur

FIFA Quality Programme

FIFA Quality Programme

The FIFA Quality Programme ásetur krøvini, sum eru grundað á góða gransking, fyri vørur, vallarundirlag og tøkni, sum verða nýtt í fótbólti. Aftur at teimum góðskukrøvum, sum eru innan summi øki, eru eisini einsháttað viðmæli á øðrum økjum. Grundað á hesi kunnu kappingarfyriskiparar lýsa sínar egnu reglugerðir.

Óheftir royndarstovnar vátta virkisføri á vørunum, vallarundirlagi og tøkni í samsvari við hvørt øki sær. Stovnarnir, sum fremja hesar royndir, skulu

góð kennast av FIFA. Fylgjandi merkir eyðmerkja tær vørur, vallarundirlag og tøkni, sum hava staðið neyðugu royndirnar:

FIFA BASIC | FIFA QUALITY | FIFA QUALITY PRO

FIFA Basic*

Royndirnar til hetta stigið eru gjørdar við tí fyri eyga at eyðmerkja vørur, sum lúka grundtreytirnar fyri neyvleika, trygd og haldføri innan fótbólt.

Dentur verður lagdur á at seta eitt minsta krav, meðan tryggjað verður, at ráð eru til at nýta hetta – sama hvørjum stigi spælt verður á.

FIFA Quality

Hesar royndir leggja størri dent á haldføri og trygd á vørunum, vallarundirlagi og tøknina enn FIFA Basic . Grundleggjandi avrik og neyvleiki verða roynd, men høvuðsdenturin verður lagdur á at tryggja nógva nýtslu.

* FIFA Basic avloysir International Match Standard (IMS). Fótbóltar og vallarundirløg, sum hava verið gjøgnum hesar royndir, kunnu ný tast, inntil góðkenningin fer úr gildi.

FIFA Quality Pro

Denturin verður lagdur á fyrstafloks avrik, neyvleika og trygd. Vørur, vallar undir lag og tøkni við hesum merki eru framleidd fyri at fáa besta avrik og nýtslu á hægsta stigi.

FIFA Quality Programme
https://www.fifa.com/technical/football-technology

IFAB

Lógar-broytingar 2026

IFAB

Samanumtøka av lógarbroytingum

§ 3 – Leikararnir

- Kappingar hava møguleika at innføra ‘Bert liðskiparin’ mannagongdirnar

§ 5 – Dómarin

- Tekin, sum skal gerast, tá dómarin telur niður tey seinastu 5 sekundini av 8 sekunds regluni

§ 8 – Byrjan og uppafturtøka av leiki - Uppkast

- Um, tá leikur varð steðgaður:
  - Bólturin var inni í brotssparksteiginum, skal dómarin sleppa bóltin til málmannin hjá tí vverjandi liðnum í teirra brotssparksteigi
  - Bólturin var uttan fyri brotssparksteigin, skal dómarin sleppa bóltinum til ein leikara, sum hevur bóltin, ella sum hevði fingið fatur á bóltinum, um dómarin er førur fyri at meta um hetta. Annars skal dómarin sleppa bóltinum til ein leikara á tí liði, sum seinast nart hann. Uppkastið skal fremjast har, sum bólturin var, tá leikur varð steðgaður.

§ 9 – Bólturin í og úti av leiki

- Óbeinleiðis fríspark og ongin agarevsing, tá hjálparfólk, eykaleikari, útskiftur/útvístur leikari ella leikari, sum fyribils er farin av vølli nertur ein bólt, sum er á veg av vøllinum – treytað av, at hetta ikki varð gjørt á órøttvísan hátt.

§11 – Rangstøða

- Tá málmaðurin tveitir / kastar bóltin, skal seinasta nertingin brúkast í metingini um rangstøðu

§12 – Fríspørk og ósømiligur atburður

- Ein málmaður, sum hevur tamarhald á bóltinum við hond/armi í meira enn átta sekund, verður sektaður við hornasparki til mótstøðuliðið

§ 16 – Málsparkið

- Tilvísing til aðrar lógargreinar, sum vísa til støður, sum hava við málspark at gera

§ 17 – Hornasparkið

- Tilvísing til aðrar lógargreinar, sum vísa til støður, sum hava við hornaspark at gera
- Hornasparkið skal takast á tí hornaboganum, sum er nærmast har, sum málmaðurin framdi brotið

Video hjálpardómari (VAR) mannagongd

- Kappingar hava møguleika at lata dómaran greiða frá avgerðina efgtir VAR kanning ella endurskoðan.

Nærlýsing av lógarbroytingum

Fylgjandi eru broytingarnar í Fótbóltslógini 2025.

Fyri hvørja broyting er tann nýggja/bøtta/aftratlagda orðingin saman við gomlu orðingini, og, har tað er hóskandi, er ein frágreiðing givin.

Lykil
Høvuðslógarbroytingarnar eru undirstrikaðar og eru við gulum í úti í breddanum. Broytingar í tekstinum eru undirstrikaðar

GK= gult kort (ávaring); RK= reytt kort (útvísing).

§ 3 – Leikararnir (s. 61)

10. Liðskiparin

Afturatlagdur tekstur

Øll lið skulu hava ein liðskipara á vøllinum, sum skal bera eitt armband, sum vísir, at hann er liðskipari. Liðskiparin hevur ongar sersømdir, men hann hevur eina ávísa ábyrgd av atburðinum hjá liði sínum.

Mannagongdirnar viðvíkjandi 'Bert liðskiparin', sum eru at finna undir 'Tillagingar til Fótbóltslógina', kunnu setast í verk

Frágreiðing

Kappingarfyriskiparar verða eggjaðir til at innføra 'Bert liðskiparin' mannagongdirnar fyri at bøta um atburðin á vøllinum og fyri at styrkja samstarvið millum dómarar og leikarar.

§ 5 – Dómarin (s. 76)

6. Dómaratekn

(...)

Niðurteljing Seinastu 5 sekundini av 8 sekunds avmarkingini, har málmaðurin kann hava tamarhald á bóltinum við hond/armi.

§ 8 – Byrjan og uppafturtøka av leiki (s. 92)

2. Uppkast

Bøttur tekstur

Mannagongd

- ~~Dómarin sleppur bóltinum til málmannin hjá verjandi liðnum í teirra brotssparksteigi, um:~~
  - ~~bólturin var í brotssparksteiginum, tá ið leikur varð steðgaður ella~~
  - ~~bólturin seinast varð nortin í brotssparksteiginum, tá ið leikur varð steðgaður~~
- ~~Í øllum øðrum førum skal dómarin sleppa bóltinum til ein leikara á tí liði, sum seinast nart bóltin á tí stað, har bólturin seinast varð nortin av einum leikara, einum óviðkomandi ella, sum víst verður til í § 9.1, ein dystarleiðara~~
- Um leikur varð steðgaður og:
  - Bólturin var inni í brotsteiginum, skal dómarin sleppa bóltinum til málmannin hjá tí verjandi liðnum í teirra brotsteigi

- Bólturin var uttanfyri brotssparksteigin, skal dómarin sleppa bóltinum til ein leikara, frá liðnum sum hevur ella hevði fingið fatur á bóltinum, um dómarin er førur fyri at meta um hetta. Annars skal dómarin sleppa bóltinum til ein leikara á tí liði, sum seinast nart hann. Uppkastið skal fremjast har, sum bólturin var, tá leikur varð steðgaður
- (...)

Frágreiðing

Stundum kemur tað fyri, at tað er týðiligt, at ein mótleikari hjá tí, sum seinast nært bóltin, hevði fingið bóltin. Í slíkum førum er tað rættvísari at sleppa bóltinum til tað liðið, sum hevði fingið tamarhald á bóltinum, um hetta er greitt fyri dómaranum. Uttanfyri brotsteigin, skal uppkastið nú fara fram har bólturin var tá leikur varð steðgaður.

§ 9 – Bóltur í og úti av leiki (s. 95)

2. Bóltur í leiki

Afturatlagdur tekstur

Allar aðrar tíðir er bólturin í leiki (...) og verður verðandi á vøllinum.
Um eitt hjálparfólk, eykaleikari, útskiftur/útvístur leikari ella ein leikari, sum fyribils er farin av vøllinum (skaði ella at rætta útgerð), nertur bóltin, meðan hann framvegis er í leiki, men týðiliga er á veg út av vøllinum, og ætlanin ikki er at leggja upp í leik á óhøviskan hátt, skal viðkomandi sektast við einum óbeinleiðis frísparki – ongin agarevsing skal gevast.

Frágreiðing

Stundum kemur tað fyri, at ein venjari, eykaleikari ella ein leikari, sum fyribils er farin av vøllinum (millum annað) nertur bóltin, meðan hann er á veg út av vøllinum við tí fyri eyga at taka leik upp aftur skjótt. Í slíkum førum skal óbeinleiðis frískpark dømast, men ongin agarevsing skal gevast, uttan so, at agarevsingin verður givin fyri áhaldandi at fara úr tekniska økinum.

§ 11 – Rangstøða (s. 103)

2. Rangstøðubrot

Aftratlagdur tekstur

*Her skal nýtast tann fyrsta nertingin ella tað fyrsta sambandið, sum er við bóltin. Tó skal seinasta nertingin nýtast, tá málmaðurin kastar bóltin.

Frágreiðing

Fyrsta sambandið við bóltin skal nýtast, tá metast skal um rangstøðu. Tó skal seinasta sambandið nýtast, tá málmaðurin kastar bóltin, tí hetta gevur eina greiðari fatan.

§ 12 – Frískpark og óhøviskur atburður (s. 112, 113)

2. Óbeinleiðis frískpark

Bøttur tekstur

(...)
Óbeinleiðis frískpark verður dømt til mótstøðuliðið, um málmaðurin inni í egnum brotssparksteigi ger seg sekan í onkrum av teimum fylgjandi brotunum:

- ~~Heldur bóltinum í hondini/arminum, meðan hann hevur tamarhald á honum, í meira enn 6 sekund, áðrenn hann sleppur honum~~
- Nertur bóltin aftur við hondunum/ørmunum eftir at hava hildið honum, og uttan hann hevur nortið nakran annan leikara.
- Nertur bóltin við hond/armi, um málmaðurin ikki týðiliga hevur sparkað ella roynt at sparkað bóltin fyri at fáa hann í spæl eftir at:
  - bólturin tilvitað er spældur til hansara av einum viðleikara við fótinum.
  - hava fingið bóltin frá einum innkasti, ið er tikið av einum viðleikara

~~Ein málmaður verður mettur at hava tamarhald á bóltinum, tá:~~

- ~~bólturin er millum hendurnar, millum hondina og ein flata (t.d. vøllin, egnan kropp) ella við at nerta bóltin við onkrum parti av hondum ella ørmum, undantikið tá ið bólturin støkkur frá málmanninum (íroknað tilvitað bjarging), ella um málmaðurin hevur framt eina bjarging.~~

(...)

3. Hornaspark

Eitt hornaspark skal dømast, um málmaðurin í egnum brotssparksteigi hevur tamarhald á bóltinum við hond/armi í meira enn 8 sekund, áðrenn hann sleppur honum. Ein málmaður verður mettur at hava tamarhald á bóltinum við hond/armi, tá:

- Bólturin er millum hendurnar/armarnar ella millum hendurnar/armarnar og eina flatu (t.d. vøllin, egnan kropp)
- Hann heldur bóltinum við strektari hond
- Hann støkkur bóltin í vøllin ella kastar hann í luftina

Dómarin ger av, nær málmaðurin hevur fingið tamarhald á bóltinum, og nær tey 8 sekundini byrja. Tey seinastu fimm sekundini telur dómarin sjónliga niður við lyftari hond.

Mótleikarum er ikki loyvt at stríðast við málmannin um bóltin, tá hann hevur tamarhald á bóltinum við hond/armi.

Frágreiðing

- Um ein málmaður hevur tamarhald á bóltinum við hond/armi í meira enn 8 sekund, fer dómarin nú at døma hornaspark til mótstøðuliðið. Hornasparkið skal takast nærmast har, sum málmaðurin framdi brotið. Ongin agarevsing skal gevast uttan so, at málmaðurin áhaldandi fremur brotið.
- Fyri at hjálpa málmanninum, fer dómarin sjónliga at telja tey seinastu 5 sekundini við strektum armi.

Nýggj talmerking av stykkjunum í fylgjandi undirgreinum: (s. 113, 121)

4. Agarevsingar

5. Uppafturtøka av leiki eftir fríspørk og ósømiligan atburð

§ 16 – Málsparkið (s. 139)

Innleiðsla

Afturatlagdur tekstur

Málspark verður dømt, tá ið allur bólturin fer um mállinjuna eftir jørð ella í luftini, uttan at eitt mál er skorað sambært § 10, eftir at hann seinast er nortin av einum leikara úr tí áleypandi liðnum. (Sí eisini grein 8, 10, 13 og 15).

§ 17 – Hornasparkið (s. 143)

Innleiðsla

Afturatlagdur tekstur

Hornaspark verður dømt, tá ið allur bólturin fer um mállinjuna eftir jørð ella í luftini, uttan at eitt mál er skorað, eftir at hann seinast er nortin av einum leikara úr tí verjandi liðnum. (Sí eisini grein 8, 12, 13, 15 og 16).

(...)

1. Frágreiðing

Afturatlagdur tekstur

- Bólturin verður lagdur innan fyri hornaøkið við nærmasta hornaflagg, har sum hann fór av vølinum, ella har málmaðurin framdi brot

Videohjálpardómari (VAR) handbók (s. 153)

4. Procedures

Afturatlagdur tekstur

Endalig avgerð

- Tá ið endurskoðanin er avgreidd, skal dómarin gera „sjónvarpstekn“ og boða frá endaligu avgerðini. Kappingarfyriskiparar kunnu eisini innføra eina skipan, har dómarar alment greiða frá og kunngerða teirra avgerðir aftaná eina VAR endurskoðan ella eina longri VAR kanning, soleiðis sum víst verður á í vegleiðingunum frá FIFA og í VAR handbókini
- (…)

Frágreiðing

Eftir væleydnaðar royndir, kunnu kappingarfyriskiparar nú lata dómarin greiða frá og kunngerða avgerðir eftir VAR kanning ella endurskoðan.

Orðalisti – Fótbóltsmál (s. 182)

Uppkast

Bøttur tekstur

~~Ein háttur at taka leik uppaftur – Dómarin sleppir bóltinum til ein leikara úr tí liðnum, sum seinast nart bóltin (undantikið í brotssparksteiginum, tá ið bólturin verður sleptur til málmannin). Bólturin er í leiki, tá ið hann nertur vøllin.~~

Uppafturtøka av leiki, tá leikur er steðgaður av dómaranum, uttan at nakað brot er framt – t.d. orsakað av skaða, brostnum bólti o.s.fr. (Sí grein 8).

Leiðreglur til dystarleiðarar – Støðusnildi, rørsla og samstarv (s. 199)

2. Støðusnildi, rørsla og samstarv

Aftratlagdur tekstur

Brotssparkið

HD skal standa har, sum mállinjan møtir brotssparksteiginum.
Har tað er møguligt, við tøkni (VAR ella MT), at kanna um málmaðurin fer ov tíðliga av mállinjuni ella ikki, verður viðmælt, at HD stendur á síðulinjuni áraka brotssparksblettin (sum er rangstøðulinjan), tí tað kann gerast trupult at koma frá mállinjuni til síðulinjuna fyri at meta um rangstøðu, um bólturin støkkur út aftur í leik.
Har sum eyka hjálpardómarar verða nýttir, skulu hesir standa har, sum málteigurin og mállinjan møtast. HD skal tá standa á síðulinjuni áraka brotssparksblettin
~~(Tað er rangstøðulinjan)~~

Orðalisti

Í orðalistanum eru orð og vendingar, sum mugu gerast týðiligari ella tørva nærri frágreiðing aftur at tí, sum er í Fótbóltslógini. tí tey eru ella kunnu vera torfør at umseta úr enskum til onnur mál.

Fótbóltssamgongur

The IFAB – The International Football Association Board
Samgonga, sum er sett saman av teimum fýra bretsku fótbóltssambondunum og FIFA, og sum hevur ábyrgdina av Fótbóltslógini um allan heim.

FIFA – Fédération Internationale de Football Association
Ráðandi samgongan, sum hevur ábyrgdina av øllum fótbólti í øllum heiminum.

Sersamband
Samgonga, sum hevur ábyrgdina av fótbólti í einum heimsparti. Tey seks sersambondini eru AFC (Asia), CAF (Afrika), CONCACAF (Norðuramerika, Miðamerika og Karibia), CONMEBOL (Suðuramerika), OFC (Kyrrahavsoyggjarnar) og UEFA (Evropa).

Tjóðarfótbóltssamband
Samgonga, sum hevur ábyrgdina av fótbóltinum í einum landi.

Fótbóltsmál

A

Agarevsing
Eyka revsing, ið verður tikin av dómaranum

Andin í lógini
Tær týdningarmestu aðalreglurnar í fótbólti

At fáa fatur á
At forða einum bólti í at náa fram har, sum hann var ætlaður.

At finta
Ein gerð, sum hevur til endamáls at lumpa ein mótleikara. Lógin ásetur, hvat er og ikki er loyvt, tá um fintur ræður.

At forða
At seinka ella at hindra eini gerð ella eini rørslu hjá einum mótleikara.

At sekta
At revsa, verður vanliga gjørt við at døma fríspark ella brotsspark til hitt liðið (sjá eisini fyrimunur)

At seta trygdina hjá einum mótleikara í vanda
At seta ein mótleikara í vanda ella váða (fyri at fáa skaða)

At skumpa
Fysiskt avbjóðing ímóti mótleikara; vanliga við at nýta økslina ella yvirarmin (sum skal vera nær at kroppinum).

At slíta
At enda ein dyst í úrtíð ella bróta dyst av, við tí fyri eyga at taka dystin uppaftur

Avbjóðing
Tá ið ein leikari stríðist ella kappast við mótleikara um bóltin.

Á

Ávaring
Almenn revsing, sum hevur við sær, at frágreiðing verður send til rættan myndugleika; verður víst við at vísa eitt gult kort. Tvær ávaringar til sama leikara í sama dysti hevur við sær, at leikarin ella hjálparfólkið verður rikið av vølli (útvístur).

B

Beinleiðis fríspark
Eitt fríspark, sum mál kann skorast uppá við at sparka bóltin í mótleikaranna mál.

Bjarging
Ein gerð, tá ið ein leikari nýtir onkran part av kroppinum (undantikið málmaðurin í egnum brotssparksteigi) fyri at bjarga ella royna at bjarga einum bólti, sum er á veg í ella nær við at fara í málið.

Blusa
Klæði, sum leikarin hevur á yvirkroppinum. Hetta er partur av leikarabúnanum. Undantikið longdin á ermunum, skulu allir leikarar bera líka blusu – undantikið málmenn, sum skulu líkjast frá øðrum leikarum og dómaranum.

Brot
Ein gerð, sum gongur ímóti/brýtur Fótbóltslógina

Brotssparkskapping
Háttur at koma fram til úrslitið av einum dysti, har liðini skiftast um at sparka, inntil annað liðið hevur skorað fleiri mál, og bæði hava sparkað líka ofta (uttan so at annað liðið – áðrenn tey fyrstu fimm spørkini eru sparkað – ikki hevur møguleika at skora líka nógv mál sum mótstøðuliðið, sjálvt um teir skora upp á øll spørkini.

Brutalitetur
Ein gerð, sum er harðrend, eirindaleys ella tilvitað harðlig

D

Dómaraseðil
Almennur listi, sum vanliga nevnir leikarar, eykaleikarar og hjálparfólk.

Drekkisteðgur
Kappingarreglurnar kunnu loyva t.d. „drekkisteðgum“ (sum ikki skulu vara longur enn ein minutt), so at leikararnir kunnu fáa vætu. Hesir eru ikki tað sama sum „kølisteðgir“

E

Eykatíð
Ein háttur at koma fram til vinnaran av einum dysti við at spæla tveir hálvleikir, sum eru fimtan minuttir hvør.

Elektronisk skipan at fylgja við menning (EPTS)
Elektronisk skipan, sum sendir upplýsingar um likamliga og lívvirkisliga (fysiologiska) avrikið hjá einum leikara

Electronic Player Tracking System (EPTS)
Skipan, sum goymir og greinar vitan um likamliga avrikið hjá einum leikara.

F

Film
Ein gerð, sum gevur eina skeiva mynd av, at okkurt er hent, tá ið einki er hent (sjá eisini lumpa); verður gjørt av einum leikara fyri at fáa ein órættvísan fyrimun

Fyribils útvísing
Ein fyribils útvísing av næsta partinum av dystinum fyri ein leikara, sum er sekur í onkrum/øllum brotum, sum sektast við ávaring (GK) (tað veldst um kappingarreglurnar)

Fyrimunur
Dómarin letur leik halda áfram, um eitt brot er framt, og hetta tænir tí liði, sum brotið varð framt ímóti.

H

„Haldi-brot“ (Brot, sum eru at halda)
„Haldibrot“ henda bert, tá ið ein leikari hevur samband við kropp ella útgerð hjá mótleikara, og hetta sambandið forðar rørslu mótleikarans.

Harðskapsatburður
Ein gerð, sum ikki er ein avbjóðing um bóltin, har nýtt verður ella roynt verður at nýta ógvisliga megi ella brutalitet ímóti einum mótleikara, ella tá ið ein leikari tilvitað slær onkran í høvdið ella andlitið, um ikki fysiska sambandið einki hevði upp á seg.

Hasarderað
Ein gerð (sum oftast ein takkling ella avbjóðing), framd av einum leikara, sum ikki leggur upp fyri vandanum ella fylgjunum, hetta kann hava fyri mótleikaran.

Háðandi og niðrandi málburður/gerðir
Munnligur ella fysiskur atburður, sum er ófólkaligur, særandi, vanvirðandi; eigur at verða revsaður við útvísing (reyðum korti)

Heilaskjálvta útskifting
Ein møguleiki hjá kappingarfyriskiparunum at loyva eini eyka útskifting (og ein eyka útskiftingarmøguleika), um ein leikari fær heilaskjálvta, ella um illgruni er um, at hann hevur fingið heilaskjálvta
Sí Mannagongd til eyka útskifting í samband við heilaskjálvta

Hjálparfólk
Allir „ikkileikarar“, sum standa á dómaraseðlinum; t.e. venjari, fysioterapeutur, lækni.

Hybrid-skipan
Ein samanrenning av eftirgjørdum og natúrligum evni, sum verður nýtt til at gera eitt undirlag at spæla á, sum krevur sólskin, vatn, luft, rørslu og má verða sligið.

K

Kølisteðgur
Fyri at hava trygd leikaranna í huga kunnu kappingarreglurnar í ávísum veðri (t.d. tá ið vætustigið er høgt ella í nógvum hita) loyva „kølisteðgum“ (úr 90 sekundum til 3 minuttir) fyri at fáa kropshitan at minka. Hesir steðgir eru øðrvísi enn „drekkisteðgir“

L

Leikfjarstøða
Fjarstøða til bóltin, sum ger, at tað er gjørligt hjá einum leikara at nerta bóltin við at rætta fótin/beinið út ella við at leypa – fyri málmenn er hetta eisini galdandi, um lopið verður við strektum ørmum. Fjarstøðan veldst um hvussu stórur leikarin er.

Leikur, sum í álvarsligan mun ikki er loyvdur
Ein takkling ella ein avbjóðing, sum setur trygd mótleikarans í vanda, ella sum nýtir ógvisliga megi ella brutalitet, verður revsað við útvísing (reyðum korti).

Lumpa
Gerð, ið hevur til endamáls at villeiða/lumpa dómaran fyri at fáa hann at taka eina skeiva avgerð ella agarevsing, sum gagnar viðkomandi ella liðnum hjá viðkomandi, sum lumpar dómaran.

M

Máltøkni (MLT)
Skipan, sum beinanvegin sigur dómaranum, nær eitt mál er skorað; t.e. tá ið allur bólturin er farin um mállinjuna í málið.
Sjá § 1 fyri at fáa greiðari frágreiðing

Meting av skaddum leikara
Skjót meting av einum skaða, oftast av einum læknaligum persóni, fyri at vita um einum leikara tørvar viðgerð.

Misnøgd
Almenn ósemja um eina avgerð hjá einum dystarleiðara; eigur at verða sektað við ávaring (gulum korti)

O

Offence
Sama sum brot

Ó

Óbeinleiðis fríspark
Fríspark, har eitt mál bert kann skorast, um ein leikari (frá onkrum liði) nertur bóltin, eftir hann er sparkaður.

Óhøviskur atburður
Órættvís gerð ella órættvísur atburður; skal sektast við ávaring

Ógvislig megi
At nýta meira megi/orku, enn neyðugt er.

Óneyðugt íbland
Gerð, sum er óneyðug.

Óviðkomandi
Allir persónar, sum ikki eru dystarleiðarar ella á dómaraseðlinum (leikarar, eykaleikarar og hjálparfólk).

R

Reglan um útivallarmál
Háttur at avgera dyst/uppgerð, tá ið bæði liðini hava skorað eins nógv mál; mál, sum er skorað á útivølli, telur dupult.

Rikin av vølli
Ein onnur orðing fyri at verða útvístur (reytt kort)

S

Spark
Bólturin er sparkaður, tá ið ein leikari fær samband við hann við fótinum og/ella øklinum

Skjótt tikið fríspark
Fríspark, sum verður tikið (við loyvi dómarans) sera skjótt, eftir at leikur varð steðgaður.

Steðga
At steðga einum dysti eina løtu við tí fyri eyga at taka hann uppaftur; t.e. orsakað av mjørka, grimdarregni, torusláttri, álvarsomum skaða.

Støða til uppafturtøku av leiki
Støðan hjá einum leikara, tá ið leikur verður tikin uppaftur, er har, sum føturnar ella onkur annar partur av kroppinum nerta vøllin – undantikið sum vístur verður á í § 11 – Rangstøða.

Skinnarar
Útgerð, sum hevur til endamáls at verja skinnabeinini hjá leikarum móti skaða. Leikarar hava skyldu til at bera skinnarar, sum eru úr hóskandi evni og hava hóskandi stødd til at geva nøktandi verju. Skinnararnir skulu vera fjaldir av hosunum.

T

Takkling
Ein avbjóðing um bóltin við fótinum (á jørðini ella í luftini).

Tekn
Tekn frá dómara ella onkrum øðrum dystarleiðara; verður vanliga gjørt við hond, armi, flaggi ella við at nýta floytuna (bert dómarin).

Tekniska økið
Ásett økið (við leikvøllir) til hjálparfólk, har stólar eisini eru. (sjá § 1 fyri at fáa nærri at vita)

Tilvitað
Ein gerð, sum verður gjørd við vilja (ikki eitt óhapp)

U

Uttan týdning
Onki upp á seg

Uppafturtøka
Allir hættir at taka leik uppaftur, eftir at hann hevur verið steðgaður.

Uppkast
Uppafturtøka av leiki, tá leikur er steðgaður av dómaranum, uttan at nakað brot er framt – t.d. orsakað av skaða, brostnum bólti o.s.fr. (Sí grein 8)

Ú

Útvísing
Agarevsing, tá tað verður kravt, at ein leikari fer av vøllinum, tað, sum eftir er av dystinum, eftir at hava framt eitt brot, sum verður sektað við reyðum korti (verður víst við reyðum korti); um dysturin er byrjaður, kann leikarin ikki loysast av. Eitt hjálparfólk kann eisini útvísast.

V

Vøllurin
Økið, sum spælt verður á, og sum er umgyrt av síðulinjunum, mállinjunum og málnetunum, har hesi verða nýtt.

Y

Yvirtíð
Tíð, sum verður løgd aftur at hvørjum hálvleiki sær fyri tíð, sum er mist orsakað av útskiftingum, skaðum, agarevsingum, at frøast um eitt mál o.s.fr

Dómaramál

Dómarar
Orð fyri persón ella persónar, sum hava ábyrgdina av at leiða ein fótbóltsdyst vegna eitt fótbóltssamband/eina kapping, tá ið dysturin verður leiktur undir eygleiðing av einum teirra.

Dómari
Høvuðsdómarin í einum dysti, sum er inni á vøllinum. Aðrir dystarleiðarar eru undir tamarhaldi/leiðbeining dómarans. Dómarin er tann, sum tekur endaligu avgerðirnar.

Aðrir dystarleiðarar
Dystarleiðarar „á vøllinum"
Kappingar kunnu seta aðrar dystarleiðarar at hjálpa dómaranum.

- **Hjálpardómari**
  Dystarleiðari, sum er á helvtini á aðrari síðulinju, og sum hevur til uppgávu at hjálpa dómaranum; serliga við rangstøðu, málsparki, hornasparki og innkasti
- **Fjórði dómari**
  Dystarleiðari, sum skal hjálpa dómaranum við tí, sum hendir inni á vøllinum og uttan fyri vøllin; íroknað tekniska økið, útskiftingar o.s.fr.
- **Eyka hjálpardómari**
  Ein dystarleiðari, sum stendur á mállinjuni fyri at hjálpa dómaranum serliga við støðum í brotssparksteiginum, rundan um brotssparksteigin og avgerðum um mál/ikki mál
- **Tiltakshjálpardómari**
  Hjálpardómari, sum skal loysa ein hjálpardómara (og ein fjórða dómara ella EHD, um kappingarreglurnar loyva tí) av, um hesin ikki er førur fyri at halda áfram. Hesin skal eisini hjálpa dómaranum við viðurskiftum á og uttanfyri vøllin so sum at hava eyga við tekniska økinum og at hjálpa við útskiftingum.

Videodystarleiðarar
Hesir eru VAR og H VAR, sum hjálpa dómaranum samsvarandi fótbóltslógini og manna gongdini fyri VAR

- **Hjálpar-VAR (H-VAR)**
  Ein núverandi ella fyrrverandi dómari/hjálpardómari, sum er settur at hjálpa videohjálpardómaranum (VAR)
- **Videohjálpardómari (VAR)**
  Ein núverandi ella fyrrverandi dómari, sum er settur at hjálpa dómaranum við at fáa til vega vitan við at hyggja eftir sjónvarpsenduspælingum, men bert í samband við „týðilig og eyðsýnd mistøk" ella „álvarsamar „mistar" støður"

Leiðreglur til dystar-leiðarar

Inngangur

Í hesum leiðreglum eru praktisk ráð til dystarleiðarar; hesi ráð koma aftur at tí, sum stendur í partinum um Fótbóltslógina.

Í § 5 er tilvísing til, at dómararnir taka avgerðir eftir besta førimuni sambært Fótbóltslógini og „andanum í lógini“. Væntað verður, at dómarar nýta vit og skil, og at teir brúka hugtakið „andanum í lógini“, tá ið teir nýta Fótbóltslógina; serliga tá ið avgerðir skulu takast, um ein dystur skal spælast ella halda áfram.

Hetta er serliga galdandi fyri fótbólt á lægri stigi, har tað ikki altíð er gjørligt at fylgja Fótbóltslógini heilt og fult. Til dømis eigur ein dómari at lata ein dyst byrja, um tað ikki ávirkar trygdina, hóast:

- eitt ella fleiri hornafløgg mangla
- okkurt smávegis brek er við vallarmerkingunum, so sum hornaøkið, miðringurin o.s.fr.
- málstengurnar/tvørstongin ikki eru hvít

Í slíkum førum eigur dómarin í semju við liðini at lata dystin byrja/halda fram; dómarin skal senda frágreiðing til rætta myndugleika.

Lykil:

- HD = Hjálpardómari
- EHD = Eyka hjálpardómari

Støðusnildi, rørsla og samstarv

1. Vanligt støðusnildi og rørsla

Tann besta støðan hjá einum dómara er hon, sum ger, at hann fær tikið rætta avgerð. Øll viðmæli um støðusnildi skulu tillagast við at nýta ávísa vitan um liðini, leikararnar og hendingar í dystinum.

Støðusnildið, sum verður viðmælt á myndunum, er grundleggjandi leiðreglur. Tilvísing til eitt „øki“ leggur dent á, at ein viðmæld støða er eitt øki, har tað er sannlíkt, at dómarin fær mest burturúr. Økið kann vera størri, minni ella hava øðrvísi skap alt eftir, hvussu umstøðurnar eru í dystinum. Viðmæli:

- spælið eigur at vera ímillum dómaran og virkna hjálpardómaran
- dómarin skal vanliga nýta eitt vítt diagonalt rennimynstur, soleiðis at tann virkni hjálpardómarin er í sjónarhorni dómarans
- at halda seg uttan fyri spælið, ger tað lættari at hava spælið og tann virkna hjálpardómaran í sjónarhorni dómarans
- dómarin skal vera so mikið nær, at hann sær spælið uttan at órógva tað
- „tað, sum tørvur er at síggja“, er ikki altíð har, sum bólturin er. Dómarin skal eisini hava í huga:
    - samanbrestir millum leikarar, har sum bólturin ikki er
    - møgulig brot í tí øki, sum spælið flytur seg ímóti
    - brot, sum henda, eftir at bólturin er spældur



Støðusnildi hjá hjálpardómarum og eyka dómarum

HD skal altíð vera á linju við næstaftasta verjuleikaran ella bóltin, um hesin er nærri mállinjuni enn næstaftasti verjuleikarin. HD skal altíð hyggja inn á vøllin, eisini tá ið hann rennur. Rørslur eftir liðini eiga at nýtast til stutt strekki. Hetta er serliga týdningarmikið, tá ið avgerð skal takast um rangstøðu, tí hetta ger, at HD hevur betur útsýni.

Støðan hjá EHD er aftanfyri mállinjuna, undantikið tá ið hann má stilla seg á mállinjuna fyri at taka avgerð, um tað er mál/ikki mál. EHD hevur ikki loyvi at koma inn á vøllin, uttan so at heilt serligar umstøður krevja tað.

2. Støðusnildi og samstarv

Ráðføring

Tá ið dystarleiðarar fáast við agarevsingar, kann eygnasamband og eitt varligt tekn frá HD til dómaran vera nóg mikið. Tá ið beinleiðis ráðføring er kravd, kann HD koma 2–3 metrar inn á vøllin um neyðugt. Meðan tosað verður, eiga bæði dómarin og HD at venda sær inn móti vøllinum, fyri at onnur ikki skulu hoyra teir og fyri at hava eyguni við leikarunum á vøllinum.

Hornaspark

Støðan hjá HD við hornaspark er aftanfyri hornaflaggið á linju við mállinjuna, men hann má ikki órógva leikaran, sum tekur hornasparkið, og hann skal syrgja fyri, at bólturin liggur í hornaøkinum, sum hann skal.



Fríspark

Støðan hjá HD í sambandi við fríspark skal vera á linju við næstaftasta

verju leikara fyri at kanna rangstøðulinjuna. Tó skal HD vera til reiðar at fylgja bóltinum við at flyta seg eftir síðulinjuni ímóti hornaflagginum, um talan er um eitt bein leiðis skot upp á mál.









Mál/ikki mál

Tá ið eitt mál er skorað, og ongin ivi er um avgerðina, skulu dómarin og HD fáa eygnasamband, og HD skal flyta seg 25–30 metrar eftir síðulinjuni ímóti miðlinjuni; hetta skal gerast skjótt og uttan at lyfta flaggið.

Tá ið eitt mál er skorað, men bólturin framvegis tykist at vera í leiki, skal HD lyfta flaggið fyri at fáa samband við dómaran og síðani halda fram við vanligu mannagongdini, sum er at renna skjótt 25–30 metrar eftir síðulinjuni ímóti miðlinjuni.

Tá ið tað hendir, at allur bólturin ikki fer um mállinjuna, og leikur heldur fram, tí eitt mál ikki er skorað, skal dómarin fáa eygnasamband við HD og geva eitt varligt tekn um neyðugt.



Málspark

HD skal kanna, at bólturin er inni í málteiginum. Um bólturin ikki liggur rætt, skal HD verða standandi og skal fáa eygnasamband við dómaran og lyfta flaggið. Tá ið bólturin er lagdur rætt, skal HD finna eina støðu, soleiðis at hann kann kanna rangstøðu.

Um ein EHD er, skal HD stilla seg við endan á brotssparksteiginum og síðani við rangstøðulinjuna. EHD skal standa har, sum mállinjan møtir linjuni til málteigin, og hann skal kanna, at bólturin liggur inni í málteiginum. Um bólturin ikki liggur rætt, skal EHD fáa hesi boð til dómaran.



Tá ið málmaðurin sleppir bóltinum

HD skal standa við endan á brotssparksteiginum og kanna, at málmaðurin ikki spælir bóltin við hondini uttan fyri brotssparksteigin. Tá ið málmaðurin hevur slept bóltinum, skal HD stilla seg so, at hann kann kanna rangstøðulinjuna.



Byrjanarspark

HD skal vera á linju við næstaftasta verjuleikara.



Brotsparksskapping

Ein HD skal standa har, sum mállinjan møtir málteiginum. Hin HD skal standa í miðringinum fyri at hava tamarhald á leikarunum. Um EHD eru, skulu teir standa har, sum mállinjan møtir málteiginum báðumegin málið; báðir HD eru í miðringinum.





Brotsspark

HD skal standa har, sum mállinjan møtir brotssparksteiginum.



Har tað er møguligt, við tøkni (VAR ella MT), at kanna um málmaðurin fer ov tíðliga av mállinjuni ella ikki, verður viðmælt, at HD stendur á síðulinjuni áraka brotssparksblettin (sum er rangstøðulinjan), tí tað kann gerast trupult at koma frá mállinjuni til síðulinjuna fyri at meta um rangstøðu, um bólturin støkkur út aftur í leik.



Har sum eyka hjálpardómarar verða nýttir, skulu hesar standa har, sum málteigurin og mállinjan møtast. HD skal tá standa á síðulinjuna áraka brotssparksblettin

Hópsamanbrestur
Í støðum við hópsamanbrestum kann nærmasti HD koma inn á vøllin fyri at hjálpa dómaranum. Hin HD skal eygleiða og leggja til merkis, hvat hendir. Fjórði dómarin skal verða verandi nær við tekniska økið.

Kravd frástøða
Tá ið eitt fríspark verður dømt sera nær við HD, kann HD fara inn á vøllin (sum oftast eftir umbøn frá dómaranum) fyri at tryggja, at leikararnir eru í minsta lagi 9,15 metrar frá bóltinum. Í slíkum føri skal dómarin bíða við at taka leik uppaftur, inntil HD er komin upp á pláss aftur.

Útskifting
Um ongin fjórði dómari er, skal HD fara yvir til miðlinjuna fyri at hjálpa við útskiftingini; dómarin skal ikki taka leik uppaftur, fyrr enn HD er komin upp á pláss aftur.

Um ein fjórði dómari er, skal HD ikki fara yvir til miðjuna, tí at fjórði dómarin tekur sær av útskiftingini. HD skal bert fara yvir til miðjuna, um talan er um fleiri útskiftingar samstundis.

Kropsmál, samskifti og floyta

1. Dómarar

Kropsmál

Kropsmál er eitt amboð, sum dómarin nýtir til at:

- hjálpa við at hava tamarhald á dystinum
- sýna myndugleika og hava ræði á sær sjálvum Kropsmál er ikki ein frágreiðing um eina avgerð.

Tekn

Sjá § 5 fyri at síggja myndir av teknum

Floyta

Floytan verður nýtt til:

- at taka leik upp (byrjan av fyrsta og øðrum hálvleiki í vanligari leiktíð og eyka tíð), eftir mál er skorað
- steðga leiki
  - til eitt fríspark ella eitt brotsspark
  - um dysturin verður steðgaður ella slitin
  - til endans í hvørjum hálvleiki
- taka leik uppaftur tá:
  - fríspørk skulu takast, har kravda fjarstøðan hevur týdning
  - brotsspørk skulu takast
- taka leik uppaftur, tá hann er steðgaður fyri:
  - ávaring ella útvísing
  - skaða
  - útskifting

Floytan verður IKKI nýtt til:

- at steðga leiki fyri eitt týðiligt:
  - málspark, hornaspark, innkast ella mál
- at taka leik uppaftur fyri:
  - flestu fríspørk, málspark, hornaspark, innkast ella uppkast

Um floytan verður nýtt ov ofta ella óneyðugt, missir hon ávirkan, tá ið tørvur er á henni.

Um dómarin vil hava leikararnar at bíða, inntil hann hevur floytað, áðrenn leikur verður tikin uppaftur (t.e. fyri at tryggja, at verjandi leikararnir eru 9,15 metrar frá bóltinum), skal hann týðiliga geva teimum áleypandi leikarunum boð um at bíða, inntil hann hevur floytað.

Um dómarin floytar av óvart, skal leikur takast uppaftur við uppkasti.

2. Hjálpardómarar

BIP-tekn

Skipanin við BIPteknum verður einans nýtt til at fáa dómaran at geva gætur. Støður, har BIPtekn kunnu vera nyttulig eru:

- rangstøða
- brot (uttan fyri sjónarhorn dómarans)
- Innkast, málspark, hornaspark ella mál (tættar avgerðir/har tað er um reppið)

Elektronisk samskiftisskipan

Tá ið samskiftistól verða nýtt, skal dómarin geva HD boð um, nær tað sømir seg at nýta hetta saman við ella ístaðin fyri likamlig tekn.

Flaggførleiki

Flaggið hjá HD skal ongantíð vera rullað saman, og tað skal altíð vera sjónligt hjá dómaranum. Hetta merkir vanliga, at flaggið verður borið í tí hondini, sum er nærri dómaranum. Tá ið ein avgerð verður tikin, steðgar HD við at renna, hyggur inn á vøllin, fær eygnasamband við dómaran og lyftir flaggið við eini tilvitaðari (ikki bráðari ella ógvisligari) rørslu. Armurin skal verða strektur. HD skal lyfta flaggið við tí hondini, sum verður nýtt til næsta tekn. Um viðurskiftini broytast, og hin hondin má nýtast, skal HD flyta flaggið í hina hondina undir mjødnini. Um HD ger tekn um, at bólturin er farin úr leiki, skal hann halda fram við at gera tekn, inntil dómarin hevur viðurkent hetta.

Um HD ger tekn fyri eitt brot, sum førir til útvísing, og dómarin ikki sær hetta beinanvegin:

- um leikur er steðgaður, kann uppafturtøkan broytast sambært Fótbóltslógini (fríspark, brotsspark o.s.fr.)
- um leikur er tikin uppaftur, kann dómarin framvegis fremja agarevsing, men hann kann ikki sekta brotið við einum frísparki ella brotssparki

Handarbrá

HD skulu undir vanligum umstøðum ikki nýta týðilig handarbrá. Tó kann eitt varligt tekn við hondini viðhvørt hjálpa dómaranum. Handarbráið eigur at hava greiða meining, og skal hetta verða avtalað í tosinum undan dystarbyrjan.

Tekn

Sjá § 6 fyri at síggja myndir av teknum

Hornaspark/málspark

Tá ið bólturin, allur sum hann er, fer um mállinjuna nær við HD, skal hann geva tekn við høgru hond (betri útsýni) fyri at vísa, um talan er um horna ella málspark. Tá ið bólturin, allur sum hann er, fer um mállinjuna, skal HD lyfta flaggið fyri at vísa dómaranum, at bólturin er farin úr leiki, og síðani:

- um tað er nær við HD – vísa, um tað er málspark ella hornaspark
- um tað er langt frá HD – fáa eygnasamband við dómaran og fylgja avgerð hansara. HD kann eisini gera eitt beinleiðis tekn, um talan er um eina týðiliga avgerð

Tá ið bólturin týðiliga fer út um linjuna, er ikki neyðugt hjá HD at lyfta flaggið fyri at vísa, at bólturin er farin út av vøllinum. Um málsparkið ella hornasparkið er týðiligt, er ikki neyðugt at gera tekn; serliga tá ið dómarin ger tekn.

Fríspørk

HD skal lyfta flaggið, um eitt fríspark ella óhøviskur atburður verður framdur í hansara nærumhvørvi ella uttan fyri sjónarhorn dómarans. Í øllum øðrum støðum, skal HD bíða, koma við einum tilmæli, um tað er neyðugt, og siga dómaranum, hvat hann hevur sæð og hoyrt, og hvørjar leikarar, talan er um.

Áðrenn tekn verður givið um eitt brot, skal HD gera av, at:

- brotið varð framt uttan fyri sjónarhorn dómarans, ella at útsýnið dómarans var forðað
- dómarin ikki hevði nýtt fyrimunarregluna

Tá ið eitt brot, sum krevur tekn frá HD, verður framt, skal HD:

- lyfta flaggið við somu hond, sum verður nýtt til restina av tekninum – hetta gevur dómaranum eina greiða fatan av, hvør fer at fáa frísparkið
- fáa eygnasamband við dómaran
- rista flaggið eitt sindur (sleppa undan at gera tað á ógvisligan ella ágangandi hátt)

HD skal nýta "bíða og hygg" fyri at lata leik halda fram og ikki lyfta flaggið, um liðið, sum brotið verður framt ímóti, fær gagn av fyrimunarregluni; tí er tað sera týdningarmikið, at HD fær eygnasamband við dómaran.

Fríspørk inni í brotssparksteiginum

Tá ið ein verjuleikari fremur eitt brot inni í egnum brotssparksteigi uttan fyri sjónarhorn dómarans (serliga um hetta er nær við HD), skal HD fyrst fáa eygnasamband við dómaran fyri at síggja, hvar hann er staddur, og hvør avgerð skal takast. Um dómarin onga avgerð tekur, skal HD gera tekn við flagginum, nýta BIP"ið og sjónliga flyta seg eftir síðulinjuni móti hornaflagginum.

Fríspørk uttan fyri brotssparksteigin

Tá ið eitt brot verður framt av einum verjuleikara uttan fyri brotssparksteigin (nær við brotssparksteigarlinjuna), skal HD fáa eygnasamband við dómaran fyri at síggja, hvar hann er staddur, og hvørja avgerð hann tekur, og gera tekn við flagginum um neyðugt. Í støðum við skjótálopum, eigur HD at vera førur fyri at siga dómaranum, um eitt brot er framt ella ikki, um brotið er framt innan fyri ella uttan fyri brotssparksteigin, og um nøkur agarevsing eigur at verða givin. HD eigur at flyta seg týðiliga móti miðlinjuni fyri at gera vart við tað, um brotið varð framt uttan fyri brotssparksteigin.

Mál/ikki mál

Tá ið tað er týðiligt, at bólturin, allur sum hann er, er farin um mállinjuna í málið, skal HD fáa eygnasamband við dómaran uttan at gera onnur tekn.

Tá ið eitt mál er skorað, men tað ikki er týðiligt, at bólturin, allur sum hann er, er farin um mállinjuna, skal HD fyrst lyfta flaggið fyri at fáa dómaran at geva tí gætur og síðani vátta málið.

Rangstøða

Tað fyrsta, HD skal gera, tá ið rangstøðubrot verður framt, er, at hann skal lyfta flaggið (hetta skal gerast við høgru hond, so hann hevur betri útsýni); so skal hann, um dómarin steðgar leiki, nýta flaggið fyri at vísa, hvar á vøllinum brotið varð framt. Um dómarin ikki sær flaggið beinanvegin, skal HD halda flagginum uppi, inntil dómarin hevur sæð tað, ella inntil verjandi liðið týðiliga hevur tamarhald á bóltinum.

Brotsspark

Um málmaðurin týðiliga flytur seg av linjuni, áðrenn bólturin er sparkaður, og hetta forðar einum máli í at verða skorað, skal HD geva dómaranum boð um brotið sambært teimum boðum, hann hevur fingið frá dómaranum áðrenn dystin.

Útskifting

Tá ið HD hevur fingið boð um eina útskifting (frá fjórða dómaranum ella einum hjálparfólki), skal HD geva dómaranum tekn um hetta, næstu ferð steðgur er í leiki.

Innkast

Tá ið bólturin, allur sum hann er, fer um síðulinjuna:

- nær við HD – eigur eitt beinleiðis tekn, sum vísir, hvør eigur innkastið, at vera gjørt
- langt frá HD og avgerðin er týðilig – skal HD geva eitt beinleiðis tekn fyri at vísa, hvør eigur innkastið
- Langt frá HD, og HD ivast í, hvør eigur innkastið – eigur HD at lyfta flaggið fyri at vísa dómaranum, at bólturin er farin úr leiki, fáa eygnasamband við dómaran og geva sama tekn sum dómarin

3. Eyka hjálpardómarar

EHD nýta samskiftistól (ikki fløgg) til at samskifta við dómaran. Um samskiftistólið ikki riggar, nýtir EHD elektrisk BIPtekn við eini flaggstong. Vanliga nýta EHD ikki handarbrá, men viðhvørt kann eitt varligt tekn verða dómaranum til hjálpar. Handarbráið skal hava greiða meining, og eigur hetta at vera avtalað í tosinum undan dystarbyrjan.

Tá ið EHD hevur mett, at bólturin, allur sum hann er, er farin um mállinjuna í málið, skal hann:

- beinanvegin umvegis samskiftistólið, boða dómaranum frá, at mál skal dømast
- gera tekn við vinstra armi, sum er vinkulrættur við mállinjuna, við at peika ímóti miðlinjuni (flaggstongin skal havast í vinstru hond). Hetta tekn er ikki kravt, um bólturin týðiliga er farin um mállinjuna

Dómarin tekur endaligu avgerðina.

Onnur góð ráð

1. Fyrimunur

Dómarin kann lata fyrimunin ráða, hvørja ferð eitt brot verður framt, men hann eigur at hava fylgjandi í huga, tá ið hann ger av, um fyrimunur skal nýtast, ella um leikur skal steðgast:

- álvarsemið í brotinum – um brotið førir útvísing við sær, skal dómarin beinanvegin steðga leiki og reka leikaran av vølli, um talan ikki er um ein týðiligan málmøguleika
- staðið har brotið varð framt – ein fyrimunur er betri, tess nærri mótleikaranna máli hann er
- møguleikarnir fyri beinanvegin at fáa eitt lovandi álop
- huglagi/sinnistøðan í dystinum

2. Tíð, sum verður løgd afturat

Nógvir steðgir í leiki eru púra natúrligir (t.e. innkast, málspørk). Tíð skal bert leggjast afturat, um hesir steðgir verða drúgvir.

3. At halda einum mótleikara

Dómarar verða mintir á at leggja tíðliga upp í brot, har tað verður hildið, og sekta tey – serliga inni í brotssparksteiginum í sambandi við hornaspørk og fríspørk. Tá ið dómarin fæst við slíkar støður, skal hann:

- munnliga ávara leikarar, ið halda einum mótleikara, áðrenn leikur er tikin uppaftur
- ávara leikaran, um hann heldur fram við at halda, áðrenn leikur er tikin uppaftur
- døma beinleiðis fríspark ella brotsspark og ávara leikaran, um hetta hendir, eftir at leikur er tikin uppaftur

4. Rangstøða



Ein áleypari, **sum er rangstaddur** (A), og sum ikki órógvar ein mótleikara, **nertur bóltin**. Hjálpardómarin skal lyfta flaggið, tá ið áleyparin **nertur bóltin**.



Ein áleypari, **sum er rangstaddur** (A), og sum ikki órógvar ein mótleikara, **nertur ikki bóltin**. Leikarin kann ikki revsast, tí hann nertur ikki bóltin.



Ein áleypari, **sum er rangstaddur** (A), rennur ímóti bóltinum, og ein viðleikari, **sum ikki er rangstaddur** (B), rennur eisini ímóti bóltinum og spælir bóltin. Leikari (A) kann ikki revsast, ti hann nertur ikki bóltin.



Ein leikari, **sum er rangstaddur** (A), kann verða revsaður, áðrenn hann spælir ella nertur bóltin, um dómarin metir, at eingin av liðfeløgunum, sum ikki eru rangstaddir, kunnu spæla bóltin.



Ein áleypari, **sum er rangstaddur** (1), rennur ímóti bóltinum, men **nertur ikki** bóltin. Hjálpardómarin skal tá geva tekn um, at tað er **málspark**.



Ein áleypari, **sum er rangstaddur** (A), tekur sýnið hjá málmanninum. Hann skal revsast, tí hann forðar einum mótleikara at spæla bóltin ella at verða førur fyri at spæla bóltin.



Ein **rangstaddur** áleypari (A), tekur **ikki** sýnið hjá málmanninum, og hann stríðist heldur ikki við hann um bóltin.



Ein áleypari, **sum er rangstaddur** (A), rennur ímóti bóltinum, men hann forðar ikki mótleikaranum at spæla bóltin ella at kunna spæla bóltin.
(A) stríðist **ikki** við (B) um bóltin.



Ein áleypari, **sum er rangstaddur** (A), rennur ímóti bóltinum og forðar mót leik aranum (B) í at spæla ella kunna spæla bóltin við at stríðast við mótleikaran um bóltin. (A) stríðist við (B) um bóltin.



Ein áleypari, **sum er rangstaddur** (B), verður sektaður fyri at **spæla ella nerta ein bólt**, sum støkkur, verður rættaður av út til hansara ella verður spældur til hansara frá eini tilvitaðari bjarging av málmanninum, eftir at **hava verið rangstaddur**, tá ið bólturin seinast var nortin ella spældur av einum viðleikara.



Ein áleypari, **sum er rangstaddur** (B), verður sektaður fyri at **spæla ella nerta ein bólt**, sum støkkur, verður rættaður av út til hansara ella verður spældur til hansara frá einari tilvitaðari bjarging av einum leikara á verjandi liðnum (C), eftir at **hava verið rangstaddur**, tá ið bólturin seinast var nortin ella spældur av einum viðleikara.



Skotið frá einum viðleikara (A) støkkur frá málmanninum. (B) er ikki rangstaddur og spælir bóltin. (C), **sum er rangstaddur**, verður ikki sektaður, tí hann vann ikki ein fyrimun við at vera rangstaddur, tí hann nart ikki bóltin.



Skotið frá einum viðleikara (A) støkkur ella verður rættað av frá einum mótleikara til ein áleypara (B), sum verður sektaður fyri at **spæla ella nerta bóltin**, eftir at hann **var rangstaddur**.



Áleypari (C) er **rangstaddur**, men hann forðar ikki nøkrum mótleikara, tá ið liðfelagi (A) spælir bóltin til leikara (B1), sum ikki er rangstaddur, og sum rennur móti málinum hjá mótstøðuliðinum og spælir bóltin (B2) til liðfelaga (C). Áleypari (C) kann ikki revsast, tí tá bólturin varð spældur til hansara, **var hann ikki rangstaddur**.

5. Skaðar

Trygd leikaranna er av størsta týdningi. Dómarin skal lætta um arbeiðið hjá læknaligum starvsfólki; serliga tá ið talan er um álvarsligan skaða og/ella tá ið talan er um at meta um høvuðskaðar. Mannagongdir viðvíkjandi skaðaviðgerð, sum semja er fingin um, skulu virðast.

6. Viðgerð/meting eftir eina ávaring/útvísing

Fyrr var tað soleiðis, at ein skaddur leikari, sum fekk læknaliga hjálp á vøllinum, mátti av vøllinum, áðrenn leikur varð tikin uppaftur. Hetta kann vera órættvíst, um ein mótleikari var orsøk til skaðan, og mótstøðuliðið á henda hátt fær ein fyrimun í leikaratali, tá ið leikur verður tikin uppaftur.

Hetta krav kom av fyrstan tíð, tí at leikarar ofta á óhøviskan hátt nýttu ein skaða til at seinka uppafturtøku av leiki av taktiskum ávum.

Sum eina javnvág millum hesar órættvísu støður, hevur IFAB tí gjørt av, at ein skaddur leikari kann fáa skjóta meting/viðgerð á vøllinum uttan at skula av vølli, áðrenn leikur verður tikin uppaftur, um brotið, sum førdi til skaðan, hevði ávaring ella útvísing við sær.

Í roynd og veru eigur seinkingin ikki at vera longri, enn hon er nú, tá læknaligir persónar koma á vøllin fyri at meta um ein skaða. Munurin er, at tá dómarin plagdi at biðja læknaligu persónarnar og leikaran fara av vølli, biður hann nú bert læknaligu persónarnar fara av vølli, meðan leikarin verður verandi.

Fyri at tryggja, at skaddi leikarin ikki leingir steðgin á óhøviskan hátt, verður viðmælt dómarum:

- vera greiðir yvir, hvussu støðan er í dystinum, og um nøkur taktisk orsøk er til at seinka uppafturtøku av leiki
- gera leikaranum greitt, at um honum tørvar læknahjálp, skal tað gerast skjótt
- gera tekn til læknaligu persónarnar (ikki teir við børuni) og, um gjørligt minna teir á at gera skjótt av

Tá ið dómarin ger av, at leikur skal takast uppaftur, skal antin:

- læknaligu persónarnir fara av vøllinum, og leikarin verður verandi ella
- leikarin fara av vølli fyri at fáa meira meting/viðgerð (tá kann gerast neyðugt at gera tekn um at fáa børuna inn á vøllin)

Í útgangsstøði eigur seinkingin ikki at vera meira enn 20–25 sekund frá tí, at øll vóru klár at taka leik uppaftur, undantikið í støðum har talan er um ein álvarsligan skaða og/ella at meta um høvuðskaða.

Dómarin skal leggja tíð afturat fyri steðgin.

Viðmerkingar

Viðmerkingar

IFAB®

THE INTERNATIONAL FOOTBALL ASSOCIATION BOARD

FA WALES FIFA